# GERÐABÓK

**Dato:** 12. desember 2024 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 299/24 – 320/24**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Bogi Jacobsen
Eyðfríð Jacobsen
Hermann Mortensen
Mortan Simonsen
Anna Havmand
Olga Knudsen
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. desember 2024 | Blað nr.: 1239<br><br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 299/24 | 24/00063-1 | Mál beind í nevndir 2024 | 1241 |
| 300/24 | 19/04397-1 | Golfvøllur á Glyvursnesi - byggiverkætlan | 1243 |
| 301/24 | 23/00098-1 | Vøllurin inni í Vika – nýggj ljósskipan v.m. | 1251 |
| 302/24 | 24/08859-3 | Gøtunavnanevndin : Gøtunavn til íbúðirnar hjá Bústøðum við Dalavegin | 1255 |
| 303/24 | 23/06296-4 | Svimjihøllin 2024 – Prísskipan og upplatingartíðir | 1257 |
| 304/24 | 21/00581-2 | HB : Umsókn um íløgustuðul til umbyggingar í HB-húsinum | 1263 |
| 305/24 | 21/00888-5 | B36 : Umsókn um íløgustuðul til umvælingar v.m. í B36-húsinum | 1266 |
| 306/24 | 23/05071-9 | Nýggj skatepark | 1269 |
| 307/24 | 23/02421-1 | Framtíðar byggilendi í Kollafirði | 1272 |
| 308/24 | 24/07046-1 | Málslýsing - Vallgarður Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin | 1279 |
| 309/24 | 23/03741-10 | málslýsing - Áheitan at TK flytir part av gøtu, sum er á privatum øki matr. nr. 1228d, Hjaltarók | 1281 |
| 310/24 | 21/02624-2 | Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging | 1284 |
| 311/24 | 22/00329-1 | Sethúsaútstykking á Velbastað – partur av matr. nr. 51a | 1294 |
| 312/24 | 21/02196-2 | Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK | 1302 |
| 313/24 | 23/03480-1 | Innkomuvegur – íbindingar o.a. | 1316 |
| 314/24 | 23/03134-5 | Fríðkan av bygdunum - Hvítanes | 1320 |
| 315/24 | 24/08944-2 | Tórshavnar havn : Reglugerð fyri skúrar til smábátar | 1323 |
| 316/24 | 23/02523-1 | Lántøka og gjaldføri 2023 | 1326 |
| 317/24 | 24/00061-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024 | 1329 |
| 318/24 | 24/08760-1 | Ásetan av fundardøgnum fyri býráðið 2025 | 1333 |
| 319/24 | 17/03628-1 | Heildarætlan Eystara havnarøki | 1334 |
| 320/24 | 24/08603-2 | Streetfood Tórshavn : Umsókn um at leiga 5.hædd (Hjallin) á Bacalao til Streetfood virksemi | 1350 |

**Til viðgerðar**

## 299/24 Mál beind í nevndir 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 3/24 | 24/00063-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 27/24 | 24/00063-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 51/24 | 24/00063-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 72/24 | 24/00063-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 109/24 | 24/00063-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 142/24 | 24/00063-1 |
| 7 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 195/24 | 24/00063-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 240/24 | 24/00063-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 284/24 | 24/00063-1 |
| 10 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 299/24 | 24/00063-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. desember 2024 | Blað nr.: 1242<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

## 300/24 Golfvøllur á Glyvursnesi - byggiverkætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 309/19 | 19/04397-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 305/19 | 19/04397-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 271/19 | 19/04397-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 66/20 | 19/04397-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 77/20 | 19/04397-1 |
| 6 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 54/20 | 19/04397-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 277/20 | 19/04397-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 280/20 | 19/04397-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 220/22 | 19/04397-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 297/22 | 19/04397-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 281/22 | 19/04397-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 10.04.2024 | 93/24 | 19/04397-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 30.10.2024 | 202/24 | 19/04397-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 06.11.2024 | 268/24 | 19/04397-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 285/24 | 19/04397-1 |
| 16 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 300/24 | 19/04397-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fyrr í ár varð sáttmáli gjørdur við avvarðandi festara og Búnaðarstovuna um endurgjald og leigu av økið 522.000 fermetur stórt á Glyvursnesi.

Sambært sáttmálanum skulu øll arbeiðir, ið fevnd eru av endurgjaldinum so sum girðingar og nýdyrking, verða avgreidd í seinasta lagi 31. desember 2022. Festarin hevur somuleiðis fullan og óskerdan nýtslurætt til gamla seyðahúsið og maskinhøll, fram til nýggja seyðahúsið við maskinhøll er bygt, tó í seinasta lagi 31. desember 2022.

Festarin hevur longu søkt um byggiloyvi til nýtt seyðahús.

Sambært sáttmálanum § 14,2 áliggur kommununi innan trý ár frá avtaludegnum at prógva fyri Búnaðarstovuni, at arbeitt verður ítøkiliga at gjøgnumføra verkætlanina at byggja golfvøll.

Ætlanin er nú at byrja sjálvt byggimálið, ið hevur sum fortreyt, at golfvøllurin verður bygdur í stigum alt eftir fígging. Í tillagaða verkætlanaruppskotinum frá 2017 varð lagt upp til, at hvørt byggistigið fevnir um trý hol, íroknað lendisgøtur, og at mál í fyrsta umfari er at byggja golfvøll við 9 holum, sum seinni kann byggjast út til fullan vøll 18 hol.

Søkt er um at broyta byggisamtyktina fyri partin av Glyvursnesi, sum fevndur er av golfvøllinum. Hetta er við at koma undir land.

**Verkætlanartilgongd**
Ætlanin er at skipa bólk at fyrireika byggiverkætlanina við umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Harumframt tilnevnir Tórshavnar Golffelag umboð í bólkin.

Ymisk stig eru í hesi fyrireikandi tilgongd.

Í fyrsta lagi er at fáa til vega projekttilfar. Í verkætlanaruppskotinum frá 2017 er lagt upp til projektering og bygging stig fyri stig yvir eitt fimm ára tíðarskeiðl. Design av golfvøllinum við lendisgøtum fyriliggur, men neyðugt at er nágreina hetta bæði viðvíkjandi lendistillagingum, nøgdum av tilfari (sand, mold v.m.), vatnleiðing, dren o.a.

Ætlan er tí at fáa í lag avtalu við golfvallararkitektin um ráðgeving at byggja golfvøll á altjóða støði á Glyvursnesi. Partur av hesum er eisini at fáa til vega útbjóðingartilfar, kostnaðarmeting av anleggsarbeiðinum og tíðarætlan fyri bygging í stigum.

Hetta tilfar er grundarlag fyri umsókn til byggimyndugleikan og friðingarmyndugleikarnar um loyvi at byggja golfvøllin við tilhoyrandi installatiónum.

Hugskot hevur verið, at kaikanturin, sum gjørdur er á Glyvursnesi í sambandi við havnaútbyggingina, kann vera verandi til við tíðini at skapa eitt maritimt umhvørvi til frítíðarafelagsskapir, ferðavinnu v.m. Tórshavnar havn er av friðingarmyndugleikunum áløgd at taka burtur kaikantin, tá liðugt er at taka grót til havnabyggingina. Verandi kaikantur er heldur ikki bygdur til at halda leingi aftrat. At tryggja kaikantin at halda fleiri ár aftrat er kostnaðarmikið.

Í sambandi við byggitilgongdina er ynski, at tilfar til golfvøllin – m.a. mongd av sandi – kann siglast og fáast uppá land um kaikantin, heldur enn at verða koyrt eftir Glyvursvegnum. Kommunan kann søkja friðingarmyndugleikarnar um at leingja loyvið til kaikantin til endamáliðj við golfvøllinum. Spurningur er eisini, um hesin flutningur kann ella skal gerast í nærmastu framtíð, áðrenn kaikanturin ikki longur er nýtiligur.

Ætlanin er eisini at fáa gjørt ymsar vakstrarroyndir úti á Glyvursnesi eitt nú við ymsum grassløgum og at byggja eina *putting green* upp frá grundini.

Hvussu langt hesar fyrireikingar kunnu koma, er tengt at, hvør fígging er til endamálið. Til ber at geva neyvari meting um ráðgevarakostnaðin, tá samráðing hevur verið við golfvallararkitektin. Skal sandur og annað tilfar siglast út til Glyvursnes í nærmastu framtíð, er neyðugt við fígging. At gera ymsar royndir við tilfari og grasi krevur eisini fígging.

Í 2017 varð skotið upp at byggja 9 hol yvir eitt fimm ára tíðarskeið. Mett varð, at miðalkostnaður fyri hvørt holið er kr. 3 mió, tvs. ein samlaður kostnaður uppá kr. 27 mió. Tá varð skotið upp fígging í hesum lutum:

| Ár | Tkr. | Arbeiði |
|---|---|---|
| 1 | 4.000 | Projektering og snið. Fara undir holini 1-3 |
| 2 | 5.000 | Gera holini 1-3 liðug. Projektering og snið, fara undir holini 4-6 |
| 3 | 9.000 | 3 hol klár at brúka. Gera holini 4-6 liðug. Fara undir holini 7-9. Vatngoymsla. Venjingar-/upphitingarøki |
| 4 | 6.000 | 6 hol klár at brúka. Gera holini 7-9 liðug. Leggja ætlan fyri næstu 9 holini. |
| 5 | 3.000 | 9 hol klár at brúka. |

Felagshús og maskinhøll/tilfarsgoymsla er ikki íroknað.

Umframt kommunala íløgufígging er ætlanin saman við Golffelagnum at kanna møguleikar fyri uttanhýsis fígging bæði innlendis og í altjóða golfumhvørvinum. Í løtuni er fígging á løgukontuni til golfvøllin bert til at fíggja avtalaðu endurgjaldsupphæddina kr. 9.843.016 sambært sáttmálanum um lendið. Kommunan

eigur í hesum sambandi at heita á landsstýrið um at halda avtaluna, sum gjørd er um, at landið ber endurgjaldskostnaðin og kommunan byggir og fíggjar golfvøllin.

Golfvøllurin hevur týdning fyri onnur mál í økinum, eitt nú Glyvursvegurin frá Hamrinum og út á nesið. Talan er í dag um arbeiðsveg, sum einaferð skal gerast samsvarandi vegstandardi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- at seta fyrireikandi verkætlanarbólk sum omanfyri lýst at fáa til vega uppskot til ráðgevaraavtalu við golfvallararkitekt at leggja aftur fyri nevnd
- at søkja friðingarmyndugleikarnar um loyvi til at brúka kaikantin á Glyvursnesi eftir, at havnabyggingin er liðug, til at føra sand og annað tilfar til golfvøllin
- at senda landsstýrinum áheitan um fígging til endurgjaldsupphæddina
- at játtan til bygging av golfvøllinum verður fingin til vega á íløguætlaninini, og
- at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært sáttmálanum um lendi til golfvøll á Glyvursnesi (j.nr. 14/00612) fall fyrsti avdráttur av gjaldinum kr. 2.460.754 til gjaldingar 1. november 2019. Samlaða sáttmálauppæddin er kr. 9.843.016.

Í løgukarminum 5775 Ítróttaranlegg fyri 2020 eru settar kr. 3,5 mió av til golfvallarverkætlanina. Næsti avdráttur uppá kr. 2.460.754 fellur til gjaldingar 1. november 2020. Teir báðir síðstu avdráttirnir fella til gjaldingar ávikavist 1. november 2021 og 1. november 2022.

Leigusáttmáli
Formligi nýtslurætturin hjá kommununi yvir lendinum sambært omanfyri nevnda sáttmála verður staðfestur í leigusáttmála millum kommununa og Búnaðarstovuna. Leigusáttmálin hevur heimild í lógini um landsjørð § 7a. Uppskot til leigusáttmála er nú klárt at samtykkja.

Leigugjald um lendi til almannagagnligt endamál er kr. 5.000 um árið, ið verður prístalsviðgjørd árliga. Uppkrav verður sent hvønn 1. desember, og fyrstu ferð hin 1. desember 2020. Leigusáttmálin er galdandi til 1. januar 2060, tvs., at talan er um leigumál í 40 ár, sum tá kann leingjast.

Matrikuleringsbroytingarnar eru ikki avgreidd enn. Formliga er tí talan um fyribils leigusáttmála. Tá matrikuleru viðurskiftini eru avgreidd, kann avtalan dagførast og tinglýsast.

Sambært sáttmálanum um lendið er tað kommunan, ið skal rinda kostnaðir til matrikulering og tinglýsing. Hesir kostnaðir eru tí ikki staðfestir enn og eru aftrat teimum kr. 9,843 mió nevndar omanfyri.

Byggiverkætlanin
Tøk játtan at arbeiða við sjálvari verkætlanini í 2020 er umleið kr. 750.000. Í langtíðaríløguætlanini er lagt upp til fígging árini 2021-2023 uppá kr. 22,5 mió.

Næsta stig er nú at fáa framleitt neyðugt projekttilfar til myndugleikaviðgerð, harundir eisini friðingarmyndugleikarnar. Ætlanin í ár er eisini at fáa gjørt ymsar vakstrarroyndir við ymsum grassløgum og mold/sand-blandingum.

Gongst væl eisini viðvíkjandi myndugleikaviðgerðini, er mál at byrja byggingina av golfbreyt/holi 1 í ár.

Til byggiverkætlanina er neyðugt at gera ráðgevingaravtalu við golfvallararkitektin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at:
- góðkenna uppskotið til 40-ára leigusáttmála við Búnaðarstovuna um lendið,
- geva fyrisitingini heimild at samráðast við golfvallararkitektin um ráðgevingaravtalu,
- at játta kr. 3,5 mió av løgukarmi 5775 Ítróttaranlegg ætlað golfvølli til løgukontu L57016 Golfvøllur, og
- at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanaruppskotið er nú so mikið búgvið, at til ber at fastleggja golfvallarsniðið og verkætlanarfasurnar, sum tryggja, at til ber at spæla golf samstundis sum bygt verður. Tær tríggjar fasurnar fevna um 9 hol/breytir, gøtusamband v.m., samstundis sum lagt er upp til at kunna vaksa um vøllin til 18 hol við tíðini.

Eftir ætlan verður verkætlanartilfarið sent til myndugleikaviðgerð, harundir byggiloyvi, í næstum, so at útbjóðing av verkætlanini kann fremjast um ársskiftið.

Mett verður skilabest, at tær tríggjar fasurnar verða bjóðaðar út í einum. Fyrimunur við hesum er, at arbeiðstakari er knýttur at verkætlanini, so at vitan um golfvallarbygging ítøkiliga ikki skal fáast til vega av nýggjum fyri hvørja fasu, og at hetta væntandi eisini hevur fyrimun at halda kostnaðinum niðri.

Tilfar íroknað kostnaðarmeting verður løgd fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fylgja lýstu verkætlanartilgongdini soleiðis, at umsitingin fær heimild til at søkja um neyðugu myndugleikaloyvini, og at verkætlanin eftirfylgjandi kann bjóðast út í innbodnari lisitatión.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Harumframt mælir ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, til at verkætlanin eftirfylgjandi verður bjóðað út alment.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við minnilutanum í mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Golfverkætlanin er nú komin hartil, at myndugleikaviðgerðin í mun til endaligt byggiloyvi er í gongd, og tilfarið at bjóða arbeiðið út er í gerð. Eisini hevur kommunan nú goldið øll endurgjøld sambært sáttmálanum millum kommununa, Búnaðarstovuna og festaran um lendið.

Samráðst er við Edwin Roald, golfvallararkitekt, um ráðgevarasáttmála í sambandi við byggingina av golfvølli við 9 holum, sum er fyrsta byggistig. Edwin Roald hevur staðið fyri verkætlanaruppskotunum, sum gjørd eru fyri kommununa í 2013 og 2017, og hevur saman við verkætlanarbólkinum, har Golffelagið er umboðað, arbeitt víðari við uppskotinum og nágreining av staklutum bæði viðvikjandi lendinum og installatiónum).

Uppskotið til byggistig I heldur seg innnanfyri verandi byggisamtykt á syðra partinum av Glyvursnesi og ger seg sostatt ikki inn á vegir, sum Tórshavnar havn hevur gjørt í sambandi við havnabygging.

Uppskotið um ráðgevarasáttmála fevnir um veitingar í sambandi við byggistig I, sum er totalráðgeving, herundir sniðgeving og projekt, útbjóðingartilfar og ráðgeving undir útinning v.m. Samlaður kostnaður á hetta ráðgevaraarbeiðið er áljóðandi kr. 1.180.000.

Verkætlanin hevur lagt seg eftir hugsjónum um, hvussu ein burðardyggur altjóða golfvøllur skal byggjast, hetta bæði við atliti

- at tálma byggikostnaðinum,
- at golfvøllurin er lættur av røkja og soleiðis tálma rakstrarútreiðslunum,
- at ítróttaliga upplivingin verður eftir altjóða standardi,
- at gera góðar og lættgongdar lendisgøtur, ið knýtir allan vøllin saman, og sum almenningur eisini fær gleði av,
- at dentur er lagdur á umhvørvið og náttúruna sum heild, og har serfyribrigdi kunnu verða bygd inn í sniðið sum varandi virði, og
- at talan er um strategiska kommunala íløgu í golfítróttina, fólkaheilsuna, ferðavinnuna, náttúrudepil v.m.

<u>Felagsumstøður</u>
Sum partur av endugjaldssáttmálanum yvirtekur kommunan eisini seyðahúsið á Glyvursnesi. Formliga er hetta 1. juli 2023. Golffelagið ynskir at gera húsið um til felagshús sum liður í at seta ferð á menningina av golfspælinum og golfumhvørvinum sum heild, meðan golfvøllurin verður bygdur.

Húsið kann við ávísum umbyggingum hýsa øllum hentleikum hjá felagnum, leikarum, vitjandi og ferðafólkum bæði til kapping, venjing og sosialt uppihald. Haraftrat ætlar felagið at seta upp golfsimulatorar til venjing og spæl.

Húsið sum tað er ella útbygt kann eisini hýsa atknýttar funktiónir til golfvøllin eitt nú viðvíkjandi garasju, goymslu, útgerð, tøknirúmi, tilfar v.m.

Neyv ætlan um umbygging og dagføring av húsinum fyriliggur ikki, heldur ikki kostnaðarmeting. Eitt tað fyrsta er at fáa at leggja el-leiðing til bygningin, talan er um uml. 350 metrar.

Mett verður skilagott, at gjørd verður avtala við Golffelagið um ætlanirnar viðvíkjandi felagshúsi v.m., harundir eisini stuðulsfígging.

<u>Útbjóðing</u>
Í 2018 varð mett, at golfvøllurin á Glyvursnesi við 9 holum fór at kosta umleið 28 mió. Eingin nýggjari kostnaðarmeting er gjørd, men við at bjóða arbeiðið út nú fæst tað staðfest. Við støði í hesum ber eisini til hjá býráðnum at leggja langtíðarætlan viðvíkjandi fíggingina av byggiarbeiðinum.
Ætlanin er at bjóða byggistig I út í høvuðsarbeiðstøku, har ið høvuðsarbeiðstakarin átekur sær at gera alt byggistig I, tó yvir eitt longri tíðarskeið (t.d 5 ár), soleiðis at tryggjað verður, at til ber at spæla golf á Glyvursnesi í byggitíðini. Nágreining og arbeiðslag verður avgreitt saman við vinnandi arbeiðstakaranum.

Verkætlanin kann sostatt verða játtað í stigum í mun til ávísa arbeiðið, sum skal gerast,
og arbeiðstakarin má leggja arbeiðið tilrættis eftir hesum treytum.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um gerð og uppbygnaður av 9 holum, hvar ið talan verður um avgrevstur av tilfari, boring og spreinging, javning av botni og uppfylling og planering fyri golfvølli, kloakk- og drenskipan, regnvatnsarbeiði og vatn-, el- og ljósarbeiði, v.m.

Umsitingin hevur ætlanir at bjóða føroyskan ráðgeva at standa fyri byggileiðslu og eftirlit á verkætlanini. Hetta verður í gjørt í samráð við golfvallararkitektin og umsitingina. Tá ið umsitingin hevur fingið tilboð á hetta arbeiðið, verður hetta lagt fyri nevnd aftur.

Tøk játtan til golfvøllin konta 5775 Ítróttaranegg L57016/LK57016 Golfvøllur á Glyrvursnesi er kr. 1.024.833. Harumframt eru í løgujáttan fyri 2023 kr. 2,5 mió aftrat. Samlað sostatt kr. 3.524.833.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at:

- samtykkja uppskotið til ráðgevarasáttmála og gera sáttmála við Edwin Roald, 1
- geva umsitingini heimild at bjóða út byggistig I eftir leisti, sum lýst omanfyri,
- í hesum sambandi at játta kr. 1.578.000 av løgukarmi 57016 og kr. 2,5 mió av løgujáttan í fíggjarætlanini fyri 2023 til løgukontu L57016 Golfvøllur á Glyvursnesi, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at kanna møguleikar fyri uttanhýsisfígging.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Elsa Berg legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at kommunan eisini langtíðarleigar øki við somu støðd at skipa sum náttúfufríøki.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, og Kristian Martin Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión var 03.04.24. Dómsnevndin hevur viðgjørt tilboðini til golfvøllin. Niðurstøðan er, at Sp/f Grettir hevur vunnið lisitatiónina, sí dømingar skjal nr. 1 og lisitatiónsúrslitið á skjal 2

**62.443.484,00 u/mvg**

Teknisk fyrisiting ynskir at fáa heimild til at fara undir samráðing um arbeiðstøku- og gjaldsætlanar sáttmála við Sp/f Grettir

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til, at mentamálanevndin tekur undir við, at teknisk fyrisiting fer undir samráðingar um arbeiðstøku- og gjaldsætlanar sáttmála til at leggja aftur fyri nevnd.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

| | Blað nr.: 1250 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. desember 2024 | Formansins merki: |

**Ískoyti:**
Støðutakan um arbeiðstøkusáttmála og gjalds- og tíðarætlan um bygging av golfvøllinum er klár at leggja fyri nevnd og býráð. Arbeiðstakarin stendur við tilboðnum til 1. februar 2025.

Umframt at fáa gongd á byggingina av sjálvum vøllinum, ynskir felagið at fáa hóskandi felagsumstøður í Seyðahúsinum. Hetta fevnir bæði um umvælingar og smærri broytingar. Partur av hesum er eisini at fáa høli og golfsimulator til venjingar. Hetta ger, at til ber hava ein virknan felagsskap í økinum, meðan byggingin av vøllinum fer fram.

Tøk játtan á løgukontu 5775 57016 Golfvøllur á Glyvursnesi er uml. kr. 1,8 mió. Skotið verður upp at játta kr. 1,5 mió til felagsumstøðurnar hjá golffelagnum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1,5 mió av 5775 57016 Golfvøllur á Glyvursnesi til felagsumstøðurnar hjá golffelagnum til kontu 5370 stuðul til íløgur, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina sum eykajáttan, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Mentamálanevndin 30. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. november 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 301/24 Vøllurin inni í Vika – nýggj ljósskipan v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 19/23 | 23/00098-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 6/23 | 23/00098-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 16/23 | 23/00098-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 13.09.2023 | 162/23 | 23/00098-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 223/23 | 23/00098-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 206/23 | 23/00098-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 27.11.2024 | 212/24 | 23/00098-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 04.12.2024 | 284/24 | 23/00098-1 |
| 9 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 301/24 | 23/00098-1 |

**Upprunin til málið**
Nýggj ljós til vøllin inni í Vika, sbrt. krøvum frá FSF.

**Lýsing av málinum**
Sbrt. vallarreglugerðini hjá FSF er kravið til stadion-ljós styrki uppá í minsta lagi 250 EV(lx). Kravið hevur verið galdandi í nøkur ár, og verandi ljósskipan lýkur ikki hesar treytirnar. Sostatt hevur leikvøllurin inni í Vika verið góðkendur upp á undantak seinastu árini. Verandi ljósskipan er heldur ikki nøktandi til vanligar venjingar.

Sbrt. mál 22/06615 (eykajáttan av meirinntøkum 2022) samtykti býráðið at seta kr. 3 mió. av til m.a. nýggja ljósskipan við vøllin inni í Vika.

Neyðugt er at gera ávísar kanningar av verandi mastrafundamentum og sjálvum mastrunum. Eisini skal kannast, hvør ljósskipan er best hóskandi fyri at uppfylla treytirnar í Vallareglugerðini hjá FSF, harafrtat skal hædd takast fyri ljósdálking. Royndirnar frá nýggju ljósskipanini á Ovara vølli verða eisini tiknar við.

Tíðarætlanin er, at øll ráðgeving viðv. mastrarfundamentum, mastrum og ljósskipan, harundir eisini møguliga atknýtt el-arbeiðir, er liðug um miðjan mars, so at útboð kunnu fara fram til várs, og at ljósskipanin er liðug at taka í nýtslu fram móti heystinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Vallarreglugerð FSF

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ljósskipanin á Ovara vølli
Ljósskipanin til Tórsvøll

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57039 | Fótbóltsvallir | 5775 | L57043 | Ljósskipan inni á Vika | Ja | 3.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at fáa til vega ráðgeving viðv. tekniskum installatiónum í sambandi við at fáa nýggja ljósskipan, og at umsitingin fær heimild til at bjóða út nýggja ljósskipan at leggja fyri nevnd til støðutakan.

Harumframt verður mælt til at játta kr. 3.000.000 av løgukarmi LK570390 til nýggja løgujáttan Ljósskipan inni á Vika. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við LBF innheintað tvey undirhondsboð upp á nýggja ljósskipan við mastrum og við tilhoyrandi útgerð. Samráðst hevur verið við báðar, ið bodnir vórðu at koma við undirhondsboði.

Undirhondsboðið frá Musco varð endaliga tað lægra, og uppfyllir tey flestu av krøvunum, ið vórðu sett báðum teimum bjóðandi.

Úrslit av undirhondsboðunum:

- Musco kann veita ljósskipan við rundum lukkaðum mastrum fyri 1,18 mió kr. u/mvg.
- Innstall kann veita ljósskipan við gittarmastrum fyri 1,48 mió kr. u/mvg.

Mælt verður til at taka av lægra undirhondsboðnum.

<u>Onnur arbeiðir og veitingar í sambandi við verkætlanina</u>
Undirhondsboðini fevna ikki um leiðingar í lendi fram til fundament, niðurtøkuarbeiði, grevstur og stoyping av nýggjum fundamentum. Fyri hesi arbeiði og veitingar er gjørd kostnaðarmeting, har roknað er við einum samlaðum kostnaði – ljós og fundament v.m., uppá kr. 3,12 mió mvg og ókent íroknað. Tøka játtanin á L57041 Vøllurin inni í Vika er kr. 3 mió. Tær kr. 120.000 kunnu fíggjast av løgukarmi LK57039 Fótbóltsvallir.

Ætlanin er, at vøllurin inni í Vika hevur nýggja ljósskipan, svarandi til krøvini hjá FSF til leikvøllir í meistaradeildini, tíðliga í 2024.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gera sáttmála við Musco um ljósskipan við mastrum og tilhoyrandi útgerð fyri kr. 1,18 mió u/mvg av kontu 5775 Ítróttaanlegg L57041 Vøllurin inni í Vika.

Vísandi til samlaðu kostnaðarmetingina verður mælt til at játta kr. 120.000 av løgukarmi LK57039 til løgukontu L57041 Vøllurin inni í Vika. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælnum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Játtaðar vóru samanlagt Kr. 3.120.000,00
Verkætlanarroknskapurin vísir, at brúktar vóru 3.414.949 kr.
Verkætlanarroknskapurin vísir, at tørvur er á einari restfígging á 295.000 kr. Hetta kann verða fíggja av LK 57039.

Verkætlanin gekk sum heild væl. Yvirskipað vóru avbjóðingar við atkomumøguleikunum, og her verður serliga hugsa um tí innastu mastrina. Annars er brúkarin er sera væl nøgdur við nýggju ljósini.

**Játtan:**

| | **Býráðsfundur**<br>12. desember 2024 | Blað nr.: 1254<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| **Játtast av:** | | | | **Játtast á:** | | | | | **Upphædd** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | | |
| 5775 | LK57039 | Fótbóltsvallir Argir/Hoyvík | | 5775 | L57041 | Vøllurin inni í Vika, nýggj ljósskipan v.m | Ja | | 3.120.000 |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Mentamáladeildini mæla til:

1. At loka verkætlanina L57041 Vøllurin inni í Vika, nýggj ljósskipan v.m.
2. At restfíggingin á 295.000 kr. verður fíggja av karmi LK57039
   At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið

**Mentamálanevndin 27. november 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>12. desember 2024 | Blað nr.: 1255<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 302/24 Gøtunavnanevndin : Gøtunavn til íbúðirnar hjá Bústøðum við Dalavegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 20.11.2024 | 2/24 | 24/08859-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 27.11.2024 | 207/24 | 24/08859-3 |
| 3 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 302/24 | 24/08859-3 |

**Upprunin til málið**
Umbøn frá Teknisku umsiting

**Lýsing av málinum**
Áheitan er komin frá Teknisku umsiting um at finna eitt gøtunavn til íbúðirnar hjá Bústøðum við Dalavegin.

Talan er sum so ikki um ein veg, sum kann koyrast eftir. Best er um íbúðirnar fáa egið gøtunavn og verður hetta gjørt við at seta navnið á ovaru innkoyring frá Dalavegnum. Mynd av økinum liggur sum skjal 24/08859-4.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Gøtunavnanevndin 20. november 2024:** Nevndin mælir til gøtunavnið Dalabú. Aðrar síðugøtur til Dalavegin eru Dalakrókur, Dalastígur og Dalalíð. Harumframt er Varðabú eisini í nánd.

**Mentamálanevndin 27. november 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

# 303/24 Svimjihøllin 2024 – Prísskipan og upplatingartíðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.02.2024 | 42/24 | 23/06296-4 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.03.2024 | 52/24 | 23/06296-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 58/24 | 23/06296-4 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 55/24 | 23/06296-4 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.04.2024 | 92/24 | 23/06296-4 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 82/24 | 23/06296-4 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 82/24 | 23/06296-4 |
| 8 Mentamálanevndin | 27.11.2024 | 209/24 | 23/06296-4 |
| 9 Fíggjarnevndin | 04.12.2024 | 283/24 | 23/06296-4 |
| 10 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 303/24 | 23/06296-4 |

**Upprunin til málið**
Uppskot frá leiðaranum í Svimjihøllini til prísir og upplatingartíðir.

**Hvussu nógv vitjandi kunnu vit vænta í framtíðini**
Tá kannast skal um hvussu nógv vitjandi væntandi koma tá nýggja svimjihøllin v/vælveruøki opnar, kann tað vera ein avbjóðing.
Vit hava tøl frá verandi høll at halda okkum til, og í fyrstu atløgu mugu vit vænta, at við nýggju fasilitetunum koma fleira vitjandi. Í løtuni er einans svimjihøllin í Klaksvík sum minnir um svimjihøllina í Gundadali, og um áleið 2 ár kemur nýggjur svimjihylur í Runavík, men hesin hevur onki vælveruøki.

Í 2017 var Herning Svømmehal í líknandi støðu sum svimjihøllin í Gundadali er í dag. Tá bygdu tey ein uppíbygning við einum 50 metra hyli. Áðrenn høvdu tey eins sum í Gundadali, ein 25m hyl. Støðan innan hesa útbyggingina var, at talið á vitjandi var minkandi, og høvuðsorsøkin var, at gamli hylurin var ov lítil. Eftir útbyggingina fór árliga vitjanartalið frá 110.000 til 170.000 – t.e. er ein hækking á 55%.

Taastrup svømmehal var eisini í somu líknandi støðu 2016, men hava ikki so greið tøl sum Herning. Hetta kemst av at tey byrjaðu at renovera gomlu høllina, so skjótt sum nýggi 50m hylurin bleiv opnaður. Tó siga tey, at vøksturin á vitjandi í 2023 var 22% í mun til 2022.

Umsitingin metir, saman við við leiðaranum í svimjihøllini, at ein konservativ meting er ein vøkstur á 20% vitjandi, tá nýggi svimjihylurin við vælveruøki verður tikin í brúk.
Hendan metingin er gjørd út frá tølunum í Herning og Taastrup, sum tó hava eitt heilt annað "uppland" end Tórshavn, Tó so, so eru 91% av Føroyum bundnar saman nú, og merkir hetta hetta, at stórur partur av Føroyum liggur ½ til 1 tíma frá svimjihøllini í Gundadali.
Harumframt metir leiðarin í Svimjihølini, at borgarar ikki brúka svimjihøllina so ofta teir vildu í dag, tí høllin so ofta er full. Hesin parturin verður munandi betri við 50m hylinum.

**Kostnaðurin fyri svimjing**
Leiðarin í svimjihøllini hevur sent inn uppskot um príshækkan á svimjing (Sí skjal 23/06296-1). Í tilmælinum er ein príshækking á 5 kr. á vanliga kostnaðinum fyri svimjing.

Umsitingin hevur kannað aftur í tíð hvat hetta hevði gjørt við inntøkurnar, og hvussu endaliga rakstrarúrslitið hevði sæð út.
Um prísurin var 5 kr. hægri á vanligari svimjing fyri børn og vaksin (tvs. ikki avsláttarkort), so hevði inntøkan verið millum 6,8% og 7,4% hægri í árunum 2019-2022. Endaliga rakstrarúrslitið fyri svimjihøllina hevði batna millum 1,4% og 2,0% í árunum 2019-2022.

Prísurin á svimjing liggur millum 5 og 10 kr. hægri í Klaksvíkar svimjihøll, og gav hetta áleið 1 mió í inntøku um árið, áðrenn vælveruøkið kom. Í Klaksvík kostar tað eyka at sleppa inn í vælveruøkið, og hetta hevur gjørt, at eftir vælveruøkið kom í Klaksvík, eru inntøkurnar farnar uppum 3 mió kr. T.v.s., at vælveruøkið gevur svimjihøllini 2/3 meir í inntøku.

Sbrt. Hagstovuni, so eru prísirnir í samfelagnum hækkaðir 2,8 prosent frá november í 2022 til november í 2023. Prísvøksturin heldur sostatt fram, men prísirnir hækka ikki við somu ferð, sum teir hava gjørt. Havandi í huga nógvu príshækkanirnar í samfelagnum seinast góðu 2 árini, er umsitingin sostatt í iva um, um tað gevur meining at seta prísin upp fyri vanlig atgongumerki á svimjing, um tann stóra inntøkan heldur verður frá vælveruøkinum.
Men til hetta krevst støðutakan um vælveruøkið skal kosta eyka at koma inn í, ella um tú fær atgongd til allar fasilitetir fyri sama prís, eins og tú sær í svimjihylinum í Laugardali, Reykjavík.

Við í metingini skal eisini kunnast um, at í Gallup kanning frá 2019, vóru 71% nøgd við verandi prísstøðið í Svimjihøllini í Gundadali, og í 2017 vóru 84% nøgd við prísstøðið.

Og er tað so, at avgerð verður tikin um at vælveruøkið skal kosta eyka, so má fyrilit takast fyri, at nýggja vælveruøkið ikki fer í kapping við privatar aktørar, s.s. nýggjar spa-fasilitetir hjá hotellum. Umsitingin metir tó í fyrstu atløgu, at hetta ikki verður ein avbjóðing.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

| | **Býráðsfundur**<br>12. desember 2024 | Blað nr.: 1259 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at Mentamálanevndin tekur støðu til, um atgongdin inn í nýggja vælveruøkið skal kosta eyka, eins og í Klaksvíkar svimjihøll, ella um prísurin skal verða tann sami fyri allar fasilitetir, eins og í Svimjihøllini í Laugardali.

Síðani verður støða tikin til endaligar prísir og upplatingartíðir á næsta fundi í Mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 14. februar 2024:** Samtykt at atgongdin inn í nýggja vælveruøkið skal kosta eyka.

**Ískoyti:**
**1) Aldursmark til vælveruøkið?**
Tað er ymiskt hvussu danskar svimjihallir við vælveruøki skipa seg. Í Værløse Svømmehal hava tey t.d. sett aldursmarkið til 16 ár, í Frederikssund svømmhal er aldurmark á 16 ár bert ávísar dagar, og í Frederikshavn hava tey sett 16 ára aldurmark á ávísar partar av vælveruøkinum (dampbad og sauna).

Tað er ilt at meta um hvat er besta loysnin, og tað kemur eisini ann upp á hvat tað er vit vilja. Skal vælveruøkið verða eitt stað uttan larm og spæl er nemmasta loysnin at seta aldursmark á.

Í Klaksvík eru royndir á gjørdar hesum økinum. Í desember 2018 kom nýggja vælveruøkið í Klaksvíkar Svimjihøll. Her hava tey sett aldurmarkið til 16 ár og hava tey góðar royndir við tí skipanini.

Umsitingin mælir til at byrja við góðu royndunum úr Klaksvík og seta aldurmarkið til vælveruøkið til 16 ár.

**2) Møguligur prísur á vælveruøkinum**
Hyggja vit eftir føroyskum viðurskiftum á prísum fyri at sleppa inn í vælveruøkið í svimjihøllum, so er tað bert Klaksvíkar Svimjihøll vit kunnu samanbera við. Her er tó ymiskt hvat nýggja vælveruøkið í Gundadali fer at bjóðar fram, í mun til tað sum er í Klaksvík.

Hyggja vit víðari eftir vælveruøkjum í svimjihøllum í Danmark, so er ógvuliga ymiskt hvussu tey skipa seg og hvat tey bjóða fram.

Vælvitandi um at vælveruøkir í svimjihøllum í Danmark og Klaksvík eru ymiskt skipaði, so metir umsitingin, at príssamansetingin í Klaksvíkar svimjihøll ikki er langt av leið tí prísstøðinum sum er lagt í Danmark. Sostatt metir umsitingin at tað er hóskiligt, at brúka somu prísir sum í vælveruøkinum í Klaksvík, og eru teir fylgjandi (við svimjing):

- Morgun 70 kr.
- Seinnapart 100 kr.
- Vikuskifti 110 kr.
- Pensionistar 50 kr.

Havast skal í huga, at í mun til vælveruøkið í Klaksvík, so verður vælveruøkið í Gundadali i tveimum seperatum rúmum. Hetta gevur okkum møguleikar, at differentiera prísirnar seinni, tá vit hava fingið meiri føling við, hvat tey vitjandi eftirspyrja.

**3) Prístals javnan – hvør háttur kann brúkast?**
Tá talan er um prístalið, so er ymiskir hættir, ið kunnu nýtast. Eitt er at brúka tað generella prístalið, og eitt annað er at brúka prístalið í ymisku "vørubólkunum", ið ávirka raksturin hjá Svimjihøllini. Hetta kundi t.d. verið orka og lønir.

Men fyri ikki at enda á onkrum undarligum krónutali fyri eitt atgongumerki, s.s. 47,50 kr., so skal í fyrsta lagi avgerð takast um hvussu vit runda upp/niður. Í øðrum lagi kundi t.d. umsitingin fylgt við gongdini prístalinum, og tá tað t.d. nærkast einari 5 krónu í generellum vøkstri, so verður prísurin settur upp.

**4) Verandi prísur**
Leiðarin í Svimjihøllini mælir til, at verandi prísur vanligum atgongumerkjum til svimjihøllina hækkar 5 kr. fyri bæði børn og vaksin. Sjálvt um hetta ikki gevur tað heilt stóra útslagið á inntøkusíðuni, so skapar tað eitt insitament hjá borgarum, at keypa sær avsláttarkort. Flestu borgarar í dag brúka avsláttarkort, og skapar tað minni umsiting.

Ein leivd frá gamla svimjihylinum í Gundadali (við badmintonhøllina), er at børn skulu gjalda sum vaksin eftir kl. 18.00. Orsøkin til hetta var, at so kundi vaksin svimja meira fyri seg um kvøldið. Nógv er broytt síðani, og vit hava fingið fleiri hyljar, og nú fáa vit skjótt langhylin. Nú verður somikið nógv vatn í høllini, at leiðarin í svimjihøllini mælir til at børn gjalda barnaprísin eisini eftir kl. 18.

Vísandi til at fíggjarligu umstøðurnar hjá lesandi væl kunnu sammetast við tær hjá pensionistum, so mælir leiðarin í svimjihøllini eisini til, at lesandi gjalda sama prís sum pensionistar..

**5) Upplatingartíðir**
Her verður víst til skjal 23/06296-1 í hesum málinum, viðv. upplatingartíðum. Leiðarin í svimjihøllini mælir til at upplatingartíðirnar vera hesar:

| | |
|---|---|
| Mánadag: | 06.15 til 09.00 og 14.00 til 20.00 |
| Týsdag til fríggjadag: | 06.15 til 20.00 |
| Leygardag og sunnudag: | 08.00 til 16.00 |

Orsøkin til at tað verður mælt til at verða opið til kl. 20.00 dagligdagar er tí, at tað merkir at borgarin sleppur inn til klokkan 20, men skal vera úti klokkan 21. Fólk verða sostatt rópt upp úr hylinum klokkan 20.30.

Sum er ber illa til at hava longri opið út á kvøldið, uttan at tað gongur út yvir virksemi hjá feløgunum, men við nýggja langhylinum verður tó betri pláss.

Viðmerkjast skal, at longda upplatingartíðin hevur øktar rakstrarútreiðslur við sær, og samstundis skulu fleiri lívbjargarar o.l. setast í starv, tá langhylurin opnar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og leiðarin í Svimjihøllini mæla mentamálanevndini til fylgjandi:

a) At sett verður eitt aldursmark á 16 ár til vælveruøkið, og endurmeta skipanina á summri 2025.

b) At TK leggur prísin fyri vælveruøkið á sama støðið sum í Klaksvík, og endurmeta prísin á summri 2025.

c) At umsitingin javnan kannar generella brúkaraprístali í samfelagnum, sbrt. Hagstovuni, og tillagar prísin á teimum veitingunum sum eru í Svimjihøllini.

d) At prísurin á vanligum atgongmerkjum hækkar við 5 kr. fyri bæði børn og vaksin,
At prísurin hjá børnum eftir kl. 18. verður broyttur til vanliga barnaprísin.
At prísurin hjá teimum lesandi yvir 16 ár fylgir prísinum hjá pensionistunum

e) At mentamálanevndin umrøður upplatingartíðrnar fyrst og tekur støðu á næsta fundi, tá konkret upplegg til talið á starvsfólki er komið upp á pláss.

**Mentamálanevndin 06. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at upplatingartíðin leygardagar og sunnudagar verður kl. 08.00 – 17.00.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Atkvøtt varð um uppskot frá Súnu Mørk um at beina málið aftur í nevnd við atliti til at viðgera spurningin um, hvussu aldursmarkið skal setast, nærri og í samráð við starvsfólk í svimjihøllini.

Uppskotið varð einmælt samtykt,og málið beint aftur í mentamálanevndina.

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi tann 21. mars bleiv samtykt at beina málið aftur í nevnd, við atliti til at viðgera spurningin um hvussu aldurmarkið til vælveruøkið skal verða – tvs. pkt. a)

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við mentamálanevndini og fíggjarnevndini við tí broyting, at pkt. a) verður orðað soleiðis:

At sett verður eitt aldursmark á 16 ár til vælveruøkið, tó so, at børn undir 16 ár kunnu vera saman við vaksnum, og endurmeta skipanina á sumri 2025.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2024:** Samtykt at yngri enn 16 ár kunnu fáa atgongd til vælveruøkið saman við vaksnum ávíst tíðarskeið á degnum. Hetta verður skipað av leiðsluni í svimjihylinum og at endurmeta skipanina á sumri 2025

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Áheitan er komin frá formanninum í Mentamálanevndini um at umrøða prísirnir til nýggja vælveruøkið aftur.

Støðan í dag er fylgjandi:

- Fyrrapart gerandisdagar (til klokkan 12): 70 krónur
- Seinnapart gerandisdagar: 100 krónur
- Í vikuskiftunum: 110 krónur
- Pensjónistar: 50 krónur
- Lesandi eldri enn 16 ár: 50 krónur (lestrarkort krevst)
- Børn undir 2 ár (gerandisdagar klokkan 10-12): Ókeypis
-

Svimjing er íroknað prísunum fyri nýtslu av vælveruøkinum, og avsláttarkort eru ikki galdandi fyri vælveruøkið, einans fyri svimjing.

Aldursmarkið er sett 16 ár, men hvønn gerandisdag frá klokkan 14 til 17 fáa børn yngri enn 16 ár atgongd til vælveruøkið saman við vaksnum. Kostnaðurin er tann sami sum fyri vaksin (t.e. 100 krónur).

Tað er trupult at leggja seg á eina príslegu til nýggj anlegg, s.s. kommunal vælveruøki. Ein saklig meting, er at leggja seg eftir øðrum líknandi anleggum, og í hesum førinum hevur TK lagt seg eftir prísstøðnum í vælveruøkinum í Klaksvík.

Fleiri aðrir møguleikar eru eisini, s.s.:

- Kostnaðurin verður lagdur eftir eini meting av rakstrarkostnaðinum
- Gera eina veruliga marknaðaranalysu – hetta best at gera, eftir at vælveruøkið er brúkt eina tíð.
- Hava eina sosiala tilgongd, har prísáseting tekur hædd fyri t.d. støðd á barnafamiljum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at halda seg til verandi prísir, og eftirmeta ymsu nýggju viðurskiftini í Svimjihøllini á sumri 2025.

**Mentamálanevndin 27. november 2024**: Samtykt at børn upp til 16 ár gjalda 50 kr. til vælveruøki. At prísurin verður endurskoðaður á sumri 2025, sum fyrr samtykt.

At beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at seld avsláttarkort kunnu nýtast til vælveruøkið, til tey eru uppi. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Bjørg Dam legði fram broytingaruppskot um at taka undir við fíggjarnevndini 4. desember 2024 við tí ískoyti, at aldursmarkið verður broytt soleiðis, at børn yngri enn 16 ár fáa atgongd til vælveruøkið saman við vaksnum leygardagar og sunnudagar kl. 10—14 í royndartíðini.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, sum varð einmælt samtykt.

# 304/24 HB : Umsókn um íløgustuðul til umbyggingar í HB-húsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 66/22 | 21/00581-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 226/22 | 21/00581-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 300/22 | 21/00581-2 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 283/22 | 21/00581-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 04.12.2024 | 217/24 | 21/00581-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 12.12.2024 | 305/24 | 21/00581-2 |
| 7 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 304/24 | 21/00581-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um íløgustuðul til umbyggingar í HB-húsinum. Umsóknin er dagfest 4. februar 2021.

**Lýsing av málinum**
Umsókn frá HB um íløgustuðul til viðlíkahald og dagføring av HB-húsinum.

HB vísir á, at HB-húsið er bygt fyri 30 árum síðani og at húsið er nógv brúkt hesi árini. Bygningurin er nógv slitin og ótættur, og mugu ábøtur gerast fyri at fáa hann tættan.

HB hevur viðlagt eina raðfesting av íløgum/dagføring av felagshúsinum komandi árini. Skjalið við raðfestingini er knýtt í málið.

Ynski er at íløgustuðulin verður deildur út á 3 fíggjarár.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur, samtyktar av mentamálanevndini 03.09.2015.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sbrt. § 3, stk. 3 í "Leiðreglunum fyri stuðul til íløgur", kann stuðulin í mesta lagi 30% av metta byggikostnaðinum.

Ongin tøk fígging er á kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini frá at játta stuðul í 2022.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Samtykt at boða umsøkjaranum frá, at málið verður tikið upp til viðgerðar, tá játtan er til endamálið í fíggjarætlanini.

**Ískoyti:**
Formaðurin vísir á fíggjarætlanina 2023 konta 5370 Stuðul til íløgur og skjýtur upp, at játtað verður kr. 1 mió í íløgustuðli til ætlanina, og sum er uml. 30% av kostnaðinum hjá HB at dagføra HB-húsið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at játta kr. 1 mió í stuðli til verktætlanina av kontu 5370 Stuðul til íløgur av játtanini í 2023, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Gunvør Balle var ikki við í viðgerðini av fundinum.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Víst verður til mál 24/08972 (Íløgustuðul til høvuðsumvælingar í B36 ogHB húsinum) og samtyktu fíggjarætlanina fyri 2025.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at játta 1 mió kr. av konto 5370 “Stuðul til íløgur”, og at upphæddin verður markað sum íløgustuðul til umvælingar til í HB-húsinum.

Stuðulin er treytaður av, at felagið sendir inn alla dokumentatión av útreiðslum og møguligum byggiloyvi.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Mentamálanevndin 04. desember 2024:** Ein meiriluti Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Súsanna Olsen taka undir við tilmælinum.

Kristianna Winther Poulsen og Annika Olsen atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2024:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

# 305/24 B36 : Umsókn um íløgustuðul til umvælingar v.m. í B36-húsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 67/22 | 21/00888-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 227/22 | 21/00888-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 301/22 | 21/00888-5 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 284/22 | 21/00888-5 |
| 5 Mentamálanevndin | 04.12.2024 | 216/24 | 21/00888-5 |
| 6 Fíggjarnevndin | 12.12.2024 | 306/24 | 21/00888-5 |
| 7 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 305/24 | 21/00888-5 |

**Upprunin til málið**
Skriv, dagfest 24. februar 2021, viðv. viðlíkahald og dagføring av felagshúsinum hjá B36.

**Lýsing av málinum**
Umsókn frá B36 um íløgustuðul til viðlíkahald og dagføring av felagshúsinum hjá B36.

B36 hevur saman við byggikønum gjøgnumgingið húsið, og kanningin vísir, at tørvur er á meira enn 3 mió kr., umframt at undirtekjan helst skal skiftast um ikki alt ov langa tíð.
B36 hevur viðlagt eina raðfesting av íløgum/dagføring av felagshúsinum hjá B36 komandi árini. Skjalið við raðfestingini er knýtt í málið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur, samtyktar av mentamálanevndini 03.09.2015.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongin játtan er eftir á konto 5370 – Stuðul til íløgur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Sbrt. § 3, stk. 3 í "Leiðreglunum fyri stuðul til íløgur", kann stuðulin í mesta lagi 30% av metta byggikostnaðinum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at Mentamálanevndin tekur støðu til, um umsóknin frá B36 til íløgustuðul skal raðfestast komandi fíggjarár.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Samtykt at boða umsøkjaranum frá, at málið verður tikið upp til viðgerðar, tá játtan er til endamálið í fíggjarætlanini**.**

**Ískoyti:**
Formaðurin vísir á fíggjarætlanina 2023 konta 5370 Stuðul til íløgur og skjýtur upp, at játtað verður kr. 1 mió í íløgustuðli til ætlanina, og sum er uml. 30% av kostnaðinum hjá B36 at dagføra B36-húsið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at játta kr. 1 mió í stuðli til verktætlanina av kontu 5370 Stuðul til íløgur av játtanini í 2023, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Gunvør Balle var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Víst verður til mál 24/08972 (Íløgustuðul til høvuðsumvælingar í B36 og HB húsinum) og samtyktu fíggjarætlanina fyri 2025.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at játta 1 mió kr. av konto 5370 “Stuðul til íløgur”, og at upphæddin verður markað sum íløgustuðul til umvælingar til í B36-húsinum.

Stuðulin er treytaður av, at felagið sendir inn alla dokumentatión av útreiðslum og møguligum byggiloyvi.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 04. desember 2024:** Ein meiriluti Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Súsanna Olsen taka undir við tilmælinum.

Kristianna Winther Poulsen, Annika Olsen atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2024:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býraðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

# 306/24 Nýggj skatepark

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 25.11.2024 | 180/24 | 23/05071-9 |
| 2 Mentamálanevndin | 27.11.2024 | 211/24 | 23/05071-9 |
| 3 Fíggjarnevndin | 04.12.2024 | 285/24 | 23/05071-9 |
| 4 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 306/24 | 23/05071-9 |

**Upprunin til málið**
Skatefelagið sendi kommununi í 2023 eina umsókn um at fara undir arbeiðið at gera eina nýggja veruliga skatepark í Tórshavn, nú rampan á Frælsinum varð tikin burtur, í sambandi við at Campus verkætlanin hevði tørv á fløtuni úti við Venjingarskúlan til parkering.

**Lýsing av málinum**
Í hesum tíðum verður víst á týdningin av at hava møguleika at røra seg fysiskt. Nógvar skipaðar ítróttargreinar eru í Tórshavnar kommunu, men tá tað snýr seg um rørslu, tá er tað av týdningi, at kommunan somuleiðis veitir karmar til tey heldur óskipaðu fysisku virksemini.

Skate og parkour eru tvær heldur minni og í dag óskipaðar ítróttargreinar. Hesar ítróttargreinar tykjast ofta tiltalandi fyri børn og ung, sum ikki eru til bóltspæl, kappróður ella svimjing, men heldur vilja íðka ítrótt, sum er minni skipað og meiri tilvildarlig.

Upprunaliga var ein rampa millum Svimjihøllina og HB- og B36 húsið. Henda rampa varð tikin niður fyri nógvum árum síðani. Síðani varð ein rampa bygd heilt sjálvboðið av ágrýtnum ungum úti á Frælsinum.

Nógv ung standa við einum stórum tómrúmi, nú rampan á Frælsinum er tikin burtur. Tískil er av týdningi at seta ferð á arbeiðið at skapa eina nýggja "skatepark" í kommununi.

<u>Staðseting:</u>
Í longri tíð hevur verið arbeitt við at skipa torgið í Gundadali, framman fyri FSF og niðara vøll. Tað hevur ligið í kortunum, at skoytibreytin í kommununi skuldi staðsetast fast á hesum økinum, og tí er eitt rættiliga stórt øki sett av til hetta. Men tað eru deildar meiningar um, hvørt skoytibreytin skal staðsetast her ella ikki, og fyri trivnaðin í miðbýnum, so verður mett, at besta staðsetingin til eina skoytibreyt helst er so nær miðbýnum sum møguligt – hetta fyri at savna fólkið og virksemið í miðbýnum gjøgnum alt árið, eisini um veturin.

Grundað á hesa hugsjón, og tá skate-virksemið hóskar seg væl í Gundadali, sum er okkara miðdepil fyri ítrótt, so verður mett ráðiligt at staðseta skate og parkour í økinum framman fyri FSF og niðara vøll.

Skatefelagið, sum upprunaliga hevur vent sær til kommununa um at fáa sett gongd á eina veruliga skatepark, vísir í teirra umsókn á, at kommunan eigur at fáa sær holla ráðgeving til hetta arbeiði. Skatefelagið ynskir at luttaka í tilgongdini, umframt at teir vísa á ráðgevingar- og menningartoymið við Tony Hawk á odda, sum hevur játtað at hjálpa í tilgongdini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mælt verður til, at farið verður undir at menna økið til partvís at rúma skate- og parkourvirksemi.

| | Blað nr.: 1270 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. desember 2024 | Formansins merki: |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 21/03047, Torg í Gundadali

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Mentamáladeildin, sum varðar av ítróttarvirksemi, kennir til ynskini hjá Skatefelagnum og tekur undir við, at farið verður undir at kanna møguleikarnar fyri at staðseta virksemið á økinum framman fyri FSF og niðara vøll.

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verk ætlan | Upphædd |
| 6275 | LK62996 | Miðbýarætlan | 6275 | L62055 | Torg frammanfyri FSF | | 1.300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.300.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Trivnaðarstjórin, Mentamálaleiðarin og býararkitekturin mæla til:

- At skatevirksemið verður staðsett á torgið framman fyri FSF og niðara vøll.
- At farið verður undir at kanna møguleikarnar í økinum og saman við fakligu ráðgevunum innan skatevirksemið at menna eina ætlan fyri virksemið.
- At komið verður aftur í nevnd, tá kostnaðurin fyri verkætlanina er kendur.
- At játtaðar verða kr. 1.300.000 av kt. 6275, LK62996, Miðbýarætlan til kt. 6275, L62055, Torg frammanfyri FSF.
- At málið verður beint í býráðið umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 25. november 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út og seta í verk.

**Mentamálanevndin 27. november 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

## 307/24 Framtíðar byggilendi í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2023 | 70/23 | 23/02421-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 140/23 | 23/02421-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2024 | 12/24 | 23/02421-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 20.03.2024 | 2/24 | 23/02421-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.01.2024 | 18/24 | 23/02421-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 17/24 | 23/02421-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 15/24 | 23/02421-1 |
| 8 Kollafjarðarnevndin | 07.10.2024 | 7/24 | 23/02421-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 25.11.2024 | 173/24 | 23/02421-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 04.12.2024 | 290/24 | 23/02421-1 |
| 11 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 307/24 | 23/02421-1 |

**Upprunin til málið**
Seinastu tíðina hava borgarar í Kollafirði gjørt vart við, at fólkatalið í bygdini støðugt er minkandi, og hava tey somuleiðis víst á, at Tórshavnar kommuna tykist at hava gloymt at býarmenna bygdina.

18. apríl 2023 var almennur borgarafundur í skúlanum, har nógv fólk var møtt upp at vísa á trupulleikarnar við minkandi fólkatalinum, umframt at umrøða onnur viðkomandi viðurskiftir í bygdini.

Tórshavnara kommuna ásannar, at bygdini tørvar eina heildarætlan, sum kann vera við til at styrkja um samleikan í bygdini, og sum tryggjar eina framtíðar planlegging av bygdini.

**Lýsing av málinum**
Á borgarafundinum vísti kommunan á, hvørjar ætlanir hava verið í umbúnað í Kollafirði gjøgnum árini, men at hesar í fleiri førum steðga upp, grundað á at trupult hevur verið at ogna sær lendi til bygging.

Bygdini tørvar eina heildarætlan fyri at tryggja samleikan í bygdini og fyri at økja um búsetingina.

Síðani samanleggingina millum báðar kommunurnar, hevur verið nógv tosað um, hvønn samleika ella hvønn leiklut Kollafjørður fór at hava sum partur av Tórshavnar kommunu. Ynskiligt hevur verið, og eisini grundað á geografisku frástøðuna til høvuðsstaðin, at bygdin framhaldandi fór at varðveita bygdardámin, men ynski hevur eisini alla tíðina verið, at bygdin fór at vaksa nógv meiri, enn hon er.
Beint eftir samanleggingina varð sagt, at nøkur av teimum týdningarmiklastu fyribrigdunum, sum ímynda Kollafjørð eru:
- Landbúnaðurin
- Havnaøkið

Men árini hava eisini víst, at bygdalívið so sanniliga hevur ment seg, og at Kollafjørður í dag hevur nútímans hentleikar innan fleiri tænastuøki, ítrótturin er í støðugari menning, og bygdarfólkið ger sítt fyri at virka í bygdini og harvið geva bygdini fólkaliga og bygdarliga dámin. Tó væntar ein miðsavning av bygdini. Um bygdin skal vaksa og nøkta tørvin hjá samtíðarborgaranum, verður neyðugt at skipa eitt miðsavnandi øki, har trivnaður, mentan og handilslív fær ein avgerandi leiklut.

Býarskipanarliga verður mett, at tað er av stórum týdningi, at økið “við Sjógv” verður lýst sum miðstaður í bygdini, og at framtíðar útbyggingar í bygdini taka útgangsstøði í hesum økinum. Økið hevur í dag handil, kirkju, skúla, barnagarð, ítróttarhøll og nógv annað virksemið. Útboðið av bústøðum í økinum er tó sera avmarkað, og tí verður mælt til, at lendið fram við Botnánna verður lagt av til miðsavningina og menningina

av bygdini. Víst verður til kortskjal j.nr. 23/02421-2, *Øki til býarmenning*, har reyðlitti ringurin sýnir miðstaðin “við Sjógv”, og har gullittu ringarnir sýna økir, sum ynskiligt er at fara undir at býarmenna.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu ásetir, hvørjar økisásetingar eru galdandi fyri Kollafjørð.
Økið sunnan fyri Botnánna liggur sum D3-øki, sum er kannað stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.
Økið norðan fyri skúlan og ítróttarhøllina liggur partvís sum A1-øki, sum er til lága bústaðarbygging, og 4. Grundumráði, sum í høvuðsheitum er lagt av til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mál nr. 2002-2500, Uppskot til framtíðarbyggisamtykt fyri Kollafjørð:
Í 2003 varð mál lagt til politiska støðutakan viðv. at leggja øki av til framtíðar útbyggingar í Kollafirði. Uppskotið var partur av arbeiðinum at gera eina heildarætlan fyri kommununa. Fleiri øki vóru í uppskoti at leggja av til bústaðabygging, sí skjal 23/02421-4, *Heildarætlan Kollafjørður jan 2003*, og málslýsingina fyri málið, sum tá varð lagt fyri, í skjali nr. 23/02421-3, *Málslýsing_Uppskot til framtíðar byggisamtykt fyri Kollafjørð j. nr. 200202500*.

Seinasta kommunala útstykkingin, sum er gjørd í Kollafirði er tann á Hamrabøi. Hendan útstykkingin fevndi um 22 grundstykkir, og vóru grundstykkini lutaði út í 2018, og nú 5 ár seinni eru enn 10 grundstykkir, sum ikki eru í gongd við byggingina.

Í 2022 royndi kommunan at bjóða matr. nr. 203c á Lygnnesi út til bygging av íbúðum og raðhúsum. Stykkið varð boðið út í tveimum umførum, men tíverri bar ikki á mál við eini ítøkiligari sølu og ætlan fyri økið. Víst verður til mál nr. 21/02624, *Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðabygging*.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Kollafjarðar kjommuna viðgjørdi á fundi í des 2000 umsókn frá Kollafjarðar kirkjuráði um staðseting av nýggjari kirkju í Kollafirði. Bygdaráðið tók undir við Kirkjuráðnum, at kirkjan skuldi staðsetast við Sjógv. Tá kommunurnar løgdu saman, fór áheitanin víðari til Tórshavnar kommunu. Seinast málið hevur verið viðgjørt í politiskum høpi er í 2007.
Nú ætlanin er at fara undir eina miðsavnan og býarmenning av økinum við Sjógv, so verður mælt til, at hetta málið somuleiðis verður tikið við í tilgongdina. Víst verður til mál nr. 15/01885, *Kollafjarðar Kirkjuráð: Umsókn um øki til nýggja kirkju í Kollafirði (2001-0678)*.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kortskjal j.nr. 23/02421-2, *Øki til býarmenning*
Skjal 23/02421-4, *Heildarætlan Kollafjørður jan 2003*
Skjal 23/02421-3, *Málslýsing_Uppskot til framtíðar byggisamtykt fyri Kollafjørð j. nr. 200202500*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

Á núverandi støði hevur málið ikki fíggjarligar avleiðingar, men verður komið á mál við samráðingunum og farið verður undir at keypa lendi til býarmenning, so verður málið lagt fyri aftur.
Somuleiðis verður tá neyðugt við játtan til at býarmenna økini, sum tá eru fingin til vega.

**Tilmæli:**
Virkandi kommunustjórin, og býararkitekturin mæla til:
- at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna og festarar um økini við Sjógv smb. kortskjali nr. 23/02421-2,
- at um sámráðingarnar koma á mál, verður farið undir at gera heildarætlan fyri samlaða økið við Sjógv.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við festaran av Sjóvarhaganum í sambandi við ætlanir um at leggja øki burtur av festinum Sjóvarhaga undir byggisamtykt til bústaðarbygging og trivnaðarøki. Fyribils avtala er gjørd við festaran, sí skjal *Fyribils avtala millum Gunnvør D. Jensen og TK ísv. Sjóvarhaga – undirskrivað 19-12-2023.*

Sambært avtaluni skal Tórshavnar kommuna søkja Búnaðarstovuna um at keypa tey trý lendini víst á kortskjali *Uppskot um keyp av festijørð øki 123, dagfest 15.12.2023.*

Somuleiðis bindir Tórshavnar kommuna seg í avtaluni til at broyta byggisamtyktina fyri teir partarnar av matr. nr. 313a, sum í dag liggja sum D1-øki og D3-øki, og sum liggja vestan fyri øki 1 í kortskjalinum *Uppskot um keyp av festijørð øki 123, dagfest 15.12.2023* til landbúnað (4. grundumráði). Somuleiðis skal Tórshavnar kommuna endurrinda eitt seyðahús, ið festarin sambært avtaluni missir.

Avtalan staðfestir harumframt, at Tórshavnar kommuna og festarin í Sjóvarhaga binda seg til at tryggja, at eingin bygging skal fara fram innan fyri eitt millum partarnar nærri avtalað mark móti Botnánni, ið rennur framvið matr. nr. 313a, Kollafjørður og matr. nr. 107a, Kollafjørður. Tórshavnar kommuna skal somuleiðis so vítt gjørligt taka atlit til lagaða gamla bøgarðin, sum fylgir øki 1 frá landsvegnum niðan til ánna.

<u>Broyting av byggisamtykt:</u>
D3 økið, sum sambært avtaluni skal broytast til 4. grundumráði, er partur av øki, ið varð lagt sum D3 øki í ár 2007 í sambandi við ætlanir um at byggja kirkju í økinum. Ongar ítøkiligar ætlanir eru um, júst hvar í økinum kirkjan skal standa, og er málið viðv. staðseting av nýggjari kirkju í Kollafirði ikki komið víðari, síðani umsóknin varð latin kommununi. Mett verður, at hóast broytingin í byggisamtyktini verður framd, so eigur tað at vera møguligt at finna eina hóskandi staðseting til kirkjuna í økinum.

D1 øki, sum sambært avtaluni skal leggjast aftur sum 4. grundumráði, er sambært Jarðfeingi ein jarðfrøðilig leivd frá ístíðini, har tveir jøklar, ein úr Kollfjarðardali og ein fram við Botni møtast. Tilfar frá hesum jøklunum gera heyggjarnar, og sýna serliga náttúrufyribrigdið, ið kallast miðmorena. Morenan fortelur, hvussu nógv av lendinum hevur verið undir ísi. Sí skjal *Telefonnotat – Jarðfeingi.*

<u>Kunning um morenu:</u>

"*Når en gletsjer glider hen over underlaget, smelter det medslæbte materiale fri. Det knuses og presses sammen af isens tryk og bevægelse, så der efterhånden opbygges et jævnt lag, normalt 0,5-3 m tykt, af kompakt bundmorænemateriale, hvor aflange småsten generelt ligger orienteret parallelt med isens bevægelsesretning. Ved at måle deres orientering kan man fastlægge isens bevægelsesretning på steder, hvor den for længst er smeltet bort. Det resulterende bundmorænelandskab er fladt til jævnt bølget og med en frugtbar, leret jordbund."*
Kelda: moræne - Læs om dannelse og sammensætning - lex.dk

"Morena er leyst tilfar, sum ísur flytur við sær, tá ið hann fer yvir land. Tilfarið er sera blandað, bæði stór grótstykkir, fínari sandur, leirur og lívrunnið tilfar blandast saman. Hetta nevnist eisini till. "
Kelda: Ymisk fyribrigdi | Jarðfeingi (jf.fo)

Umsitingin hevur somuleiðis tosað við staðkendan kollfirðing ið fortelur, at helst hevur alt D1 og D3 økið, sum nú er velt, verið morenuheyggjar, og eru verandi morenuheyggjarnir í D1 økinum teir einastu, ið eru varðveittir.

Umsitingin metir, at hetta serliga økið eigur at verða varðveitt sum D1 øki, fyri at tryggja hesa jarðfrøðiligu leivdina, eisini í framtíðini. Í hesum sambandi hevur umsitingin tosað við festaran, ið sigur, at tað ikki er ein treyt frá festarans síðu, at D1 økið vestanfyri øki 1 verður lagt sum 4. grundumráði, men at ynski er at nýta økið til sama landbúnað, sum økið verður brúkt til í dag. Festarin tekur undir við, at økið verður varðveitt sum D1 øki.

Tískil verður mælt til, at parturin av avtaluni, ið snýr seg um at broyta D1 øki til 4. grundumráði, verður tikin úr.

Samlaðu ítøkiligu broytingarnar í byggisamtyktini síggjast í kortunum *Byggisamtykt – áðrenn broyting* og *Byggisamtykt – eftir broyting.*

<u>Heildarætlan fyri øki við Sjógv:</u>
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 8. mai 2023, at um sámráðingarnar við festaran koma á mál, verður farið undir at gera heildarætlan fyri samlaða økið við Sjógv.
Fyribils avtalan við festaran fevnir um tvey lutfalsliga stór øki, ið eiga at verða skipað.

Øki 3 oman fyri skúlan og ítróttarhøllina eigur at verða skipað við sethúsagrundstykkjum og møguliga øðrum bústaðarsløgum eisini. Endalig støðutakan til, hvussu møgulig atkoma til økið skal vera, eigur at verða nágreinað, eins og endalig skipan av økinum skal gerast.

Øki 1 og 2 sunnan fyri Botnánna er ein heilt nýggjur býlingur, har tað kann hugsast, at ymisk bústaðarsløg, miðstaðarbygging og møguliga eisini mentunarbygging, so sum kirkja o.a. verður staðsett. Somuleiðis treytar avtalan, at skipanin av økinum so vítt gjørligt tekur atlit til lagaða gamla bøgarðin, sum fylgir øki 1 frá landsvegnum niðan til ánna.

Mett verður, at neyðugt er við ráðgeving til hesar partar av arbeiðinum, og mælir umsitingin tískil til, at uppgávurnar at skipa økini verða lýstar og nágreinaðar, fyri síðani at bjóða ráðgevingina út til privatu ráðgevaravinnuna. Tá tilboðini upp á ráðgevingina fyriliggja, so verða hesi løgd aftur til politiska støðutakan.

**Tilmæli**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til:
- at taka partin av avtaluni, ið snýr seg um at broyta D1 økið vestan fyri øki 1, úr avtaluni, eins og lýst omanfyri, og annars samtykkja fyribils avtaluna *"Fyribils avtala millum Gunnvør D. Jensen og TK ísv. Sjóvarhaga – undirskrivað 19-12-2023"*.

- at umsókn um at keypa lendi 1, 2 og 3 smb. avtaluni verður send Búnaðarstovuni, og at endaligi kostnaðurin fyri lendi og endurrindan av nýggjum seyðahúsi verður at leggja aftur til politiska støðutakan, tá kostnaðurin er ítøkiligur.
- at broyta byggisamtyktina smb. kortskjalinum *Byggisamtykt – eftir broyting.*
- at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið at gera heildarætlan/ir fyri øki 1, 2 og 3 út til privatu ráðgevaravinnuna, og at tilboðini verða løgd aftur til politiska støðutakan, tá hesi fyriliggja.
- at beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina fyri Kollafjørð og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2024:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 20. mars 2024:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
- Byggisamtyktarbroytingin er enn ikki endaliga góðkend í Umhvørvismála- ráðnum.
- Umsókn at keypa lendið er send Búnaðarstovuni, men endalig tilsøgn er enn ikki givin kommununi.
- Víst verður til Heildarætlan fyri Kollafjørð, mál nr. 23/06514, sum sýnir skitsu av eini møguligari skipan av økinum sunnanfyri Botnánna.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Kollafjarðarnevndin 07. oktober 2024:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Keyp av lendi:
Hósdagin 10.10.2024 sendi Búnaðarstovan kommununi fyribils tilsøgn um keyp av lendi til framtíðarbygging í Kollafirði. Samlaða víddin er í alt 29.217 m$^2$.
Sí skjal nr. 23/02421-34, Fyribils tilsøgn.

Kostnaðurin fyri lendið er áljóðandi kr. 3.450.458,30

Avtalan við festaran fevndi somuleiðis um endurrindan av nýggjum seyðahúsi. Hesin kostnaðurin er enn ikki kendur.

Viðv. byggisamtyktarbroytingini:
Umhvørvismálaráðið sendi kommununi góðkenningarskriv upp á byggisamtyktarbroytingina tann 09.10.2024. So statt er byggisamtyktin broytt samsvarandi avtaluni við festaran.

Viðv. heildarætlan fyri økið:
Umsitingin hevur gjørt uppskot til heildarætlan fyri miðstaðin í Kollafirði. Sí skjal nr. 23/02421-35, 2024.10.22_Heildarætlan_Miðstaðarøki Kollfjørður.

Sum sæst á síðu 6, er skitsa gjørd yvir økið, har økið partvíst verður innrættað til smærri sethús, umframt tveir bygningar við í alt 8 íbúðum. Henda skitsan skal fyri byggilendið einans skiljast sum ein skitsa – og eru skipanin og bústaðarsløgini ikki fastløgd enn.

Fyri at koma nærri, hvussu økið ítøkiliga á bestan hátt verður skipað, er neyðugt at fara í samráðingar við eigaran av matr. nr. 159, Kollafjørður, fyri at tryggja eina nøktandi atkomu til økið.

Harumframt eigur endaliga skipanin av økinum at taka útgangsstøði í avtaluni millum festaran og Tórshavnar kommunu.

Mælt verður til, at økið verður bjóðað út til skipan og bygging av bústaðarøkinum.

**Nýggj skjøl**
23/02421-34 Fyribils tilsøgn.
23/02421-35 2024.10.22_Heildarætlan_Miðstaðarøki Kollfjørður.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | Fíggjarætlan 2025 | |

| **Upphædd** |
|---|
| 3.450.458,30 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 3.450.458,30 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 3.450.458,30 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til:
- At játtaðar verða kr. 3.450.458,30 á Fíggjarætlanini 2025 til keyp av lendinum.
- At samráðingarnar við matr. nr. 159 verða settar í gongd, soleiðis at atkoman til byggilendið verður tryggjað.
- Tá endaliga atkoman til økið sunnan fyri Botnánna er avklárað, at skipanin av økinum verður boðin út til ráðgeva at koma við boð upp á eina alternativa bústaðarbygging í økinum.
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 25. november 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á umsitingina at taka upp samráðingar við eigararnar av vegnum.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting í mun til lendiskeypið, at peningurin til hetta kr. 3.450.458,30 verður játtaður av konto 6175, L61020 keyp av jørð.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>12. desember 2024 | Blað nr.: 1278 |
| | | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

# 308/24 Málslýsing - Vallgarður Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 25.11.2024 | 177/24 | 24/07046-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 04.12.2024 | 291/24 | 24/07046-1 |
| 3 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 308/24 | 24/07046-1 |

**Upprunin til málið**
Nýggi parturin av kirkjugarðinum við Velbastaðvegin varð tikin í brúk í 2019. Avvarðandi hava gjørt vart við, at neyðugt er at bøta um vollan millum kirkjugarðin og Glyvursveg, bæði fyri at fáa betri lívd og fyri at verða betri vard fyri útsýni frá ferðsluni á Glyvursvegnum.

Aftaná at henda ætlanin er framd, eigur eisini at verða peningur settur av til at seta gróðursetingar og innbúsætlanina í verk. Íroknað betri avmarkingar millum ymisku partarnar í Kirkjugarðinum, umframt fríðkan og røkt í eini heild.

*Sí j. Nr. 22/04567-4 Gróðursetingar- og innbúgvsætlan 11.11.2022.*

**Lýsing av málinum**
Nýggi parturin av kirkjugarðinum við Velbastaðvegin varð tikin í brúk í 2019. Avvarðandi hava gjørt vart við, at har er sera veðurhart, og at tey kenna seg útstillað, tá ið tey vitja gravirnar í økinum.

Fyri at bøta um viðurskiftini, er uppskotið, at gjørdur verður vallgarður framvið Glyvursvegi, frá innkoyringini til brúnna um Sandá, eins og loysnin frá rundkoyringini til innkoyringina.

Tað merkir, at einsteinskantur verður gjørdur á uttaru síðu og við fótin av vallgarðinum á innaru síðu.

Plantað verður í vallgarðin og fríðkað verður um fløtuna innanfyri vallgarðin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Arbeiðið at gera vallgarð, grundað á skitsuuppskot varð boðið út til 2 arbeiðstakarar 10. juli 2024.

Útboðið fevnir um grótlaðing og vallgarð fram við Glyvursvegnum.

2 tilboð komu inn.

| | |
|---|---|
| Konsax | 843.436,96 kr |
| RTS | 851.750,00 kr |

Planting og onnur fríðkan er ikki við í tilboðnum.
Av tí at tilboðið er grundað á skitsuuppskot, kann roknast við eykaveitingum og tillagingum.
Mælt verður til at játta 1,15 mió. kr. til arbeiðið, og at taka av tilboðnum hjá Konsax.
Mælt verður til at gera vallgarð móti Glyvursvegi nú.
Seinni má støða verða tikin til gerð av vallgarði móti Sandá.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>12. desember 2024 | Blað nr.: 1280 |
| | | Formansins merki: |

**Skjøl**
Jnr. 22/04567-4 Gróðursetingar- og innbúgvsætlan 11.11.2022.
Jnr. 24/07046-2 Vallgarður kirkjugarður við Velbastaðvegin – útbjóðingarskriv
Jnr. 24/07046-2 Vallgarður 2024

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6275 | L62057 | Miðbýarætlan - Býarlundin |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6275 | | | Vallgarður - Kirkjugarður |

| **Upphædd** |
|---|
| 1.150.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.150.000 kr |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at játtaðar verða kr. 1.150.000 av kt. 6275 Fríðkan av kommununi (íløgur), L62057 Miðbýarætlan-Býarlundin til nýggja verkætlan á kt. 6275 við heitinum Vallgarður – kirkjugarður
- at heimila umsitingini at gera avtalu við vinnandi arbeiðstakara um omanfyri standandi arbeiði, og at seta arbeiðið í verk.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 25. november 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

# 309/24 málslýsing - Áheitan at TK flytir part av gøtu, sum er á privatum øki matr. nr. 1228d, Hjaltarók

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 25.11.2024 | 179/24 | 23/03741-10 |
| 2 Fíggjarnevndin | 04.12.2024 | 292/24 | 23/03741-10 |
| 3 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 309/24 | 23/03741-10 |

**Upprunin til málið**
Borgari heitir á kommununa um at flyta part av almennari gøtu, sum er á hansara privatu ogn, matr. nr. 1228d.

**Lýsing av málinum**
Borgari hevur fyri fleiri árum síðani keypt eitt grundstykki av privatari útstykking í Hjaltarók.
Almenn gøta, sum varð gjørd frá Hotel Føroyum og oman í býin fyri nógvum árum síðani, gongur inn yvir hansara matrikul.

Henda gøtan varð løgd fyri nógvum árum síðan,i áðrenn útstykkingin varð gjørd, í samráð við fyrrverandi eigara.

Borgari bað í 2023 um at fáa keypt øki frá Búnaðarstovuni at leggja afturat matrikul 1228d, og møguliga at makaskifta fyri at fyribyrgja at gøtan skuldi umleggjast.

Umsitingin mælti tá frá, at broyta serstøku byggisamtyktina og útstykkingarætlanina, men at gøtan verður flutt, tá ið henda verður raðfest.

Borgari fekk tí noktandi svar, við tí grundgeving, at umsóknin var í stríð við serstøku byggisamtyktina og útstykkingarætlanina fyri Hjaltarók.
Málið verður nú tikið uppaftur av umsitingini, tí at mett verður, at lendisviðurskiftini gera tað sera trupult at flyta gøtuna. Tað krevur stór kostnaðarmikil inntriv í lendið at flyta gøtuna og gøtan verður longri.

Gøtan er av so stórum týdningi fyri gongusambandið til og frá býnum, at gøtan eigur at verða tryggjað, áðrenn borgari fer undir at byggja.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at rætta loysnin er at lata verandi gøtu vera, og at broyta matrikuleru viðurskiftini eins og borgarin søkti um á vári í 2023.

Um hildið verður fast í at gøtan skal flytast, skal roknast við einum høgum kostnaði. Lendið er bratt, so neyðugt verður at laða kant á niðaru síðu at byggja gøtuna upp ímóti.

Fíggjarligar avleiðingar eru óansæð hvør loysnin verður, men at makaskifta er ein betri og bíligari loysn enn at flyta gøtuna.

Mett verður, at besta heildarloysnin er, at matriklarnir verða umskipaðir, sum skjal *Jnr 23/03741-11 kort – uppskot til broytta skipan av økinum við gøtuna*, vísir.

Fyri at hetta skal bera til, skal:

- avtala gerast við Búnaðarstovuna um keyp av lendi.
- útstykkingarætlanin fyri Hjaltarók broytast, soleiðis at økið ið verður keypt frá Búnaðarstovuni og lagt afturat matr 1228d, verður lagt afturat útstykkingarætlanini, sí skjal *Jnr 23/03741-12 Uppskot til broytta útstykkingarætlan 2024.*
- makaskiftast, soleiðis at matriklar verða umskipaðir, soleiðis sum skjal *Jnr 23/03741-11 kort – uppskot til broytta skipan av økinum við gøtuna* vísir.
- Serstaka byggisamtyktin fyri Hjaltarók broytast, soleiðis at økið, ið verður keypt frá Búnaðarstovuni og lagt afturat matr 1228d, verður lagt afturat serstøku byggisamtykini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
**Jnr. 15/00532** Verkfrøðingastovan : Umsókn um útstykking á matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn ( tekniskt projekt ) (2011-2404)
**Jnr. 23/02859** Umsókn til ummælis um keyp av uppískoytisstykki av matr. nr. 1230a og møguligt makaskifti millum matr. nr. 1228d, 1229a og 1230a, Tórshavn

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
**Jnr 23/02859-6** Umsókn um keyp av uppískoytisstykki og møguligt makaskifti millum matr.nr. 1228d, 1229a og 1230a
**Jnr 23/03741-11** kort – uppskot til broytta skipan av økinum við gøtuna
**Jnr 23/03741-12** Uppskot til broytta útstykkingarætlan 2024
**Jnr 15/00532-13** Scan0000000388 – galdandi útstykkingarætlan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Kostnaðurin av at keypa lendi og at tillaga matrikkuleru viðurskiftini er ókendur í núverandi løtu, men mælt verður til, at kostnaðurin verður fíggjaður av kt. 6275, L62019 Lendisgøtur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- At málið um at keypa part av matrikul 1230a at makaskifta við eigaran av matrikul 1228d, so framtíðar matriklar verða soleiðis, sum skjal *Jnr 23/03741-11 kort – uppskot til broytta skipan av økinum við gøtuna* vísir, verður tikið uppaftur við Búnaðarstovuna og eigaran av 1228d.
- At útstykkingarætlanin verður broytt, soleiðis sum skjal *Jnr 23/03741-12 Uppskot til broytta útstykkingarætlan 2024* vísir.
- At serstaka byggisamtykt fyri Hjaltarók verður tillagað, so parturin av 1230a verður lagdur afturat.
- At kostnaðurin fyri broytingina verður goldin av kt 6275 L62019 Lendisgøtur.
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 25. november 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndni og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

## 310/24 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 140/21 | 21/02624-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 176/21 | 21/02624-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 184/21 | 21/02624-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2021 | 244/21 | 21/02624-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 330/21 | 21/02624-2 |
| 6 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 320/21 | 21/02624-2 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 28/22 | 21/02624-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 42/22 | 21/02624-2 |
| 9 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 35/22 | 21/02624-2 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 106/22 | 21/02624-2 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.08.2022 | 158/22 | 21/02624-2 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 128/23 | 21/02624-2 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.01.2024 | 17/24 | 21/02624-2 |
| 14 Tekniska nevnd | 22.01.2024 | 4/24 | 21/02624-2 |
| 15 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 16/24 | 21/02624-2 |
| 16 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 14/24 | 21/02624-2 |
| 17 Kollafjarðarnevndin | 20.03.2024 | 3/24 | 21/02624-2 |
| 18 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 52/24 | 21/02624-2 |
| 19 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 85/24 | 21/02624-2 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.06.2024 | 110/24 | 21/02624-2 |
| 21 Fíggjarnevndin | 20.06.2024 | 197/24 | 21/02624-2 |
| 22 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 182/24 | 21/02624-2 |
| 23 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2024 | 165/24 | 21/02624-2 |
| 24 Kollafjarðarnevndin | 07.10.2024 | 9/24 | 21/02624-2 |
| 25 Fíggjarnevndin | 23.10.2024 | 261/24 | 21/02624-2 |
| 26 Fíggjarnevndin | 04.12.2024 | 293/24 | 21/02624-2 |
| 27 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 310/24 | 21/02624-2 |

**Upprunin til málið**
Málið er byrjað sum eitt politiskt mál.

**Lýsing av málinum**
Sambært kommunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í kommununi. Politiskt er ynski at royna aðrar leiðir fyri at nøkta tørvin á bústøðum, og tí verður farið undir at bjóða privatum mennarum at keypa part av matr. nr. 203c í Kollafirði fyri at menna til bústaðir.

Tórshavnar kommuna eigur matr. nr. 203c, og upprunaliga var ætlanin at stykkja lendið út saman við parti av matriklunum niðanfyri út til sethúsagrundir. Hendan ætlanin kom ongantíð á mál, og nú er ynski so at bjóða part av økinum út til aktørar at menna til bústaðir. Ætlanin er at selja uml. 3600 fermetrar í fríari sølu. Sí kortskjal, øki til sølu, journal nr. 21/02624-4.

Í sambandi við útboðið verður krav sett um, at tað skulu byggjast íbúðir ella raðhús. Tað er upp til tey bjóðandi at koma við uppskoti, hvussu byggingin verður skipað og hvat slag av bústøðum verða bygd. Bústaðirnir kunnu verða bygdir sum eigara- ella leigubústaðir.

Tilhoyrandi parkering og nøktandi loysnir fyri uttanumøkið er partur av loysnini.
Kommunan setir sum treyt, at tað er eitt hóskandi tal av bústøðum í verkætlanini. Tað er ein fyrimunur um byggingin er fjølbroytt og at atlit verður tikið til umhvørvið og stórfingna útsýnið. Dentur verður lagdur á, at byggingin tekur seg væl út, er dygdargóð og fellur væl inn í landslagið.

Útbjóðingin og sølan verður løgd soleiðis til rættis, at tað verður komið fram til bestu loysnina, sum tryggjar eina fjølbroytta, snøgga og dygdargóða bústaðarloysn, sum tekur seg væl út í umhvørvinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matrikul nr. 203c liggur í umráðispartinum A1 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnesi í Kollafirði galdandi fyri økið, sí skjal nr. 21/02624-3.

Tá vinanndi verkætlanin verður ment, verður neyðugt at broyta byggisamtyktina samsvarandi ætlanunum fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er týdningarmikið at tryggja, at innkomnu tilboðini verða gjøgnumgingin við atliti at tryggja, at tað sum ætlanin er at fara undir at byggja hóskar til umhvørvið og fellir væl inn í økið sum heild.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið hjá øðrum deildum enn.

**Skjøl**
Øki til sølu, journal nr. 21/02624-4
Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnnesi í Kollafirði, journal nr. 21/02624-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnardeildini og býararkitekturin mæla til, at matr. nr. 203c verður boðin út í fríari sølu við endamálinum at menna bústaðir á ognini eins og omanfyri lýst, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tá freistin at lata tilboð inn 15. november 2021, kl. 12 var farin, var eitt tilboð innkomið.

Tilboðið er frá Jóan Petur Vang áljóðandi kr. 1.586.000 við Kontrast, sum ráðgeva.
Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað áljóðandi kr. 350,00 fyri teir 4.480 fermetrarnar, ið er júst sama upphædd sum kostnaðarmetingin fyri lendið frá útboðstilfarinum. Tilboðið er væl lýst við einum sokallaðum skipanaruppskoti og við eini treyt um at graviloyvið verður givið soleiðis, at grevstur longu kann setast ígongd 1. mars 2022. Um hetta kann lata seg gera, fer byggingin ígongd pr. 1. juni 2022 og varðar uml. í 22 mánaðir, sí fylgiskjal *Upplegg 1.1.pdf.*

Ein nýggj serstøk byggisamtykt fyri økið skal gerast, ið loyvir bygging sambært uppskotinum. Hetta merkir, at áðrenn graviloyvi kann gevast, skal serstaka byggisamtyktin liggja til almenna hoyring í seks vikur, fyri síðan at góðkennast av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Ein tílík tilgongd plagar at taka millum ein til tríggjar mánaðir. Tí fer tað ikki at bera til at ganga treytini á møti og ein samráðing skal tí takast upp við tilboðsgevaran.

Talan er um níggju raðhús og fýra punkthús við tveimum íbúðum í hvørjum.
Støddirnar á raðhúsunum eru 125 fermetrar deilt yvir tvær fullar hæddir, umframt p-kjallara. Punkthúsini hava tvær íbúðir, ið eru ávikavist 75 og 100 fermetrar.

Búeindirnar hava nøktandi p-pláss. Tó ynskir kommunan eina øðrvísi skipan av teimum, soleiðis at fleiri verða á felagsøki, til tá føðingardagar o.a. er í økinum.

Økið er væl skipað við varðveittum bøgarði. Umsitingin metir tað sum eina styrki fyri dámin í økinum, at punkthúsini standa forskotin. Hetta er ikki ein vanligur háttur at staðseta hús á bygd, men hetta gevur meining í mun til gjøgnumtrek og sólargang.
Prinsippið við at byggja høgt upp móti hamrum er nakað, ið kommunan ynskir at síggja meiri av. Bygningarnir taka ikki útsýni umframt at hamarin skapar lívd.

Sum nevnt skal nýggj serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið og verandi serstaka byggisamtyktin, *SB_Kollafjørður_Lygnnes_2011_2_2011*, skal avtakast. Frávik skal gerast í nýggju serstøku byggisamtyktini, ið loyvir íbúðarbygging. Hæddin er hægri enn tann, ið er loyvd í A1 økjum og tí skal frávik eisini gevast til hetta. Orsøkin til høgu byggingina er, at parkering er undir raðhúsabygningunum. Hetta hevur nakrar fyrimunir við sær, ið kommunan átti at stuðla. Lendisnýtslan verður meiri effektiv og tann parturin, ið annars hevði blivið asfalteraður til p-pláss, kann blíva lagdur sum t.d. grønt øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at

- Jóan Petur Vang fær í boði at keypa lendið til íbúðir og raðhús fyri tilboðsupphæddina kr. 1.586.000
- farið verður undir at gera eina serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 203c í Kollafirði í samráð við keyparan av lendinum

- og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at byggingin skal fara í gongd innan 2 ár.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samband við Jóan Petur Vang um treytirnar, sum hann setir í tilboðnum um at fáa graviloyvi pr. 1. mars 2022 og at keypspeningurin fyri stykkið skal innganga í vegagerð og felagsøki, sum kommunan skal yvirtaka, tá verkætlanin er liðug. Samanumtikið kunnu vit ikki góðkenna treytir, og av tí sama hevur Jóan Petur Vang valt at trekkja tilboðið aftur.

Umsitingin hevur viðgjørt treytirnar og komin fram til hesar grundgevingar:
- Byggi- og graviloyvi kann ikki útvegast, áðrenn ein serstøk byggisamtykt er endaliga góðkend.
- Sambært kommunustýrislógini § 50, stk., ið bannar stuðli til einstaklingar, hevur kommunan ikki heimild til at gera eina avtalu, sum inniber, at keypspeningurin fyri lendið gongur inn aftur í egnu verkætlan í form av gjaldi fyri vegagerð. Hetta vildi verið at meta við at fáa lendið ókeypis. Um vit loyvdu einari slíkari treyt at inngingið í handilin eftirfylgjandi, vildi tað eisini verið í stríð við reglurnar um útboð av kommunalari fastogn tí onnur, sum møguliga høvdu í huga at bjóða upp á lendið, hava ikki fingið hendan møguleikan.

Ynskiligt er tó framvegis at fáa fleiri búeindir í kommununi og ein roynd átti at verið gjørd at bjóða lendið út umaftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarakitekturin mæla til, at matr. nr. 203c í Kollafirði verður boðin útaftur av nýggjum í fríari sølu og við somu treytum sum áður, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina..

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og byárskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um, at tá freistin at lata tilboð inn 30. mars 2022, kl. 12, var farin, var einki tilboð innkomið.

Kommunan eigur tí framvegis lendið matr. nr. 203c í Kollafirði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Nevndin ynskir, at verkætlanin verður boðin út enn einaferð.

**Ískoyti**
Kunnað verður um, at tá freistin at lata tilboð inn 1. august 2022, kl. 12, var farin, var einki tilboð innkomið.

Kommunan eigur tí framvegis lendið matr.nr. 203c í Kollafirði. Ynskiligt er framvegis at fáa fleiri fjøllbroyttar búeindir í kommununi, og ein roynd átti at verið gjørd at bjóða lendið út umaftur í heyst.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2022:** Samtykt at bjóða út aftur í heyst 2022.

**Ískoyti:**
Enn ein útbjóðing av matr. nr. 203c hevur verið, men hevur eingin áhugi verið fyri útboðnum, og er tískil heldur einki tilboð innkomið.

Í sambandi við at bústaðareindir mangla í Kollafirði, mælir umsitingin til at skipa økið við 10 sethúsum í staðin, soleiðis at økið í staðin fyri at byggja rað- og íbúðarhús verður til eina vanliga sethúsaútstykking.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til, hvussu økið kann skipast, sí skjal nr. 21/02624-22, Sethúsaútstykking á Lygnesi_Uppskot01_24aug2023. Sum sæst á tekningini, er partur av útstykkingini privat jørð. Umsitingin hevur sett seg í samband við eigararnar av matr. nr. 308, 309 og 209a, sum siga seg vera sinnaðar at selja part av sínum lendi til útstykkingina.

Mett verður, at tað er ráðiligt at fara undir hesa útstykkingina á sama hátt, sum fyri útstykkingina á Signabø, mál nr. 23/03516, sum er farið í undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At heimila umsitingini at fara undir samráðingar við privatu eigararnar av matr. nr. 308, 309 og 209a um at keypa tann partin av teirra ogn, sum er neyðugur fyri at gera útstykkingina.
- At heimila umsitingini at gera útbjóðingartilfar fyri økið og at bjóða ætlanina at gera útstykkingina út í heildararbeiðstøku sum undirhondsboð.
- At tá ið tilboðini eru komin inn og keypskostnaðurin er kendur, at leggja málið fyri nevndina aftur til endaliga støðutakan.
- At gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri útstykkingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 11.01.2024:**

Umsitingin hevur verið í samráðingum við eigararnar av matr.nr. 308, 309 og 209a, sum allir eru sinnaðir at selja lendið fyri uml. 300 kr.m²

Eigarin av matr.nr. 308, hevur ynski um at keypa ein geira millum vegin, á Lygnnesi. Geirin er uml 62 m². Endamálið við keypinum er, at hann hevur møguleika til at sundurbýta matrikulin til sethúsagrundstykki við atkomu frá vegnum.
Kommunan skal keypa uml. 172 m² frá honum, og verður tí talan um at keypa netto uml. 110 m²

Tørvur á lendi.

| Matr.nr. | m² | | kostnaður. |
|---|---|---|---|
| 309 | 1030 | | 309.000,- |
| 209a | 127 | | 38.100,- |
| 308 | 172 | netto 110 m² | 33.000,- |
| Tls. | | | 380.000,- |

Kostnaður til tinglýsing og matrikulering er mettur til uml. 26.000,- og verður mettur kostnaður í alt uml. 410.000,- kr.

Inn eru komin tvey tilboð frá arbeiðstakarunum Við Sjógv Spf. og Hallur Hansen, entreprenørur Spf. upp á heildararbeiðstøku at gera upp til 10 grundstykkir byggibúgvin við tilhoyrandi infrakervi og kringumstøðum.

Í útboðnum vóru treytir upplýstar og eftir hvørjum leisti innkomnu uppskotini/tilboðini verða dømd. Her var talan um ein stiga frá 0 - 10 har:

- Prísur, vekting 60%
- Tíðarætlan, vekting 10%
- Økisskipan, vekting 7,5%
- Skipan av fríøki, vekting 7,5%
- Felags parkering, vekting 5%
- Lendistillaging í praksis, vekting 2,5%
- Lendistillaging í útsjónd, vekting 5%
- Avvatning, vekting 2,5%

Dømingin var gjørd soleiðis at:

- 0 varð givið fyri, at parturin ikki var uppfyltur
- 3 fyri at parturin var uppfyltur í avmarkaðan mun
- 5 fyri at parturin var lutvíst uppfyltur
- 8 fyri at parturin var uppfyltur, tó við smærri lýtum
- 10 fyri at parturin var uppfyltur til fulnar

Inn komu tilboð frá Hallur Hansen, Entreprenørur Spf. og Við Sjógv Spf. Kostnaðurin av tilboðunum vóru hesir:

- Hallur Hansen, Entreprenørur Spf.: kr. 5.173.420,-
- Við Sjógv, Spf.: kr. 5.450.871,-

Eftir leistinum, sum innkomnu tilboðini/uppskotini skuldu dømast kundi tilboðið frá Við Sjógv einans dømast út frá tilboð og nøgdarlista, og ikki út frá hinum parametrunum. Tí hevur døming ikki verið framd av tilboðunum báðum, men einans hevur verið eftirkannað um tilboðið frá Hallur Hansen, entreprenøri Spf., heldur tey krøv, sum eru sett fyri tilfarinum. Úrslitið er, at tilboðið heldur hesi krøv. Arbeiðstakarin metir, at arbeiðið tekur 12 mánaðir.

Samlaði kostnaðurin fyri hesa útstykking verður uml. kr. 7.000.000,-. Talan er tá um 9 grundstykki, sum so statt koma at hava ein kostprís á uml. kr. 780.000,-. Á borgarafundum í Kollafirði í 2023 kom fram, at ynski er ikki um at keypa grundstykkir fyri henda kostnað, tá tilsvarandi grundstykkir í grannakommunum kunnu fáast fyri niður í 320 tkr. Eisini vísa royndirnar frá útstykkingini á Hamrabø, at neyðugt var at lækka prísin fyri grundstykkini. Tí verður mett, at rættast er at bjóða hesi grundstykkini út fyri at staðfesta áhugan millum møguligar keyparar, áðrenn farið verður víðari við at keypa lendið og byggibúgva grundstykkini og gera veg og annað tilhoyrandi.

Neyðugt verður at játtað kr. 7,0 mio til verkætlanina sum eykajáttan, treytað av at nóg stórur áhugi er til verkætlanina.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐

Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Eykajáttan | 6475 | | Nýggj útstykking á Lygnnesi | | 7.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 7.000.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 30.000,- |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at keypa lendið frá privatu eigarunum fyri ein samlaðan kostnað á uml. kr. 410.000, íroknað útreiðslur til matrikulering og tinglýsing, treytað av at nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini.

Harumframt mæla tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin til at:

- at umsitingin kannar, um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- er nóg stór undirtøka til verkætlanina, verður komið aftur í nevnd at biðja um heimild at fara víðari við samráðingunum og at fyrireika verkætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at grundstykkjakostnaðurin er kr. 500.000 kr.

Málið beint til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Vegna samtyktina á býráðsfundi 24. januar 2024, har samtykt varð, at grundstykkjaprísurin verður kr. 500.000,- fyri hvørt grundstykkið, skulu samanlagt kr. 2.500.000,- av samlaða kostnaðinum at gera útstykkingina fíggjast uttan um inntøkur frá keypskostnaðinum. Kunnað verður um, at hesin peningur ikki er tøkur í fíggjarætlanini fyri 2024.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Kunnað varð um málið.

**Kollafjarðarnevndin 20. mars 2024:** Kunnað varð um málið. Nevndin viðmerkti, at ynskiligt er at øll grundstykkini í Kollafirði verða útboðin samstundis, og at kunnað verður um heildarætlanina við Botnánna.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Á heysti 2023 komu tvey tilboð inn frá ávikavist Hallur Hansen, Entreprenørur Spf. og Við Sjógv Spf. Kostnaðirnir av tilboðunum vóru hesir:

- Hallur Hansen, Entreprenørur Spf.: kr. 5.173.420,-
- Við Sjógv, Spf.: kr. 5.450.871,-

Hallur Hansen Entreprenørur Sp/f eigur so statt lægsta tilboðið. Men neyðugt er at fáa eitt dagført tilboð frá Halli Hansen Entreprenøri.

Av tí at nýggja dagførda tilboðið enn ikki er latið kommununi, er torført at upplýsa, hvør endaligi kostnaðurin fyri útstykkingina verður.

So statt verður samlaði kostnaðurin fyri hesa útstykking helst nakað meir enn kr. 7.000.000,-, sum upplýst áður. Hetta er grundað á, at tíð er gingin síðani tilboðið varð latið inn, og at við longu hendum prísvøkstri og væntandi lønarvøkstri, so hevur tilboðsgevarin rætt at tillaga sítt tilboð.

Býráðið samtykti í januar 2024, at grundstykkjakostnaðurin skal vera kr. 500.000. So statt verður neyðugt at fíggja útstykkingina uttan um inntøkur frá keypskostnaðinum.

Neyðugt verður í fyrstu atløgu at játta kr. 7 mió. til verkætlanina sum eykajáttan. Tá endaligi kostnaðurin fyri útstykkingina er kendur, kemur umsitingin aftur í nevnd við hesum.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | 6475 | | Útstykking til sethús á Lygnnesi | Nýggj verkætlan | 7.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 7.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024-25 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At heimila umsitingini at undirskriva sáttmála við arbeiðstakaran, tá dagførda tilboðið er handað kommununi,
- At játtaðar verða kr. 7.000.000 sum útlegg á nýggja verkætlan á konto 6475, og at umsitingin kemur aftur í nevnd við endaliga kostnaðinum fyri útstykkingina,
- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. juni 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Sambært undanfarnu samtykt skal upplýsast um dagførdan kostna fyri verkætlanina. Arbeiðstakarin hevur latið inn dagført tilboð áljóðandi kr. 5.363.491,- umframt mvg, ein hækking á kr 190.071 umframt mvg. Harumframt koma útreiðslur til keyp av lendi, sum íroknað gjøld fyri matrikulering og tinglýsing o.a. í sambandi við keypi eru mettar til kr. 450.000,-. Hetta gevur ein samlaðan kostna á kr. 6.149.000,-. Umframt keyp av lendi og sáttmálan við arbeiðstakaran kunnu væntast útreiðslur til verkætlanarleiðslu, avleidd arbeiðir og annað ókent hjá byggiharra. Við verandi játtan undir viðgerð á kr. 7.000.000,- eru umleið 14% tøk til hesar útreiðslur og verður mett, at tað er nøktandi.

Sum lýst í undanfarnu tveimum viðgerðum, verður útstykkingin gjørd við 9 grundstykkjum, sum sambært samtykt í býráðnum 25. januar 2024, ikki kunnu kosta meir enn kr. 500.000,- hvørt. Tí verður samlaði sølukostnaðurin av verkætlanini til endakeyparar í mesta lagi kr. 4.500.000,- Hetta merkir, at av teimum kr. 7.000.000, sum eru játtaðar sum útlegg við fyrstu viðgerð í Býráðnum, eru kr. 2.500.000 ikki fíggjaðar. Í undanfarna ískoyti er víst á, at tað er neyðugt, at henda upphædd verður fíggjað.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
- hildið verður fast í samtyktini hjá Býráðnum frá 20. juni 2024
- víst verður á, hvussu verkætlanarkostnaður oman fyri søluinntøkur á kr. 2.500.000 verður fíggjaður

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at verkætlanarkostnaður oman fyri søluinntøkur á kr. 2,5 mió verður játtaður í fíggjarætlanini 2025.

**Kollafjarðarnevndin 07. oktober 2024:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2024:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 2.500.000,00 av konto 6475, byggibúning bústaðir og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

# 311/24 Sethúsaútstykking á Velbastað – partur av matr. nr. 51a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 25/22 | 22/00329-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 40/22 | 22/00329-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 112/23 | 22/00329-1 |
| 4 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 159/23 | 22/00329-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 135/23 | 22/00329-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 153/23 | 22/00329-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 269/23 | 22/00329-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 247/23 | 22/00329-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.01.2024 | 19/24 | 22/00329-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 22.01.2024 | 5/24 | 22/00329-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 20/24 | 22/00329-1 |
| 13 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 17/24 | 22/00329-1 |
| 14 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 19.03.2024 | 2/24 | 22/00329-1 |
| 15 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 86/24 | 22/00329-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 09.10.2024 | 249/24 | 22/00329-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 04.12.2024 | 294/24 | 22/00329-1 |
| 18 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 311/24 | 22/00329-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna er í troti av bústøðum. Í heyst varð farið undir at broyta byggisamtyktina fyri ein part av matr. nr. 51a á Velbastað, sí viðhefta skjal 22/00329-2, Økið_broytt til bústaðarbygging.

Broytingin er grundað á ynski um at gera eina kommunala sethúsaútstykking í økinum.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin fór í heyst undir at broyta ein part av matr. nr. 51a til økisásetingina B – Bústaðarøkið. Broytingin er enn ikki endaliga góðkend í Býarskipanarnevnd Landsins, men verður viðgjørd í nevndini fyrst í februar.

Fyri at fara undir at gera útstykkingina, er neyðugt, at kommunan ognar sær lendið, sum ætlanin er at byggja á. Harumframt skal verkætlanin projekterast og setast í verk.

Umsitingin sær fyri sær, at økið verður boðið út til arbeiðstakara at menna og byggja, og í tí sambandinum er neyðugt at fara undir at gera útbjóðingartilfarið, sum skal liggja til grund fyri verkætlanini. Kommunan ynskir at bjóða lendið út til projektering og bygging av grundstykkjum, sum kommunan síðani lutar út til privat til bygging av sethúsum.

Økið, sum talan er um at keypa, er uml. 8500 m$^2$ til støddar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Løgtingslóg um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 194 frá 23. desember 2018
- Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn

- Reglugerð fyri útlutan av fastari ogn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sum eisini sæst í málinum um broyting av byggisamtyktini, so ynskir staðbundna nevndin at síggja útstykkingaræltanina, tá hon er liðug. Tískil verður mælt til, at umsitingin setir seg í samband við limir í nevndini í sambandi við gerð av útbjóðingartilfarinum, og eigur verkætlanin at verða løgd fyri nevndina aftur, tá tilboðini eru innkomin.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01258 Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Velbastað fyri part av matr.nr. 51a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
22/00329-2 Økið_broytt til bústaðarbygging

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | x | x | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | x | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar fyri verkætlanina og at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum, partur av matr. nr. 51a, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og heimila umstingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar til verkætlanina og fyrireika útbjóðing og harumframt at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum og at beina málið aftur í fíggjarnevndina, tá hesi viðurskifti eru avgreidd.

**Ískoyti**
Tá freistin at lata tilboð inn tann 13. mars kl. 12 var farin, vóru tvey tilboð innkomin.

| | | |
| --- | --- | --- |
| P/F Tórhall Hansen á | kr. 6.037.839 u/mvg fyri | 17 grundstykki |
| Sp/f Plan á | kr. 11.191.071,05 u/mvg fyri | 14 grundstykki |

Útboðið var skipað á tann hátt, at tilboðsgevari gav tilboð upp á:
• Skipanaruppskot fyri økið
• Projektering íroknað myndugleikaviðgerð
• Byggibúning

Síðani er ætlanin, at kommunan lutar stykkini út til privatpersónar at byggja síni sethús á.

Í útbjóðingartilfarinum stóð, at tilboðsgevari vinnur upp á bíligasta kostnað. Sambært hesum hevur P/F Tórhall Hansen vunnið útboðið.
P/F Tórhall hansen hevur havt Sp/f Uni Patursson afturat sær sum ráðgevandi verkfrøðing.

Byggimálsdeildin og býarskipanardeildin fóru saman við vinnandi tilboðsgevaranum, P/F Tórhalli Hansen, í eina samráðingartilgongd at finna fram til mest skynsomu gagnnýtsluna av økinum í mun til kostnaðin.

Í hesi tilgongdini varð m.a. komið fram til, at stykkini í skipanaruppskotinum vóru teknað ov trong og avmarkandi til eina vanliga familju at innrætta seg á.
Eitt nú fór tað at gerast trupult at rúma einum bilhúsi á hvørjum av stykkjunum, ið var mett at hava stóran týdning, og tilboðsgevarin var tískil biðin um at tillaga ætlanina nakað. Úrslitið var, at tey 17, heldur trongligu stykkini, vórðu umskipað til 14 rúmligari grundstykkir.

Tilboðsgevarin lat so statt eitt tillagað uppskot inn 15. mai 2023 við nýggjari kostnaðarmeting fyri projektering og byggibúning av samlaðu útstykkingini av 14 grundstykkjum (á umleið 500m² hvørt), ið var tilsamans áljóðandi: 6.995.579 kr u.mvg.

Sí viðhefta skipanaruppskot og arbeiðstøkutilboð: *Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21

Í sambandi við at fyrireika økið við tilføringurm, reinsiverki, drenskipan o.a. hevur Tekniska deild eisini gjørt eina kostnaðarmeting fyri «avleiddar verkætlanir». Hon er soljóðandi (u.mvg):

| | | |
| --- | --- | --- |
| Dren av yvirflatuvatni omanfyri útstykkingina: | kr | 312.000 |
| Gøtuljós og íbinding: | kr | 250.000 |
| Reinsiverk við neyðugum leiðingum: | kr | 400.000 |
| Kloakkleiðingar: | kr | 250.000 |
| Vatnleiðing: | kr | 50.000 |
| Brandpostar: | kr | 60.000 |
| Tilsamans (u.mvg) | kr | 1.322.000 |

Leggjast skal afturat, at í einum slíkum føri heftir SEV fyri kostnaðin, sum stendst av at tryggja neyðugu el-leiðingarnar til eina nýggja útstykking sum hesa. Í hesum sambandi nevnir SEV fleiri møguleikar í økinum, har knýtast kann í verandi el-kervið á Velbastað.

Skrivlig tilsøgn er fingin frá Búnaðarstovuni um keypið av lendinum, sum Føroya jarðargrunnur eigur.
Metti kostnaðurin fyri lendið á matr. nr. 51a á Velbastað (uml 8.500m² av dyrkingarbærum lendi í Øki 2 Velbastaður) er: kr. 1.050.000.

Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina er tískil:

| | | |
| --- | --- | --- |
| Projektering og byggibúning: | kr | 6.995.579 |

| | |
|---|---|
| Avleiddar tekniskar verkætlanir: | kr 1.322.000 |
| Keyp av lendi: | kr 1.050.000 |
| Tilsamans: | kr 9.367.579 |
| Íroknað kommunalt mvg á 6,25% er hetta: | kr 9.953.053 |
| Metti eindarkostnaðurin fyri hvørt grundstykki (á uml. 500m²)<br>verður tískil: (9.953.053 / 14): | kr 710.932 |

Sí annars viðheftu útgreinaðu kostnaðarmetingina fyri samlaðu verkætlanina: *Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j.nr. 22/00329-23. *Afturat kostnaðarmetingini verður mælt til at seta 1 mió. kr av til ókent. Alt eftir hvussu nógv verður brúkt av ókendu puljuni, so kann hetta ávirka endaliga eindarkostnaðin fyri hvørt grundstykki.*

Um umsitingini verður heimilað at halda fram við verkætlanini, og samráðingararbeiðið við tilboðsveitaran kann halda fram, er hugsandi, at smærri tillagingar eiga at verða gjørdar í skipanaruppskotinum, eitt nú í mun til hvussu økið til bilparkering framman fyri útstykkingini eisini tryggjar, at koyribreytin á Ervavegnum (sum er atkomuvegurin niðanfyri útstykkingina) kann breiðkast nakað niðan ímóti grundstykkjunum. Hendan koyribreytin er heldur smøl í dag.

P/F Tórhall Hansen metir, at verkætlanin verður liðugt projekterað í summar. Og um øll neyðug loyvi vera givin í næstum at stykkja út, so kann útstykkingin standa liðug um 1,5 ár eftir, at arbeiðstøkan byrjar.

**Skjøl**
*Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21
*Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j. nr. 22/00329-23

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☐ |
| Eyka játtan | ☒ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6475 | | Byggibúning bústaðir | 6475 | | | Nýggj útstykking á Velbastað | 11.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 11.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-24 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til,:

- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingini kannar um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.

- um nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini millum borgarar, at heimilað umsitingini at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen
- at játtaðar verða 11 mió. kr. til verkætlanina sum eykajáttan, og at nýggj verkætlan verður upprættað til verkætlanina.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Sí kunning í ískoytinum omanfyri, har greitt verður frá ætlanini um at gera eina útstykking við 14 byggibúnum grundøkjum (á uml. 500 fermetrar hvørt), til sethús á Velbastað.

Málið varð tikið av skrá, orsakað av at tilsøgnin frá Búnaðarstovuni fyrilá ikki sum endaliga skjalfest í málinum.

Fyribils tilsøgn um keyp av lendi er nú fingin frá Búnaðarstovuni, sí viðheft skjal: *Skrivlig tilsøgn um keyp av lendi frá búnaðarstovuni*, j. nr. 22/00329-27.

Sum nevnt var í ísoytinum omanfyri, er metti eindarkostnaðurin fyri hvørt av teimum grundstykkjunum uml. Kr 710.932.

Gevið gætur, at hetta er ein mettur kostnaður, og at fyrivarni skal takast fyri óvissum ella smærri tillagingum í prosjekteringini, sum skal gerast av arbeiðstakaranum í næstum. Hetta hevur væntandi við sær, at endaligi eindarkostnaðurin verður justeraður nakað.

**Skjøl**
*Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21
*Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j. nr. 22/00329-23
*Skrivlig tilsøgn um keyp av lendi frá búnaðarstovuni*, j. nr. 22/00329-27.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til,:
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen.
- at játtaðar verða 11 mió. kr. til verkætlanina sum eykajáttan, og at nýggj verkætlan verður upprættað til verkætlanina.
- at fáa heimild at selja stykkini.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.

at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Sí ískoyti til byggi- og býarskipanarnevndina 19. juni 2023 og 11. september 2023

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingin kannar, um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- um nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini millum borgarar, at heimila umsitingini at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen
- at játtaðar verða kr. 11 mió. til verkætlanina sum eykajáttan av konto 6475, Byggibúning bústaðir, og at nýggj verkætlan við heitinum Nýggj útstykking á Velbastað verður uppræRttað á konto 6475 til verkætlanina.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
18. oktober 2023 samtykti býráðið at umsitingin skuldi kanna, um áhugi er millum borgarar at keypa ætlaðu grundstykkini á Velbastað.

22. november var lýst alment, at fólk kunnu melda til lutakast um grundstykkini á Velbastað til 20. december 2023, og sagt varð frá: *Vísir áhugin seg at vera nóg stórur, verður verkætlanin løgd fyri nevndir og býráð til góðkenningar, og tilmeldingarfreistin verður longd í 4 vikur. Vísir tað seg hinvegin, at áhugin er lítil ella eingin, verður verkætlanin endurmett og møguliga broytt ella slept.*

Tá freistin var farin, vóru tað 8, ið høvdu meldað til lutakast og latið inn váttan um fígging.

Úrslitið skal sjálvandi takast við tí fyrivarni, at royndirnar vísa, at av teimum, sum vanliga melda til lutakast um grundstykki, eru tað altíð ein rímiliga stórur partur, ið fellur frá, og í hesum føri er ongin verkætlan enn, so tað skal nokk ikki leggjast meira í úrslitið enn tað, tað er. Altso meira ein kanning av áhuga enn ein tilmelding.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Eykajáttan | 6475 | | Nýggj útstykking á Velbastað | Nýggj verkætlan | 11.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 11.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024-25 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, grundað á at áhugin fyri útstykkingini er so stórur sum lýst omanfyri:

- at heimila umsitingini at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at málið viðv. fíggingini sum eykajáttanarmál verður beint í býráðið til aðru viðgerð.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Tekniska nevnd 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og játta 11 mió. kr. sum eykajáttan á konto 6475, Nýggj útstykking á Velbastað.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein boðaði frá, at hann er ógegingur at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar, og Annfinn Brekkstein fór av fundi.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 19. mars 2024:** Kunnað varð um málið. Staðbundna nevndin sendir viðmerkingar til verkætlanarleiðaran.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Annfinn Brekksteni boðaði frá, at hann er ógegnigur at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar, og Annfinn Brekkstein fór av fundi.

Málið einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:** Eftir at arbeiðið við útstykkingini hevur verið boðið út, hevur festarin gjørt vart við, at ætlaða útstykkingin fær ávísar neiligar avleiðingar fyri raksturin av festinum.

Eitt nú verður neyðugt at gera nýggja rætt, tí rekast kann ikki í gomlu rættina, eftir at útstykkingin er framd í verki. Nýggja rættin verður niðanfyri vegin, og neyðugt verður eisini at tillaga rørportrini á vegnum. Harumframt hevur mista lendi við sær, at áseyðatalið má minkast, og fyri allar teir ampar, ið ætlaða útstykkingin hevur við sær, skjýtur advokatur hjá festaranum upp, at festarin fær eitt ampaendurgjald áljóðandi kr. 375.000 kr.

Víst verður til uppskot til avtalu millum Tórshavnar kommunu og festaran, j.nr. 22/00329-45.

Peningur verður at játta sum útlegg í sambandi við útstykkingina, og útreiðslurnar verða lagdar aftruat søluprísinum fyri grundøkini, og eindarkostnaðurin fyri grundøkini justeraður í mun til avhildnu útreiðslurnar fyri útstykkingina.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við uppskotinum til ampaavtalu við festaran og játta kr. 350.000 sum útlegg í sambandi við útstykkingina.

**Fíggjarnevndin 09. oktober 2024:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein boðaði frá, at hann er ógegnigur at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar, og Annfinn Brekkstein fór av fundi.

# 312/24 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 37/21 | 21/02196-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 160/21 | 21/02196-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 188/21 | 21/02196-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.11.2021 | 70/21 | 21/02196-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 297/21 | 21/02196-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 302/21 | 21/02196-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 26.04.2022 | 37/22 | 21/02196-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 120/22 | 21/02196-2 |
| 9 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 99/22 | 21/02196-2 |
| 10 Fíggjarnevndin | 12.05.2022 | 123/22 | 21/02196-2 |
| 11 Býráðsfundur | 12.05.2022 | 104/22 | 21/02196-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 60/22 | 21/02196-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 253/22 | 21/02196-2 |
| 14 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 244/22 | 21/02196-2 |
| 15 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 265/22 | 21/02196-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 20.12.2022 | 76/22 | 21/02196-2 |
| 17 Fíggjarnevndin | 21.12.2022 | 329/22 | 21/02196-2 |
| 18 Býráðsfundur | 21.12.2022 | 302/22 | 21/02196-2 |
| 19 Tekniska nevnd | 19.06.2023 | 34/23 | 21/02196-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 198/23 | 21/02196-2 |
| 21 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 163/23 | 21/02196-2 |
| 22 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 189/23 | 21/02196-2 |
| 23 Tekniska nevnd | 27.02.2024 | 15/24 | 21/02196-2 |
| 24 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 54/24 | 21/02196-2 |
| 25 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 39/24 | 21/02196-2 |
| 26 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 60/24 | 21/02196-2 |
| 27 Tekniska nevnd | 07.10.2024 | 61/24 | 21/02196-2 |
| 28 Fíggjarnevndin | 23.10.2024 | 260/24 | 21/02196-2 |
| 29 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 249/24 | 21/02196-2 |
| 30 Tekniska nevnd | 25.11.2024 | 72/24 | 21/02196-2 |
| 31 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 312/24 | 21/02196-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at samráðingar hava verið millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um at kommunan tekur á seg at gera nýggjan uttara ringveg við íbindingum til Tórshavn er gjørd avtala millum partarnar um, at Føroya landsstýri letur Tórshavnar kommunu stuðul til part av verkætlanini.

**Lýsing av málinum**
Nýggjur uttari ringvegur í Tórshavn hevur verið í umbúna í mong ár og serliga síðani farið var undir at fyrireika Eysturoyartunnilin.

Landsverk hevur arbeitt við at fyrireika henda veg, og í hesi fyrireiking er linjuføring fyri vegin løgd og knútapunkt á linjuføringini staðsett (sí kort í fylgiskjølum). Vegurin verður gjørdur millum rundkoyring oman fyri Sandvíkarhjalla (C) og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð (G). Á hesum strekkinum verða knútapunktini C1, C2 og C3, sum eru íbindingar til millum knútapunkt C og knútapunkt E, sum er rundkoyring við Villingadalsvegin/Sundsvegin. Úr knútapunkti E verður tunnil til knútapunkt F, sum er vestan fyri Hotel

Føroyar. Í knútapunkti F verður gjørd rundkoyring, sum hevur fýra greinar: Ein í tunnilin, ein oman í knútapunkt G og tvær til Landið at føra ferðsluna til ávikavist Oyggjarvegin og til Sandoyarleiðina.

Alt vegastrekkið millum punkt B og G verður kommunalur vegur.

Samlaði kostnaðurin er mettur til at vera 288 mió. kr.

Stuðulin frá landinum verður í mesta lagið 110 mió. kr., sum ásett er í løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár.

Stuðulin er treytaður av, at

- arbeiðið við nýggja uttara ringvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
- Nýggi uttari ringvegur skal lúka krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá meginøkinum. Hetta er tó ikki galdandi í tíðarskeiðum, tá vegarbeiði og tilíkt verður gjørt.
- Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar, sum t.d. ferðslubungur, soleiðis at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Nýggjar íbindingar í nýggja uttara ringveg kunnu bert gerast til vegir, sum eru ætlaðir til bilferðslu; ikki til atkomu til bygningar og tilíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein veg, sum bara er ætlaður bilferðslu, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin, tá løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn er farin úr gildi.
- Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa hesa avtalu á matrikulin, tá nýggi uttari ringvegurin er liðugur.

Avtalan er víðari treytað av, at Løgtingið samtykkir uppskotið til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn, og at Tórshavnar Býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í løgtingslógini og sambært avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um Fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.

Umsitingin kannar alt tøkt verklagstilfar, forkanningar og alt annað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesa verkætlan, og sum uttan viðurlag verður latið Tórshavnar kommunu sambært avtaluni.

Byggiskrá verður gjørd við støði í úrslitinum av hesum kanningum, og arbeiðið at fremja verkætlanina verður boðið út av umsitingini sum heildarverkætlan, antin fyri:

- Alla verkætlanina samlað,
- ella fyri vegir og tunnil hvør sær.

Umsitingin arbeiðir í hesum sambandi eisini við at finna fíggingarleist fyri kommununnar part av verkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

Innkomuvegur yvirlit, j.nr. 21/02196-4
Avtala_FMR_TK, j.nr. 21/02196-1
LI_uttararingveg, j.nr. 21/02196-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Biðið verður um 1 mió. kr. til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyri standandi fyrireikingar.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: juni-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 1.000.000 | 8175 | L81037 | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við:

- avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.
- at umsitingin fær heimild til at gera byggiskrá fyri heildararbeiðstøku.
- at umsitingin fær heimild til at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku fyri:
  - Alla verkætlanina samlað,
  - ella fyri vegir og tunnil hvør sær.
- Umsitingin fær játtað ein fíggjarkarm á kr. 1.000.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, L81037, Innkomuvegur kommunali partur, til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyristandandi fyrireikingar.
- Málið soleiðis verður samtykt og beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at partar av vegnum/tunnilin kann bjóðast út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at projektering av tunli og vegum skal gerast, er tørvur á, at umsitingini verður heimilað at gera hesar sáttmálar. Í hesum sambandi er tørvur á einum samlaðum karmi á kr. 3.500.000. Hesin karmur er treyt fyri, at projekteringin av innkomuvegnum og tunli kunnu fremjast og gerast liðug. Skotið verður upp, at afturat teimum kr. 1.000.000 og kr. 751.000, sum áður eru játtaðar og framfluttar frá 2020 til verkætlanina L81037 Innkomuvegur kommunalur partur, verða játtaðar kr. 1.750.000, sum ikki verða avgreiddar av ymiskum øðrum kontum og verkætlanum í 2021:

- 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
- 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
- 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
- 250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við at:

- Umsitingini verður heimilað at gera sáttmálar um projektering av innkomuvegi og tilhoyrandi tunli innan ein samlaðan karm á kr. 3.500.000
- Karmurin til projektering verður fíggjaður av:
  - Verandi tøkari upphædd á L81037 Innkomuvegur kommunalur partur
  - 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
  - 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
  - 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
    250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tekniska nevnd 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið verður fíggjað av íløguætlan fyri 2022 (Innkomuvegur).

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg

**Ískoyti**:
Fyrsti partur av uttara ringvegi, ið er arbeiðsvegur frá á Hjalla til Villingadadagsvegin, varð boðin út og lægsta boð à kr. 17.272.128 uttan MVG, hevði Articon.
Fyri at seta arbeiðið í gongd, verður biðið um fylgjandi játtan:

| | |
|---|---|
| • Tilboð | 17.272.128 |
| • Verkætlanarleiðsla, eftirlit og byggileiðsla | 1.000.000 |
| • Avleiddar verkætlanir | 5.600.000 |
| • 6,25 MVG | 1.492.008 |
| | |
| Tilsaman | 25.364.136 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum frá Articon, at játtaðar verða kr. 25.364.136 til verkætlanina, fyrsti partur av uttara ringvegi, kr. 4.600.000 av LK81037 og kr. 20.764.136 sum eykajáttan og beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 26. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at kr. 20.764.136,00 verða játtaðar av mettum meirinntøkum í 2022. Um metingarnar ikki halda, verður fíggingin løgd fyri aftur, møguliga sum lántøka. Málið beint í býráðið sum eykajáttan hvat viðvíkur upphæddini á kr. 20.764.136,00.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:** Fyri at tryggja so stuttan flutning av grevstrartilfarinum sum gjørligt, er gjørt uppskot um avtalu við festaran á Hoyvíkshaganum Norðaripartur um at taka ímóti avlopstilfari, sum ikki verður brúkt í verkætlanini. Fyri hetta skal festarin fáa somu upphædd fyri rúmmeturin, sum annars verður kravdur í tyrvingarplássinum í Húsahaga.

Samlað er talan um ein kostnað á uml. kr. 2.150.000,00, sum ikki er íroknaður í útboðnum og givna tilboðnum ísv. verkætlanina.

Harumframt hevur verkætlanin varandi neiliga ávirkan á raksturin av festinum, tá lendið, sum festið hevur ræði á, verður lagt undir vegin og avleiddar verkætlanir umframt komandi vinnuútstykkingina í økinum. Festarin missir tá bit til seyð, undirlendi til ungneyt umframt fría atkomu til bitið. Harumframt verða skipanirnar av verandi fylgjum og gongum ávirkaðar við eyka avbjóðingum til festaran sum avleiðing. Umsitingin metir og er samd við festaran, at ein eingangssamsýning til festaran á kr. 1.500.000,00 er hóskandi samsýning fyri hesar neiligu ávirkanir á raksturin av festinum.

Avtalurnar við festaran hava við sær, at neyðugt er at hækka játtanina, ið samtykkjast skal við aðru viðgerð, úr kr. 20.764.136,00 upp í kr. 24.424.136,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja uppskotið við aðru viðgerð við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 24.424.136,00 av meirinntøkum í 2022 og annars taka undir við fyriliggjandi avtalum við festaran

**Fíggjarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevi kommununar hevur eftir avtalu við kommununa projekterað tunnilin lidnan til høvuðsarbeiðstøku og vegurin frá rundkoyringini við Hvítanesvegin til tunnlismunnan undir Brúnni er projekteraður soleiðis, at geometri og krøv eru gjørd klár til heildararbeiðstøku – her er talan um ein lidnan projekteraðan ráveg, tað vil siga at vegkassin er liðugt projekteraður, meðan yvirbygnaður, leiðingar, avvanding, ljós búgvar o.s.fr. ikki eru liðugprojekterað, men krøvini fyri projektering av teimum eru sett upp.

Neyðugt er, at arbeiðstøkurnar fyri tunnil og veg fylgjast, soleiðis at tilfar úr tunlinum í mestan mun kann verða flutt beinleiðis úr tunlinum til vegin. Eisini verður mett, at tað er ein avgerandi fyrimunur fyri logistikkin í samlaðu verkætlanini um einans ein arbeiðstakari er fyri bæði tunnil og veg. Hetta krevur, at útboð og lisitatión fyri tunnil og veg eru samtundis.

Tunnilsgerðin inniber nógv arbeiði í sambandi við vatntrygging og bergtrygging, sum hóast tunnil hevði verið heildararbeiðstøka, helst høvdu verið avroknað øðrvísi. Tí verður mælt til, at tunnilin verður boðin út sum høvuðsarbeiðstøka. Vegurin, hinvegin, er betri egnaður at bjóða út sum heildararbeiðstøka, men vil hesin útboðsformurin krevja longri tíð, áðrenn lisitatión kann haldast fyri hesa arbeiðstøkuna. Hesi viðurskifti gera, at mett verður at besti útboðsháttur fyri samlaðu verkætlanina er, at tunnil og rávegur verða boðin út fyrst, sum høvuðsarbeiðstøka, meðan vegurin verður liðugt projekteraður til útboð til høvuðsarbeiðstøku.

Mett verður at hetta projekteringsarbeiðið saman við neyðugum kanningum verður gjørt innan ein karm á kr. 1.500.000,-. Undir hesum eru eisini neyðugar støðukanningar av verandi brúgvum, sum framhaldandi verða partur av uttara ringvegi, og projektering av broytingum av hesum brúgvunum. Hetta arbeiðið verður mett at kostað um kr. 350.000,-.

Arbeiðið verður mett at verða liðugt og klárt at bjóða út um ársenda 2022. Tó eigur at verða sett tann treyt, at farast kann ikki undir projekteringina av lidnum vegi, áðrenn Tórshavnar býráð hevur samtykt at fara undir tunnil og veg, sum lýst omanfyri.

Tó eigur at kunna farast undir at gera støðukanningar av brúgvunum beinanvegin og projektera broytingar av teimum í mun til lidnan veg.

### Játtan:

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | 81037 | Innkomuvegur | | 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

### Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til, at samtykt verður at heimila umsitingini at:

1. Bjóða ráveg og tunnil út sum høvuðsarbeiðstøku
2. Gera sáttmála við ráðgevan um detailprojektering av vegaverkætlan frá rundkoyringini við Hvítanes til Tunnilsmunnan undir Brúnni innan eina rammujáttan á kr. 1.500.000,-, treytað av at Tórshavnar býráð samtykkir at taka av tilboði um ráveg og høvuðsarbeiðstøku. Tó eru støðumeting og projektering av broytingum av verandi brúgvum undantikin hesi treyt innan eina kostnaðarrammu upp til kr. 350.000,-
3. at peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir (íløgur), L81037 Innkomuvegur

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Heðin Mortensen legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til at taka undir við málinum sum samtykt við fyrstu viðgerð við teirri broyting, at pkt. 3 verður soljóðandi:

«3. at peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir (Íløgur), L81037 Innkomuvegur, av inntøkum frá avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan ringveg í Tgórshavn, frá 26. mai 2021.»

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

Uppskotið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**
Tann 1. desember 2022 varð lisitiatión um arbeiðið at gera tunnil og ráveg. Inn komu tilboð frá P/F J & K Petersen og P/F Articon áljóðandi ávikavist kr. 310.396.677,- og kr. 293.055.268,-. Harumframt lat Articon tvey alternativ tilboð inn áljóðandi ávikavist kr. 289.150.373,- og kr. 261.876.066,-. Umsitingin hevur gjøgnumgingið tilboðini.

Í stuttum umfata alternativu tilboðini ávikavist eitt fast-prís tilboð upp á arbeiðið, sum lýst í útboðnum og eitt fast-prís tilboð upp á ein styttan tunnil, sum á sunnaru síðuni kemur út við ríðibreytina, og síðani verður rávegur førdur oman í Marknagil.

Umsitingin hevur gjøgnumgingið møguleikarnar saman við ráðgevunum og Articon til tess at røkka bestu loysnini fyri uttara ringveg. Nøktandi loysn er funnin við støði í innkomnu tilboðunum, og tekur henda loysn í størst møguligan mun teknisk og fíggjarlig heildaratlit viðvíkjandi:

1. hvussu tilfar úr tunlinum kann beinast burtur ella verða eitt tilfeingi í øðrum verkætlanum,
2. hvussu loysnin er háttað vegatekniskt í mun til normar og krøv,
3. hvussu loysnin ger seg ikki inn á umhvørvið í nærøkinum,
4. hvørja ávirkan, fylgjur av loysnini hava á umhvørvið aðrastaðni.

Í hesum sambandi hava Tórshavnar kommuna og P/F Articon fyrireikað sáttmála um heildararbeiðstøku við grundarlagi í tilboðnum í alternativi 2 og seinni tilboðstillagingum. Hesin sáttmáli fevnir tá um at gera lidnan veg millum rundkoyringina á Hvítanesi og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð. Hetta er ein samlaður teinur á umleið 6.300 m, har av umleið 1.760 m eru tunnil. Tunnilin kemur at ganga millum Villingardalsvegin, undir Brúnni, til eitt øki millum ríðihøllina hjá Berg hestum og Hotel Føroyar. Her kemur tunnilin út undir ríðibreytini, soleiðis, at hendan verður varðveitt. Sáttmálaupphæddin fyri hesa heildarveiting er kr. 305.015.316,- umframt mvg. Íroknað kommunalt mvg er upphæddin kr. 324.078.773,25.

Ein partur av vegastrekkinum er vegur, sum P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil (EST) upprunaliga skuldu lata gera. Hetta snýr seg um teir fyrstu uml. 1.000 metrarnar av vegnum frá rundkoyringini á Hvítanesi. Í sambandi við at Tórshavnar kommuna skal gera vinnuútstykking á Ovara hjalla, er vorðið greitt, at hetta vegastrekkið við at verða flutt longur oman móti hamarinum gevur eina betri nýtslu av økinum, sum verður lagt av til vinnuútstykking. Tí er fyrireikað avtala við EST um, at Tórshavnar kommuna yvirtekur hetta arbeiðið og sjálvan vegin frá felagnum fyri eina samsýning á kr. 12.923.588,-, sum EST rindar Tórshavnar kommunu. Henda upphædd eigur at verða flutt inn undir L81037 Innkomuvegur, undir deild 8175 Vegir (íløgur)

Eisini er avtala gjørd við EST um keyp av gróti úr Sandoyartunlinum, sum Tórshavnar kommuna m.a. kann nýta í verkætlanini at gera innkomuvegin, vinnuútstykking á Ovara hjalla og møguligum øðrum verkætlanum. Talan er um umleið 200.000 m³ av gróti í føstum máti. Kostnaðurin fyri hetta grót er kr. 10.800.000,-, har av Tórshavnar kommuna skal gjalda EST kr. 5.000.000,- við undirskrift av avtaluni og

tær seinastu 5.800.000,- við ársenda 2024. Gjaldið við undirskrift verður tikið av løgukonto L69004 Vinnuútstykking á Ovara hjalla, undir deild 6975, Byggibúning ídnaðarøki (íløgur), sum útlegg.

Áður eru játtaðar kr. 28.924.136,- til projektering og gerð av forkanningum og arbeiðsvegi í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin. Hetta er áður fíggjað og ikki partur av hesum sáttmálanum við Articon.

Sambært avtalu milum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu verður landið at stuðla verkætlanini við kr. 110.000.000,-. Henda avtala er grundað á projekteringar av linjuføringum, íbindingum, rundkoyringum v.m., sum landsverk hevur latið gjørt frammanundan, og sum er í samsvar við samferðsluætlanina hjá landinum 2018-2030. Tórshavnar kommuna hevur, eftir at verkætlanin varð latin til kommununa at skipa, ynskt at broyta verkætlanina, so atlit til framtíðarverkætlanir hjá landinum, sum Tórshavnar kommuna ikki væntar verða framdar í næstum, verða útsett í avtaluni. Sambært verandi avtalu eiga kr. 53.600.000,- at verða útgoldnar pr. 2023.

Sáttmálin fyri framman við P/F Articon er somuleiðis grundaður á, at hesi atlit verða útsett. Fyri at tryggja, at stuðulin frá landinum hóast broytingarnar framhaldandi verður veittur kommununi, varð broytingaruppskot borðið í Løgtingið í november 2022, men bleiv tað ikki viðgjørt vegna løgtingsvalið í desember 2022. Eftir ætlan verður uppskotið við broytingum tillagað verkætlanini fyri framman og lagt aftur fyri Løgtingið, tá tað kemur saman aftur.

Á fíggjarætlan Tórshavnar kommunu fyri 2023 eru avsettar kr. 108.000.000 í úttreiðslujáttan og kr. 33.500.000 sum inntøkujáttan frá stuðlinum frá landinum.

Henda upphædd verður tó reguleráð í mun til ta framdrift, sum verkætlanin kemur at hava í 2023, sambært projekteringini og tilhoyrandi gjaldsætlanini, sum Articon skal undir at gera.

**Skjøl**
Skjølini verða løgd fram á nevndarfundinum.

### Fíggjarlig viðurskifti

### Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 108.000.000,- |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 324.078.773,25 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1.500.000 |

### Tilmæli
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til:

1. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Articon um heildararbeiðstøku við føstum prísi at gera vegastrekkið millum rundkoyringina á Hvítanesi og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð íroknað tunnil undir Húsareyni

áljóðandi kr. 324.078.773,25 íroknað mvg. Tryggjast skal, at stuðulin frá landinum áljóðandi kr. 110.000.000,- kann veitast verkætlanini.

2. at arbeiðið sambært sáttmálanum við P/F Articon í 2023 verður fíggjað við kr. 108.000.000,- av løgukarminum LK 81037 Innkomuvegur undir 8175 Vegir (íløgur), og restin av játtanini verður at fíggja í 2024.
3. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil um yvirtøku av vegastrekki á Ovara hjalla, og at inntøkan frá hesari yvirtøku kr. 12.923.588,- verður flutt á L81037 Innkomuvegur undir deild 8175 Vegir (íløgur).
4. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil um keyp av gróti frá sandoyartunlinum fyri eina upphædd á kr. 10.800.000,-, har av kr. 5.000.000 verða goldnar við undirskrift. Hetta verður at fíggja við útleggi av konto L69004 Vinnuútstykking Ovari hjalli undir deild 6975 Byggibúning ídnaðarøkir (íløgur).
   at málið verður beint víðari í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. desember 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 21. desember 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, einari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Kristian Martin Skála og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddi :Elsa Berg.

Blankt atkvøddu: Ruth Vang og Turið Horn.

**Ískoyti:**
Í hjáverandi ískoyti verða hesi viðurskifti tikin til viðgerðar:

- **Byggiharraútreiðslur**: Tann 5. juni 2023 var mál 23/02456 «Fígging til avleiddar útreiðslur í samband við heildarætlan, gerð av tunli og innkomuvegi» til viðgerðar í teknisku nevnd, og málið varð samtykt. Her var tilmælið soljóðandi:
  - Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
    - at játta kr. 9.000.000 til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin og kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.
    - at peningurin verður játtaður av løgukarmi LK81037 Innkomuvegur til løgujáttan L81037 Innkomuvegur
    - At játtaðar verða kr. 12.200.000,- sum eykajáttan til løgukarmin LK 81037 Innkomuvegur.
    - At málið verður beint víðari umvegis fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir

  Vegna samanhangin við samlaðu játtina til innkomuvegin verður hetta málið tikið til umrøðu í hjáverandi máli og hiðani beint víðari til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina. Niðanfyri verða eisini tillagingar til hesa viðgerð lýstar, at taka støðu til, sum umfata átroðkandi viðurskiftir í sambandi við lendisræði. Hetta hevur týdning fyri framdriftina av arbeiðinum, soleiðis at tíðarætlanin heldur.

- **Regulering av játtan:** Í ískoytinum, sum varð samtykt í býráðnum tann 21. desember 2022 varð samtykt at gera sáttmála við P/F Articon um heildararbeiðstøku fyri tkr. 324.078. Í somu viðgerð varð samtykt, at arbeiðið í 2023 skuldi fíggjast við tkr. 108.000 av løgukarminum LK81037 Innkomuvegur. Í málslýsingini

veður sagt: «Henda upphædd verður tó regulerað í mun til ta framdrift, sum verkætlanin kemur at hava í 2023, sambært projekteringini og tilhoyrandi gjaldsætlanini, sum Articon skal undir at gera.». Í apríl 2023 hevur umsitingin fingið latið prosjekt, tíðar- og gjaldsætlan frá P/F Articon. Her kann staðfestast, at fyritøkan vil gera arbeiðið skjótari enn áður lagt upp fyri. Tíðarætlanin staðfestir, at arbeiðið skal verða liðugt 1. november 2024. Sostatt verður sáttmálaupphæddin avgreidd innan 21 mánaðir, har størsti parturin liggur í 2023, tá stóra spreingiarbeiðið í tunlinum verður framt. Tí verður, um framdriftin av verkætlanini skal haldast, neyðugt at útvega størri játtan fyri 2023, enn áður samtykt.

Afturat byggiharraútreiðslunum, sum blivu samtyktar á fundi í teknisku nevnd tann 5. juni, hevur arbeiðstakarin biðið um, at lendið millum ríðibreytina, matrikul 1175h (Hotel Føroyar) og matrikul 1160a (Flatnahagin) verður tøkt í sambandi við grevstrararbeiði til inntakið av tunlinum í Marknagili. Her er talan um 15.000 m² í matr. 1175a (Húsahagi). Fyritøkan hevur tørv á hesum lendinum til atkomu og byggipláss. Samlað verður í fyrstu atløgu biðið um at leiga alt lendið, og verður tað mett, at hetta kann gerast fyri kostnað á kr. 150.000,-. Seinni í verkætlanini verður eisini neyðugt at keypa nakað av hesum lendinum (uml. 11.000 m²), men verður hetta lagt fram, tá hetta gerst aktuelt.

Samanlagt verður tí tørvur á, at játtaðar verða tkr. 9.150 til hetta. Framhaldandi er tørvur á kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.

Eisini skal herumframt vísast á, at í sambandi við heildararbeiðstøkur kunnu javnan uppstanda støður, sum gera, at byggiánarin skal taka á seg óvæntaðar útreiðslur av ymiskum slag, sum ikki eru íroknaðar sjálvan sáttmálan um heildararbeiðstøkuna. Ofta er skotbráið fyri hesum útreiðslum stutt, og drál kann viðføra seinkingar og eykarokningar. Tað er trupult at meta um hesar útreiðslur frammanundan, men vanliga verða uml 20% sett av til hetta endamál. Av tí at talan er um heildararbeiðstøku, metir umsitingin, at í miðal uml. 1 mió. kr. um mánaðan er hóskandi. Hetta svarar til áleið 6,8% av sáttmálaupphæddini, ella 22 mió kr í alt (14.270.000 fyri 2023). Hetta er upphædd, sum hædd eigur at verða tikin fyri, um fíggjarætlanin fyri 2023 skal hækkast við lántøku í sambandi við ta frá arbeiðstakaranum upplýstu framdriftina í verkætlanini í mun til uppruna metingarnar.

Í sambandi við reguleringarnar av játtanini í mun til virksemið á verkætlanini skal vísast á, at samlaði tørvurin fyri verkætlanina í 2023 er kr. 238.444.000, tá er ikki roknað við, at sambært fíggjarlóg landsins fyri 2023 eru frá landinum settar kr. 23.000.000 av til fíggjarligan stuðul til verkætlanina. Fyri árini 2024, 2025 og 2026 eru avsettar ávíkavist 31 mió. kr., 36 mió. kr. og 20. mió. kr í stuðli frá landinum. Á fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu eru fyri 2023 avsettar kr. 108.000.000,-. Hetta merkir, at íroknað stuðul frá landinum resta kr. 107.440.000 í í mun til tørvin í 2023, sum er kr. 215.440.000,-. Um stuðulin frá landinum ikki er íroknaður er upphæddin kr. 130.440.000,-. Mett verður, at neyðugt er, at kommunan tryggjar sær, at øll upphæddin kr. 130.440.000,- er tøk, fyri at vandi ikki er fyri, at arbeiðið steðgar vegna væntandi gjaldføri.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Eykajáttan | 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | | 130.440.000 |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 130.440.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** |
|---|

| | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 390.943.909,25 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At samtyktin hjá teknisku nevnd frá 5. juni 2023 verður trekt aftur.
- At fíggjarætlanin fyri 2023 verður hækkað kr. 130.440.000,- við eykajáttan, sum verður fíggjað við lántøku, og henda hækking verður veitt løgukarminum LK81037 innkomuvegur undir deild 8175 Vegir (íløgur).
- At játta kr. 9.150.000 til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin og kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.
- At játta kr. 22.000.000 til óvæntaðar byggiharraútreiðslur, harav kr. 14.270.000 verða veittar av LK81037 Innkomuvegur í 2023 á L81037 Innkomuvegur og kr. 7.830.000 verða veittar í 2024 av LK81037 Innkomuvegur
- At málið verður beint víðari umvegis fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir.

**Tekniska nevnd 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

Málið samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongar blankari atkvøðu við aðru viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Anja Hartmann Wardum, Turid Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti**
Arbeiðið við innkomuvegnum gongur væl, og skjótt skal arbeiðstakarin undir at byrja arbeiðið at gera íbindingina í Marknagilsvegin. Av tí at íbindingin í Marknagilsvegin er ávirkað av íbindingunum í Dánjalstrøð, Kerjagøtu og íbindingunum íroknað ferðsluljós við Skúlaheimið, Glasir og Skúlan á Fløtum, var hendan íbindingin ikki liðugt prosjekterað, áðrenn sáttmálin um innkomuvegin varð undirskrivaður.

Nú er íbindingin liðugt prosjekterað, og Articon hevur bjóðað sær at gera arbeiðið fyri ein meirkostnað á 19,4 mió. kr. Sí tekning j. nr. 21/02196-1297.

Umsitingin hevur gjøgnumgingið tilboðið frá Articon, sí j.nr.: 21/02196-1298, og metir, at kostnaðurin er í samsvari við teir eindarkostnaðir, upprunaliga tilboðið hevði. Aftrat kemur MVG, indeks og óvist, sum er 3 mió. kr. Samlað upphædd er sostatt 22,4 mió kr., sum verður fíggjað við lántøku.

**Skjøl**
21/02196-1297 D1042 Íbinding, Marknagilsvegur Planur og longdarskurður (1)
21/02196-1298 Tilboð 23-11-2023 Marknagilskrossurin.pdf

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 22,4 mió. kr. sum eykajáttan fíggjað við lántøku til løgukonto L81037, og heimila umsitingini at gera sáttmála við Articon um gerð av íbinding í Marknagil, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**:
Arbeiðið at gera innkomuvegin líður móti endanum. Í samráðingunum um sáttmálan við arbeiðstakaran um heildararbeiðstøku at gera innkomuvegin vórðu niðanfyri standandi arbeiðir ikki tikin við í fyrstu atløgu:

- Slitlag
- Gøtuljós
- Rundkoyring við Hotel Føroyar (bert spreingjast fyri henni)
- Stríping

Orsøkin til, at hesar arbeiðstøkur blivu tiknar úr sáttmálanum, var fyri slitlag og gøtuljós, at arbeiðstøkurnar vórðu mettar at kunna gerðast minni kostnaðarmiklar, tá betri greiða kundi fáast á vavinum av teimum seinni í verkætlanartilgongdini. Fyri strípingina var orsøkin, at uttan slitlag er stríping ikki aktuel. Tá tað umræður rundkoyringina, varð í fyrstu atløgu, við støði í táverandi vitan, mett, at ein trýbeint rundkoyring ikki fór at vera betri enn eitt T-vegamót.

Nú arbeiðið líður móti endanum kunnu hesi viðurskifti staðfestast – at rundkoyringin við Hotel Føroyar verður av ráðgeva mett neyðug, fyri at ferðslan í millum Oyggjarvegin og Innkomuvegin verður avviklað forsvarliga. Broytta støðan er íkomin, tí at endaligu greiningarnar av ferðsluni, nú vegamótið millum innkomuvegin og Marknagilsvegin er prosjekterað, vísa, at eitt T-vegamót millum innkomuvegin og Oyggjarvegin kann fáa uppstúving fyri vinstrasving bæði av og á innkomuvegin. Arbeiðstakarin hevur latið inn tilboð upp á at gera rundkoyringina lidna fyri kr. 3.500.000,-.

Arbeiðstakarin hevur veitt tilboð upp á at asfaltera slitlag. Givið er tilboð upp á 5 cm ella 4 cm tjúkd. 5 cm slitlag kann samanberast við kostnaðin, sum var í upprunatilboðnum upp á heildararbeiðstøku. Nýggja tilboðið fyri 5 cm er áljóðandi kr. 6.959.700,- fyri innkomuvegin og tunnilin í mun til kr. 7.264.858 í upprunatilboðnum. Her er talan um sparing á kr. 305.158. Fyri 4 cm slitlag er tilboðið áljóðandi kr.

5.942.200,-, og er talan tá um eina sparing á kr. 1.322.658,-. Tað skal kortini gerast vart við, at eitt 4 cm tjúkt slitlag ikki heldur eins leingi og eitt 5 cm tjúkt lag. Men við einum 6 cm tjúkkum berilagið verður mett, at 4 cm slitlag er nøktandi. Avtalað er gjørd við arbeiðstakaran um at um tikið verður av 4 cm slitlagið verður berilagið gjørt 6 cm tjúkt fyri sama kostna.

Rakstrarstovnurin hjá kommununi metir, at innkomuvegurin og tunnilin kunnu uppmerkjast fyri ein samlaðan kostnað á uml. kr. 650.000,-.

Í sambandi við gøtuljós er tilboð komið frá útlendskum veitara upp á LED-armaturir og stýriskipan. Afturat hesum skulu veitast mastrar, sikringsinnsatsir, káplar og uppsetan. Fyri innkomuvegin og tunnil er kostnaðurin mettur til kr. 2.005.121,-. Umsitingin er enn í ferð við at heinta tilboð inn, tí kann endaligi kostnaðurin gerast enn lægri.

Samanlagt er tí tørvur á játtan til hesar arbeiðstøkurnar, sum í fyrstu atløgu blivu tiknar úr heildararbeiðstøkuni at gera innkomuvegin og tunnil á samlað kr. 12.094.000,- umframt mvg. Tilsamans kr. 12.849.000 við kommunalum mvg.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐

Eykajáttan ☒

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verk ætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81043 | Parkeringstunnil | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 2.100.000 |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 1.300.000 |
| 8175 | L81042 | Fígging til smærri vegaverkætlanir | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 1.050.000 |
| | | Meirinntøkur fyri 2024 | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 8.399.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

## Tilmæli

Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- játtaðar verða kr. 2,1 mió av løgukarmi LK81043 Parkeringstunnil, konta 8175 Vegir (íløgur)
- játtaðar verða kr. 1,3 mió av løgukarmi LK81999 Vegaverkætlanir, konta 8175,
- játtaðar verða kr. 1,05 mió av L81042 Fígging til smærri vegaverkætlanir, konta 8175
- játtaðar verða kr. 8,399 mió av meirinntøkum fyri 2024
- játtaðar verða tilsamans kr. 12,849 mió – inn á verkætlanina L81037 Innkomuvegur
- heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakara um liðugtgerð av rundkoyring við Hotel Føroyar fyri kr. 3,5 mió umframt mvg.
- heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakara um asfaltering av slitlagi á innkomuvegin og tunnilin fyri kr. 5,95 mió umframt mvg.

- heimilað verður umsitingini at keypa inn tilfar til og avmerkja innkomuvegin og tunnilin fyri kr. 650.000 mió umframt mvg.
- heimilað verður umsitingini at keypa inn tilfar og seta upp gøtuljós fram við innkomuvegnum fyri kr. 2,01 mió umframt mvg,

og beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um tíðarætlan og uppskot til avtalu um liðugtgerð av innkomuvegnum við avleiddum verkætlanum.

**Tekniska nevnd 25. november 2024:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

## 313/24 Innkomuvegur – íbindingar o.a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.10.2023 | 51/23 | 23/03480-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.10.2023 | 293/23 | 23/03480-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 263/23 | 23/03480-1 |
| 4 Býráðsfundur | 09.11.2023 | 268/23 | 23/03480-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 07.10.2024 | 62/24 | 23/03480-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 23.10.2024 | 259/24 | 23/03480-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 250/24 | 23/03480-1 |
| 8 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 313/24 | 23/03480-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at sáttmáli er gjørdur við P/F Articon um heildararbeiðstøku av innkomuvegnum millum rundkoyringina við Hvítanes og Marknagil. Í hesum sáttmála eru optiónir til at gera rundkoyringar við Niðarahjalla og í Marknagili. Fyritøkan er somuleiðis biðin um tilboð um heildararbeiðstøkur av íbindingarvegum til Oyggjarvegin, Sunds- og Flatarvegin, Klingruvegin og við nýggju Føroya Arena.

**Lýsing av málinum**
P/F Articon hevur latið Tórshavnar kommunu tilboð um at gera hesi annleggsarbeiðir við sambandi til innkomuvegin sum heildararbeiðstøku:

- Íbindingarveg millum rundkoyringina í Marknagili og Oyggjarvegin
- Íbindingarvegir millum innkomuvegin og Sundsvegin og Flatarvegin, íroknað brúgv um Hoydalsá.
- Íbindingarvegir millum innkomuvegin og Klingruvegin.
- Íbindingarveg millum innkomuvegin og Føroya Arena.
- Rundkoyring á Niðarahjalla

Hesar íbindingarnar tryggja, at innkomuvegurin eisini kemur at avlasta ferðsluna lokalt í Hoyvík, á Ternuryggi og Villingardalsvegnum.

Samlaða upphæddin fyri hesar heildararbeiðstøkur er áljóðandi kr. 72.583.169,-

Íroknað hetta tilboð eru allir umrøddir íbindingarvegir, bygdir upp eftir galdandi normum. Tó eru hesir partar ikki íroknaðir:

- Slitlag (4 cm)
- Ljósmastrar og armatur

Hesi verða veitt eftirfylgjandi. Mettur kostnaður av hesum veitingum er uml. 5 mió kr.

P/F Articon upplýsir í sínum tilboðið, at arbeiðið kann verða liðugt í november 2024. Fyritøkan upplýsir, at gjaldsætlanin fyri verkætlanina er, at kr. 25.000.000,- verða goldnar í 2023 og kr. 47.583.169 í 2024.

Sostatt er tørvur á kr. 25.000.000 í 2023 og kr 48.000.000 í 2024. Tørvurin í 2023 er at rokna sum hækking av fíggjarætlanini fyri 2023.

Fíggingin av hesum íbindingarvegum verður tengd at teimum inntøkum, sum eru í sambandi við verkætlanir, ið eru knýttar at innkomuvegnum og her umrøddu íbindingunum.

Fyri at gera alla verkætlanina við innkomuvegnum og íbindingarvegum lidna krevst, at tikið verður av optiónum í sáttmálanum um innkomuvegin:

1. Rundkoyring í Marknagili (optión kr. 6.171.000,-)
2. Íbinding í Marknagilsvegin (tilboð/kostnaður ikki endaligur)

Hesi arbeiði eru ikki við í hjáverandi tilboði frá P/F Articon.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 143 frá 4. november 2021 um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Víst verður til mál 21/02196 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK – innkomuveg og mál 22/01377 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/03480-2 ìbindingar innkomuvegur 23-10-2023 - Rundkoyring á Niðarahjalla íroknað

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | x | x | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 8175 | | Innkomuvegur – íbindingar | Ja |

| Upphædd |
|---|
| 80.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 80.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 600.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

- Kr. 73.000.000,- verða játtaðar sum eykajáttan til heildararbeiðstøku av teimum í málslýsingini nevndu íbindingum, rundkoyringum og ferðslustýringsloysnum.

- Heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við P/F Articon um hesar heildararbeiðstøkur innan fyri omanfyri nevndu upphædd.
- Játtaðar verða 7.000.000,- til byggiharraútreiðslur í sambandi við heildararbeiðstøkuna.
- Omanfyri nevndu játtanir verða játtaðar sum eykajáttan og fíggjaðar við lántøku.
- At fíggjarætlanin fyri 2023 verður hækkað við kr. 25.000.000 og írestandi kr. 58.000.000 verða innihildnar í fíggjarætlanini fyri 2024.
- Málið verður beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri viðmerking, at fíggingin av hesum íbindingarvegum verður tengd at teimum inntøkum, sum eru í sambandi við verkætlanir, ið eru knýttar at innkomuvegnum og her umrøddu íbindingunum.

Málið beint í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 09. november 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**:
Arbeiðið at gera íbindingarvegirnar til innkomuvegin líður móti endanum. Í samráðingunum um sáttmálan við arbeiðstakaran um heildararbeiðstøku at gera innkomuvegin vórðu niðanfyri standandi arbeiðir ikki tikin við í fyrstu atløgu:

- Slitlag
- Gøtuljós
- Stríping

Orsøkin til, at hesar arbeiðstøkur blivu tiknar úr sáttmálanum, var fyri slitlag og gøtuljós, at arbeiðstøkurnar vórðu mettar at kunna gerðast minni kostnaðarmiklar, tá betri greiða kundi fáast á vavinum av teimum seinni í verkætlanartilgongdini. Fyri strípingina var orsøkin, at uttan slitlag er stríping ikki aktuel.

Arbeiðstakarin hevur veitt tilboð upp á at asfaltera slitlagið á íbindingarvegunum til innkomuvegin. Givið er tilboð upp á 5 cm ella 4 cm tjúkd. Tilboðið er áljóðandi kr. 3.653.501,- ávikavíst kr. 3.119.363,-. Tað skal kortini gerast vart við, at eitt 4 cm tjúkt slitlag ikki heldur eins leingi og eitt 5 cm tjúkt lag. Avtalað er gjørd við arbeiðstakaran um at berilag verður asfalterað í 6 cm tjúkd um slitlag verður 4 cm. Tá er 4 cm slitlag nøktandi.

Rakstrarstovnurin hjá kommununi metir, at íbindingarvegirnir til innkokmuvegin kunnu uppmerkjast fyri ein samlaðan kostnað á uml. kr. 355.000,-.

Í sambandi við gøtuljós er tilboð komið frá útlendskum veitara upp á LED-armaturir og stýriskipan. Afturat hesum skulu veitast mastrar, sikringsinnsatsir, káplar og uppsetan. Fyri íbindingarvegirnar til innkomuvegin er kostnaðurin mettur til kr. 1.532.751,-. Umsitingin er enn í ferð við at heinta tilboð inn, tí kann endaligi kostnaðurin gerast enn lægri.

Samanlagt er tí tørvur á játtan til hesar arbeiðstøkurnar, sum í fyrstu atløgu blivu tiknar úr heildararbeiðstøkuni at gera innkomuvegin og tunnil á samlað kr. 5.006.050,- umframt mvg. Tilsamans kr. 5.318.928,- við kommunalum mvg.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81054 | Innkomuvegur, íbinding | 8175 | L81054 | Innkomuvegur – íbindingar o.a. | | 3.000.000 |
| | | Meirinntøkur fyri 2024 | 8175 | L81054 | Innkomuvegur – íbindingar o.a. | | 2.319.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til, at:
- játtaðar verða kr. 3,0 mió av løgukarmi LK81054 Innkomuvegur, Íbinding konta 8175 Vegir (íløgur)
- játtaðar verða kr. 2,32 mió av meirinntøkum fyri 2024
- játtaðar verða tilsamans kr. 5,32 mió – inn á verkætlanina L81054 Innkomuvegur – íbindingar o.a.
- heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakara um asfaltering av slitlagi á íbindingarvegunum til innkomuvegin fyri kr. 3,12 mió umframt mvg
- heimilað verður umsitingini at keypa inn tilfar til og avmerkja íbindingarvegirnar til innkomuvegin fyri kr. 355.000 umframt mvg
- heimilað verður umsitingini at keypa inn tilfar og seta upp gøtuljós fram við íbindingarvegunum til innkomuvegin fyri kr 1,54 mió umframt mvg,

og beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

# 314/24 Fríðkan av bygdunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 138/23 | 23/03134-5 |
| 2 Hvítanesnevndin | 16.10.2023 | 3/23 | 23/03134-5 |
| 3 Hvítanesnevndin | 04.11.2024 | 4/24 | 23/03134-5 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 25.11.2024 | 175/24 | 23/03134-5 |
| 5 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 314/24 | 23/03134-5 |

**Upprunin til málið**
Við játtanini *Fríðkan av bygdunum*, er politisk avgerð tikin um at raðfesta bygdirnar hægri.

**Lýsing av málinum**
Fíggjarætlanin fyri játtanina *Fríðkan av bygdunum* er hendan:

Játtan 2023: 1.000.000 kr
Avlop 2022: 1.680.741 kr
Í alt at raðfesta: 2.680.741 kr

Av játtanini eru 140.000 kr settar av til átøk í Hvítanesi í 2023. Hetta fevnir um at gera eitt dyppihús og heildarætlan fyri øki kring skúlan. Umsitingin hevur havt fund við staðbundnu nevndina, ið legði ynski fram um at fáa hesi átøk løgd afturat á raðfestingarlistan:

- Gróðurseting fram við gøtuni oman í bygdina
- Kunnandi skelting
- Borð og beinkir uttan fyri dyppihúsið
- Sum heild meira viðlíkahald og meira fríðkan

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Status átøk:**
Dyppihúsið er væl ávegis, og verður sett upp í næstum. Heildarætlanin verður sett í gongd nú.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/00331, Fríðkan av bygdunum

**Skjøl:**
Skjal nr. 23/03134 (fundarfrágreiðing frá fundinum við staðbundnu nevnd)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

(Fíggjarlig viðurskifti í málinum verða viðgjørd undir Fríðkan av bygdunum mál nr. 22/00331)

**Tilmæli:**
Til kunningar í byggi- og býarskipanarnevndini og staðbundnu nevndini fyri Hvítanes.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Kunnað varð um málið.

**Hvítanesnevndin 16. oktober 2023:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**

**Átaksætlan**
Átaksætlanin fyri Hvítanes byggir á ynskir frá staðbundnu nevnd, um at fríðka um í bygdini. Ætlanin hevur til endamáls at savna bygdina og at skapa trivnað millum bygdafólkið.

Ætlanin er býtt í trý økir, har ynski er at raðfesta øki eitt sum tað fyrsta. Ætlanin er at útføra arbeiðið í øki eitt, í tveimum til trimum stigum.

**Lívdarlund við Bygdarhúsið, øki 1**
Við gamla skúlan skal vera møguligt hjá teimum í bygdini at hava mentanarlig tiltøk, uppihald og spøl.

Á sjálvum fótbóltsvøllinum skal vera møguligt at seta pall upp til ymisk endamál.

Lendið vestan fyri vøllin skal gerast til sitipláss, sum eitt amfiteatur, og í bønum kunnu børnini klintra við reipi.

Økið rundanum vøllin verður lagt við flísum, og borð og benkur vera til uppihald.

Fyri at skapa lívd fyri vindi verður plantað ein lívdargirðing rundanum økið. Har verður ein lívdarkrókur til uppihald og eitt lítið spæliøki við sandkassa til tey smáu.

**Alment miðsavnandi øki við Mølina, øki 2**
Fríøkið við Mølina skal bæði vera til uppihald og spæl, og somuleiðis til miðling og parkering nærhendis.

Fyri at ætlanin skal kunna lata seg gera, er neyðugt at fáa í lag makaskifti í millum part av matr.nr. 99a og 117.

Í dag er nakað knortlut at koma oman í fjøruna, so tí vera tvær leiðir gjørdar, ein frá høvuðsvegnum og ein frá parkeringsplássinum.

Her verður eitt lítið uppihaldstað, har fólk kunna sita og njóta fjøruna. Eisini skal ein rás gerast oman til sandin.

Møguleiki er eisini fyri hitapotti og saunasmáttu í økinum og baðibrúgv út á sjógv.

Hóast fólk í dag svimja við støðna, er betur sólargangur hesumegin fjøruna og tí kanska betur egnað til endamálið, tá kloakkviðurskiftini eru komin í rætt lag.

Rundan um uppihaldsøkið skal plantast ein lívdargirðing, ið skal bróta tann ringasta vindin.

**Miðling á leiðini út á nesið, øki 3**
Við gøtuna út á Nesið verður ein søgulig kunning um lendi og serligan vøkstur, og møguleiki at parkera verður eisini nærhendis.

**Skjøl:**
Heildarætlanin er lýst í viðfestu fílu, *Átaksætlan fyri Hvítanes, skjal nr. 23/03134-8.*

**Játtan:**
Av teimum 140.000 kr, sum upprunaliga vórðu settar av til átøk á Hvítanesi, eru 13.000 kr eftir at raðfesta.

Fyri at seta gongd á Lívdarlundina við bygdarhúsið verður mælt til at 200.000 kr. av L62052, Fríðkan av bygdunum, verður sett av til arbeiðið í 2025.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At fara undir samráðingar við eigaran av matr.nr. 99a, soleiðis at økið í framtíðini kann gerast til eitt miðsavnandi øki í bygdini
- At farið verður undir Lívdarlundina við bygdahúsið í 2025.
- At málið verður beint í staðbundnu nevndina til kunningar.

**Hvítanesnevndin 04. november 2024:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 25. november 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 12. desember 2024: Einmælt samtykt.**

# 315/24 Tórshavnar havn : Reglugerð fyri skúrar til smábátar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 26.11.2024 | 41/24 | 24/08944-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 04.12.2024 | 295/24 | 24/08944-2 |
| 3 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 315/24 | 24/08944-2 |

**Upprunin til málið**
Tørvur á reglugerð fyri skúrleigu.

**Lýsing av málinum**
Nýggju skúrarnir í Álakeri eru um at vera lidnir og skulu skjótt leigast út. Tórshavnar havn hevur tí gjørt eitt uppskot til "Reglugerð fyri skúrar til smábátar", ið er soljóðandi:

*"Reglugerð fyri skúrar til smábátar*

*§ 1*
*Reglugerðin er galdandi fyri skúrar til smábátar, sum Tórshavnar havn (Th), leigar út til bátaeigarar, ið hava bátapláss hjá Tórshavnar kommunu.*

*§ 2*
*Skúrurin kann einans nýtast til goymslu av reiðskapi í.s.v bátarakstur, hagreiðing av veiðu.*
*Bátaeigarin kann einans broyta skúrin innan og soleiðis innrætta skúrin eftir egnum ynski.*
*Um ætlanin er at klæða og/ella isolera loftið, skal hetta gerast soleiðis, at luftskiftið í skúrinum ikki verður forðað.*
*Týðandi er, at tosað verður við grannarnar, tá nakað verður fest í síðurnar, tí skrúvur o.a. kunnu røkka inn í grannaskúrin.*
*Somuleiðis skal ansast eftir, at útsíðurnar ikki verða skalaðar, um eitthvørt festi verður sett í innanveggja.*
*Allar broytingar og ábøtur eru fyri leigarans rokning og verða ikki endurgoldar, um leigarin sigur upp, ella av øðrum ávum, missir nýtslurættin til skúrin.*

*§ 3*
*Bátaeigarin hevur skyldu til at halda økið rundan um skúrin reint og ruddiligt alla tíðina.*
*Um hetta ikki verður gjørt á nøktandi hátt, kann Th rudda upp fyri eigarans rokning og ábyrgd.*
*Bátaeigarin hevur sjálvur ábygd av vanligum viðlíkahaldi, so sum ljósperur, vatnkrana o.a.*

*§ 4*
*Um bátaeigarin uppsigur bátaplássið, missir hann harvið eisini rættin at hava skúrin, sum tá verður latin øðrum umsøkjara.*

*§ 5*
*Rætturin at leiga skúr, kann latast víðari á sama hátt, sum er galdandi í "Reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu".*
*Hetta merkir, at um bátaeigari letur bátaplássið víðari, skal skúrurin eisini antin latast víðari, ella latast inn til Th og ávíkavist umsókn um yvirtøku, ella uppsøgn, skal sendast/latast inn til Th.*

*§ 6*
*Leigan er kr. 2.800 fyri skúrar á 4 m2, og kr. 4.200 fyri skúrar á 6 m2 um árið, býtt í 2 gjøld.*
*Umframt leigu, skal eisini gjaldast fyri egna elnýtslu.*
*Leigan verður goldin samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi leigugjøldum fyri bátapláss og skúrar í Tórshavnar kommunu.*

*Leigukostnaðurin fyri skúrarnar verður prísjavnaður árliga, eftir sama leisti sum bátaplássini í Tórshavnar kommunu.*

*§ 7*

*Henda reglugerð er partur av "Reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu", og kunnu brot á hesa reglugerð viðføra, at nýtslurætturin til bátaplássið verður mistur.*
*Reglugerðin kemur í gildi 1. januar 2025."*

Reglugerðin hevur í § 6 áseting um leigukostnað fyri skúrarnar. Leigukostnaðurin er ásettur til 700 kr/m2/ár, sum fyri 4 m2 skúrarnar gevur eina leigu á 2800 kr/ár, og fyri 6 m2 skúrarnar gevur eina leigu á 4200 kr/ár. Eisini er ásett, at leigan verður prístalsregulerað eftir sama leisti sum gjøldini fyri bátapláss.

Tórshavar havn leigar eisini út 51 skúrar, sum Argja kommunu upprunaliga hevur bygt við bátahylin á Argjum. Leigukostnaðurin fyri hesar skúrarnar hevur verið 1580 kr/ár í mong ár (minst 20 ár, helst longur). Hesir skúrar verða tí eisini fevndir av nýggju reglugerðini og broyttu prísunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
J.nr. 24/01925 : Goymsluskúrar í Álakeri

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at taka undir við reglugerðini fyri skúrar til smábátar, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 26. november 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

# 316/24 Lántøka og gjaldføri 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 147/23 | 23/02523-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 204/23 | 23/02523-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 177/23 | 23/02523-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.06.2024 | 189/24 | 23/02523-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 12.12.2024 | 307/24 | 23/02523-1 |
| 6 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 316/24 | 23/02523-1 |

**Upprunin til málið**
Íløguætlanin hjá hjá Tórshavnar kommunu fyri 2023 er á 319,8 mió. kr. Harav eru 299,8 í Tórshavnar kommunu og 20 mió. kr. íløgur í Tórshavnar havn.

Minninýtsla av íløgum, sum eru í gerð, verða fluttar fram til næsta ár. Íløgujáttanir at flyta fram frá 2022 til 2023 eru 200,5 mió. kr. harav eru 133,4 í Tórshavnar kommunu og 67,1 í Tórshavnar Havn. Samlaða íløgujáttanin við framflytingum verður soleiðis 520,3 mió. kr. Harav eru samlaðu íløgurnar hjá Tórshavnar kommunu, uttan Tórshavnar havn 433,2 mió. kr.

Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast. Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar kommunu í fíggjarætlanini fyri 2023 er 225 mió.kr.

Í fíggjarætlanini fyri 2023 er roknað við eini lántøku á 75 mió. kr. til at fíggja innkomuvegin. Samlaða játtanin til innkomuvegin í 2023 og 2024 er 214 mió. kr. og skulu hesar fíggjast. Kostnaðurin er 324 mió. kr. og stuðulin fá landinum 110 mió. kr.

Í fíggjarætlanini fyri 2020 var roknað við eini lántøku á 57 mió. kr. í sambandi við Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin. Lántøka hevur ikki verið neyðug higartil; men sum framdrátturin er í íløgunum, verður neyðugt við lántøku í 2023.

**Lýsing av málinum**
Gjaldførið í Tórshavnar kommunu eigur altíð at svara til í minsta lagi ein mánaða ella í miðal 8,33% av mettu árligu kommunuskattainntøkunum. Samtyktin er frá fíggjarnevndarfundi 15. februar 2012 og býráðsfundi 23. februar 2012. Fyri 2023 er kommunuskattainntøkan mett til 951 mió.kr, og harvið er roknaða minsta gjaldføri 79 mió.kr.

Við ársbyrjan var gjaldførið 163 mió. kr. Gjaldførið tann 30. apríl var 86 mió. kr. harav vóru 54 mió. kr. lánsbrøv og 32 mió. kr. innistandandi. Fyri at tryggja gjaldførið í árinum verður neyðugt at taka ætlaðu lánini í fíggjarætlanini og at fíggja innkomuvegin. Upptøka av láni í árinum verður soleiðis 271 mió. kr.

Verandi lántøka í tórshavnar kommunu er 228 mió. kr. harav er 220,5 lán hjá Tórshavnar Havn og 7,7 mió. kr. lán hjá Tórshavnar kommunu.

| Lángevari | | Upprunaligt lán tkr. | renta | Gjaldast fyrstu ferð | Afturgjaldstíð | Restskuld |
|---|---|---|---|---|---|---|
| BankNordik | Tórshavnar kommuna | 18.500 | 3 mðr. FOBOR + 1,0% p.a. | 01.10.2014 | 15 ár | 7.706 |
| BankNordik | Tórshavnar havn | 250.000 | Føst renta 2,1% p.a. | 30.09.2019 | 15 ár | 220.540 |

| tilsamans | | | | | | 228.246 |
|---|---|---|---|---|---|---|

Yvirlit yvir lán:

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/02196 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK
23/0151 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Gjaldførisyvirlit: Gjaldføri 2023, apríl – íløgur játtan
Gjaldføri 2023, apríl meting

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Fyri at tryggja gjaldførið restina av 2023, mælir stjórnin til, at kommunan tekur upp ætlaðu lánini uppá 271 mió. kr. og at fíggjarnevndin heimilar umsitingini útvega lánitilboð at leggja fyri nevnd.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum umframt at biðja um eina optión uppá 50 mió. kr.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, taka ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Biði er um lánitilboð, og hevur kommunan fingið tilsøgn um fígging. Víst verður til skjal nr. 23/02523-5 og tilfar í málinum.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at taka av lánitilboðnum á 150 mió. kr. skjal. nr. 23/02523-5. Lánið verður afturgoldið yvir 15 ár til eina fasta rentu. Eisini verður mælt til at hækkað kassakredittin til 100 mió. kr. fyri at tryggja minsta gjaldføri í árinum. Harumframt verður mælt til, at umsitingin far heimild til at útvega írestandi fígging til innkomuvegin tá tørvur er á hesum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Borgarstjórin nágreinaði, at talan er ikki um eykajáttan, og atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian Martin Skála og Súsana Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2024:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið heimild, at útvega fígging til írestandi samtyktu lántøku, tá tørvur er á hesum. Fíggingar møguleikar eru kannaðir, víst verður til skjal nr. 23/02523-14 lýsing av málinum og tilmæli.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla fíggjarnevndini til, at taka undir við tilmælinum, sí tilmæli í skjal nr. 23/02523-14, at taka lán á 150 mió. kr. við eini afturgjaldstíð á 15 ár og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. desember 2024 | Blað nr.: 1329<br>Formansins merki: |

# 317/24 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 47/24 | 24/00061-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 46/24 | 24/00061-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2024 | 79/24 | 24/00061-1 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 69/24 | 24/00061-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 103/24 | 24/00061-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 107/24 | 24/00061-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 145/24 | 24/00061-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 139/24 | 24/00061-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.06.2024 | 191/24 | 24/00061-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 179/24 | 24/00061-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 19.09.2024 | 231/24 | 24/00061-1 |
| 12 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 231/24 | 24/00061-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.10.2024 | 266/24 | 24/00061-1 |
| 14 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 263/24 | 24/00061-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 27.11.2024 | 282/24 | 24/00061-1 |
| 16 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 296/24 | 24/00061-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 12.12.2024 | 308/24 | 24/00061-1 |
| 18 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 317/24 | 24/00061-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2024:** Framlagt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. november 2024:** Framlagt og góðkent.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. desember 2024 | Blað nr.: 1332<br><br>Formansins merki: |

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri november verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2024:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Tikið av skrá.

## 318/24 Ásetan av fundardøgnum fyri býráðið 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 318/24 | 24/08760-1 |

**Málslýsing**
Uppskot frá umsitingini til fundardagar 2025 kl. 16:00 í býráðssalinum:

30. januar
27. februar
27. mars
24. apríl
22. mai
19. juni
18. september
23. oktober
20. november
11. desember

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

## 319/24 Heildarætlan Eystara havnarøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.11.2017 | 57/17 | 17/03628-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 253/18 | 17/03628-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 63/21 | 17/03628-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 26/21 | 17/03628-1 |
| 5 Havnanevndin | 13.04.2021 | 18/21 | 17/03628-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 74/21 | 17/03628-1 |
| 7 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 108/21 | 17/03628-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 258/21 | 17/03628-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 22/22 | 17/03628-1 |
| 10 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 14/22 | 17/03628-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.02.2022 | 12/22 | 17/03628-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 48/22 | 17/03628-1 |
| 13 Havnanevndin | 14.02.2022 | 9/22 | 17/03628-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.02.2022 | 50/22 | 17/03628-1 |
| 15 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 41/22 | 17/03628-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2022 | 210/22 | 17/03628-1 |
| 17 Havnanevndin | 05.12.2022 | 32/22 | 17/03628-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 22/23 | 17/03628-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 44/23 | 17/03628-1 |
| 20 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 48/23 | 17/03628-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 199/23 | 17/03628-1 |
| 22 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 158/23 | 17/03628-1 |
| 23 Havnanevndin | 12.09.2023 | 26/23 | 17/03628-1 |
| 24 Havnanevndin | 16.04.2024 | 17/24 | 17/03628-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 111/24 | 17/03628-1 |
| 26 Fíggjarnevndin | 11.06.2024 | 161/24 | 17/03628-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 20.06.2024 | 182/24 | 17/03628-1 |
| 28 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 157/24 | 17/03628-1 |
| 29 Fíggjarnevndin | 03.07.2024 | 199/24 | 17/03628-1 |
| 30 Býráðsfundur | 03.07.2024 | 190/24 | 17/03628-1 |
| 31 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 319/24 | 17/03628-1 |

**Upprunin til málið:**
Eystara havnarøkið verður víðkað, og tí er tørvur á gera eina ætlan fyri hvussu økið skal skipast. Av tí at útbyggingin ikki verður liðug fyrr enn í 2019, er tørvur á at gera tillagingar á verandi øki beinanvegin. Serliga er tørvur á at gera tillagingar í verandi farstøð.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Uppskot er gjørt til heildarætlan av Eystara havnarøki.

Uppskotið er ein lýsing av framtíðarætlanum fyri Eystara havnarøki, og lýsir verandi viðurskiftir, avbjóðingar og møguleikar.

Uppskotið lýsir verandi viðurskiftir, har undir ymiskleikan í ferðsluni, har stór skip, smábátar, størstu bilarnir og fólk til gongu eru á økinum. Hetta verður framhaldandi veruleiki, og kanska í enn størri mun enn í dag, nú havnarlagið verður víðkað.

Víðari lýsir uppskotið framtíðar menningarmøguleikar, støddir, volumenkanningar, nýggj ferðslumynstur og søgulig sambond, sum kunnu styrkjast millum Skansan, Tinganes og økið inn móti Kongabrúnni.
Til seinast lýsir uppskotið hvussu ferðsla, parkering og avgreiðsla av ferðafólki verður skipað tá útbyggingin av havnarlagnum verður liðug, soleiðis at tann vaksandi ferðingin og flutningurin, kann virka undir tryggum karmum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er avlagt sum B1 havnarøki.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
j.nr. 17/01436 Víðkan av Farstøðini

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Heildarætlan fyri Eystara havnarøki j.nr. 17/03628-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við heildarætlanini fyri Eystara havnarøki.

**Vinnunevndin 06. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og koyra heildarætlanina til almenna kunning og viðmerking.

**Ískoyti – kunna verður um málið.**
Uppskot til heildarætlan fyri Eystara havnarøki sampakkar bæði við Miðbýarætlanina fyri Tórshavnar kommunu og við verandi ætlanir um at útbyggja Tórshavnar havn.

Í miðbýarætlanini eins og í heildarætlanini verður dentur m.a. lagdur á, at eitt øki við Eystaru bryggju verður lagt av til býartætting við eitt nú bústøðum, vinnu og virksemi tengt at býarlívinum.

Tankin aftanfyri útbyggingina av Tórshavnar havn er at fáa eitt væl skipað kaiøki, har bleyta vinnan er staðsett næst býnum og tunga og mest larmandi vinnan longst burtur frá býnum í tí nýggju útbyggingini. Hesum tanka fylgir heildarætlanin fyri Eystara Havnarøki eisini.

Uppskotna heildarætlanin fevnir um trý øki, ið eru skipað í vinnulív, havnar- og ferðavinnuvirksemi og annað blandað virksemi.

Øki A er økið innast í Eystaru Vág og næst miðbýnum. Í heildarætlanini er hetta økið ætlað bleytum handils- og vinnuvirksemi. Her verður bleyta ferðslan leidd fram við bryggjukantinum, og søguligar frágreiðingar og rekreativt og býarkent virksemi verður borið fram, sum ein forlongdur armur frá økinum fram við Kongabrúnni, bátahylinum, Áarstovu og Essabar. Hetta sampakkar sera væl við uppskotið í miðbýarætlanini, har Kongabrúgvin skal vera framtíðar miðdepil fyri eitt nú sjóvarítrótt og rekreatión. Harafturat verður lagt upp til, at Kongabrúgvin er eitt øki, har góðir møguleikar eru fyri býartætting, eitt nú við at byggja vinnubygningar og bústaðir og hetta sampakkar eisini væl við miðbýarætlanina.

Øki B er økið millum miðbýarvirksemi og havnarvirksemi. Uppskot til hetta øki er at skapa eitt náttúruligt skifti millum bý og bryggju, har ein seyrigøta kann leiða bleytu ferðsluna út úr býnum eftir bryggjukantinum, og eitt parkeringsøki kann skapa íbinding og avgreiðslu til havnina.

Øki C er økið tættast móti havnini og nýggju útbyggingini. Hetta økið skal tola tunga ferðslu, og kunna virka sum granni hjá stóra havnarrúminum og samferðsluplássinum.

Við havnarútbyggingini, ið fer fram í løtuni, er týdningarmikið, at verandi og nýtt virksemi, knýtt at sjóvinnuni og bryggjukantinum, er væl skipað, og somuleiðis hugsað inn í eina langskygda heildarætlan. Tórshavnar kommuna skal vera við í arbeiðinum at skipa Føroyar sum tilfeingisdepil í Norðurhøvum, og útbyggingin av Tórshavnar Havn eigur tí at vera hugsað saman við restini av økinum inn í eina heildarætlan, soleiðis at havnin kann gerast ein sameindur partur av restini av býnum.

Henda heildarætlan er ein menningarætlan, ið sameinar allar tættir í einum býarparti og stuðlar undir at ávegis avgerðir styðja uppundir langskygdar ætlanir. Hetta eru ætlanir, ið kommunan eigur at hava, bæði fyri at vera tilvitað, tá nýggjar ætlanir koma á tekniborðið og fyri at langtíðarætlanirnar verða havdar í huga, tá planlagt verður.

Heildarætlanin hevur í fyrstu atløgu ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa, men kemur heildarætlanin at liggja til grund, tá býurin skal mennast víðari út eftir Havnargøtu/Kongabrúnni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við ætlanini, undir hesum at kanna ferðsluviðurskiftini nærri og gera rúmkanningar av økinum, soleiðis at heildarætlanin verður greina út, fyri síðani at leggja málið fyri aftur nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uttanríkis- og mentamálaráðið og Landsverk fóru í fjør undir eina tilgongd um nýtt tjóðleikhús í Tórshavn. Fyrsta stigið í verkætlanartilgondini er at vísa á best egnaðu staðseting fyri tjóðleikhúsið.
Mánadagin 8. mars 2021 var kunngjørt av Uttanríkis og mentamálaráðnum, at kappingin av staðsetingini av nýggja Tjóðleikhúsinum var avgreidd, og at dómsnevndin var komin fram til, at Tjóðleikhúsið skuldi staðsetast á Bursatanga, har leikhúsið kemur at standa á markamótinum millum bý og havn.

Tórshavnar kommuna fekk handa avgerðina frá Dómsnevndini og skal nú taka støðu til valdu staðseting. Í sambandi við at taka endaliga støðu til staðsetingina, so verður neyðugt at viðgera økið út frá teimum staðbundnu avbjóðingunum, sum økið hevur við sær, og verður neyðugt at tryggja sær, at endaliga staðsetingin hóskar inn til býarskipanarligu-, havna- og ferðsluatlitini, sum kommunan beinleiðis hevur til staðið.

Sostatt verður mett, at neyðugt verður at seta gongd á arbeiðið at skipa eystara havnaøkið í eina heildarætlan fyri økið, har staðsetingin av Tjóðleikhúsinum samstundis verður nágreinað.

Av tí at 5 ráðgevara-toymir eru knýtt at kappingini um Tjóðleikhúsið, og mugu hesi, samstundis sum tey tekna upp á eitt nýtt tjóðleikhús, taka støði til nærumhvørvið, so verður mett, at besta loysnin til at fáa eina nøktandi loysn fyri bæði skipan av økinum og skipan av tjóðleikhúsinum er, at báðar kappingarnar verða samskipaðar.

Upplýst er fyri umsitingini, at hetta er sama tilgongd, sum Reykjavíkar kommuna framdi, tá Hørpan í Reykjavík og økið kring Hørpuna varð skipað.

Til at fara undir hesa tilgongd verður neyðugt, at býarskipanarligi, tekniski og havna myndugleikin nágreina ítøkiligu krøvini til eystara havnaøki nú og í framtíðini, soleiðis at ráðgevaratoymini hava nakað ítøkiligt at fyrihalda seg til, tá økið og bygningurin skal teknast.

Metta samlaða upphæddin at fíggja toymini er áljóðandi 500.000 kr., har hvørt toymið verður samsýnt við 100.000 kr.

Við at fara undir hesa tilgongd, so fær kommunan 5 ymisk uppskot til skipan av økinum, og kann hugsast, at elementir eru í øllum uppskotunum, sum kunnu gagna endaligu skipanini av økinum. Hetta er ein heldur óroynd tilgongd, og hevur kommunan ikki áður samskipa verkætlanir við landi á henda hátt, men mett verður, at týdningurin av at Tjóðleikhúsið verður staðsett í Tórshavn og týdningurin av at hendan staðseting er heldur serlig í mun til kringumstøðurnar, so er tað bara jaligt at fáa fleiri uppskot inn til skipan av økinum, soleiðis at kommunan í síðsta enda hevur eina skipan av økinum, sum tekur hædd fyri teimum staðbundnu viðurskiftum, sum kommunan metur vera av týdningi fyri økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at farið verður undir at skipa eystara havnaøki sambært omanfyri standandi leisti,
- at umsitingin fer undir at nágreina ítøkiligu krøvini, sum ráðgevin skal fyrihalda seg til,
- at 500.000 kr. verða játtaðar av konto 6275, Fríðkan av kommununi, L00001, Løgukarmur fyri árið á nýggja íløgu 'Skipan av eystara havnaøki' undir konto 6275,

og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Havnanevndin 13. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina malið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Heðin Mortensen legði fram broytingaruppskot í málinum. Atkvøtt verður um soljóðandi uppskot: Samtykt við tí broyting, at fleiri arkitektar kunnu bjóða seg fram at gera heildarætlan. Málð um fígging verður at leggja fyri aftur.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Heðini Mortensen, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at tørvur er á eini heildarætlan fyri Eystara havnaøki, frá Kongabrúnni og út undir Skansan, stóð tað 5 ráðgevarasamtøkum í boði at luttaka í eini "Hugskotsinnsavning", sum Býarskipanardeildin skipaði fyri frá 20 okt. – 8.nov 2021.

Arbeiðið varð skipað so, at 5 ráðgevaratoymir skuldu arbeiða við hvør sínum uppskoti til eina heildarætlan hesar 7 vikurnar fyri eina samsýning á kr. 100.000 í part.
Tað vórðu 500.000 kr. settar av til hetta av konto 6275, fríðkan av Kommununi, og hetta varð samtykt á býráðsfundi longu 29. apríl 2021.

Býraðið samtykti tá eisini, broytingaruppskotið hjá Heðini Mortensen, at loyva fleiri ráðgevum at luttaka í hugskotsinnsavningini. Hetta var við støði í at tvær ráðgevarafyritøkur:

- EYA arkitektar og design
- Arkitektar 99

høvdu sýnt áhuga at vera við í verkætlanini saman við teimum upprunaligu 5 innbodnu ráðgevarasamtøkunum.
Hetta skuldi eisini samsýnast eftir sama leisti og við somu treytum. T.v.s. við 100.000 krónum í part fyri at gera uppskot til heildarætlan.
Báðar fyritøkurnar vórðu mettar at kunna innlata nøktandi talgilt tilfar.
Grundað á hesa samtykt vórðu tískil tilsamans 7 samtøk innkallað at luttaka í hugskotsinnsavningini, har tey fingu somu kravfesting og sama grundtilfar at arbeiða útfrá.

Tískil eru 2 fyritøkur afturat, sum hava rætt til at samsýnast við 100.000 í part fyri uppskotini, ið tey lótu inn. 8 nov. 2021.

Atlit skal harumframt takast til, at samsýningin fyri øll 7 innkomnu uppskotini má útgjaldast sum *samsýning fyri innkeypt ráðgevaraarbeiði*, og her má tískil íroknast meirvirðisgjald.

Afturat teimum framanundan játtaðu kr. 500.000, mugu tískil játtast kr. 243.750 afturat.
Tað er 100.000 í part til teir báðar innbodnu ráðgevarnar, umframt kommunala meirvirðisgjaldið (6,25%) av teirri samlaðu upphæddini at útgjalda til allar 7 ráðgevarnar.
Umframt tað er eisini nakað av fundarútreiðslum, sum fór til at skipa og leiga høli til verkstovu við viðgerðararbeiðinum. (Kr. 7.960 v.mvg)

Eina góða viku undan innlatingarfreistini kom fyrispurningur frá einum ráðgevi afturat (Albert Isfeldt og Jóannes Petersen) um at vera við í hugskotsinnsavningi. Ráðgevanum varð greitt frá, teir vóru vælkomnir at koma við einum sjálvbodnum ítkasti til eina heildarætlan, men at teir ikki kundu vænta samsýning fyri hetta arbeiði, tá teir ikki kundu lúka somu arbeiðstreytir sum hinum 7 ráðgevarnir arbeiddu undir, sum longu tá høvdu sitið við uppgávuni í 6 vikur. Hetta varð játtað, og ráðgevin lat eisini eitt uppskot inn, ið eisini varð tikið við í viðgerðartilgongdina.

Eftir at hugskotsinnsavningin varð lokað 8. nov. 2021 hevur býarskipanardeildin verið í eini tilgongd, har arbeitt verður við innkomna tilfarinum fyri at fáa eina ítøkiliga og framtíðartryggjaða heildarætlan samansetta.
Umsitingin kemur at kunna um verkætlanina á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játta kr. 255.000 av Løgukarminum LK62035 “Vetrarfriðing” á L62046, «Heildarætlan Eystara havnaøki», og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Tørvurin á eini heildarætlan**
Í tráð við at havnavirksemið á gomlu Eystaru bryggju so líðandi verður flutt út á nýggju ídnaðarkeiina, hevur stórur tørvur verið á eini nýggjari menningarætlan fyri Eystara Havnaøki til tess at tryggja at økið ikki kemur at standa lutfalsliga oyðið í framtíðini.

**Eystara Bryggja tømist**
Eitt nú kann nevnast, at stóra pakkhúsið undir Skansanum hjá Smyril Line Cargo, og skrivstovubygningurin hjá TAKS á ávikavist Eystaru bryggju 20 og 30 ætlandi verða niðurtikin, tá hetta virksemið heldur verður samlað úti á nýggju ídnaðarkeiini. Smyril Line fyrireikar í hesum viðfangi eisini byggingina av nýggjum altjóða ferðafólkaterminali úti á ídnaðarkeiini, har Norrøna fer at hava sítt fasta atløgupláss.

Væntast kann harumframt, at hildið verður fast um ætlanina við at bora undirsjóvartunnil millum Sandoynna og Suðuroynna um eitt stutt áramál, sambært raðfestingini á fíggjarlógini fyri 2022. Natúrligu avleiðingarnar av hesum eru, at Strandfaraskip Landsins fyrireikar, at suðuroyarsiglingin verður niðurløgd, at Smyril verður seldur, og at ferjulegan og stóra asfaltsfløtan við bíðstøðuplássunum umborð tískil kemur at standa tóm, um Tórshavnar kommuna onga aðra ætlan hevur fyri økið.

Eftir á Eystaru bryggju stendur sostatt bert farstøðin hjá SSL við atknýttu bussplássunum, ferjulegan hjá Ternuni, og Havnarskrivstovan uttast undir Skansanum, umframt víðu asfaltsfløturnar og bíðistøðuplássini.

Um hugt verður at samlaða økinum í verandi støðu, kann Eystara Havnaøki í dag býtast upp í tríggjar partar. (sí journalnummar 17/03628-18, Økispartar_Eystara havnaøki.pdf) hesir partar eru:

- Økispartur 1 er innasti og søguliga ríkasti partur av samlaða økinum, við Kongabrúnni, bátahylinum, Bursatanga og havnalagnum yvir av Tinganesi út til Farstøðina. Hesin parturin er á leið 15.000 $m^2$ til støddar.
- Økispartur 2 er samferðslu og farmaøkið frá Farstøðini og út til nýggju ídnaðarkeiina. Hesin partur er á leið 18.900 $m^2$ til støddar.
- Økispartur 3 er útbygda ídnaðarøkið og nýggju molarnir. Hetta økið er á leið 187.600 $m^2$

**Tilgongdin við Heildarætlanini**
Býarskipanardeildin hevur saman við teknisku deild, verið í eini tilgongd at gera eina heildarætlan fyri Eystara Havnaøki hvussu teir báðir innastu økispartarnir (1 & 2) best kunnu gagnnýtast og framtíðartryggjast býarskipanarliga í mun til komandi virksemi og menning í økinum tey næstu mongu árini.

Skipað varð í hesum sambandi fyri eini hugskotskapping, har 8 arkitektasamtøk gjørdu hvør sítt uppskot uppá eina heildarætlan fyri økið. Sum grundarlag undir kappingini varð ein kravfesting gjørd við støði í teimum bindingum, sum eru í økinum, og við atliti til tey ynski, sum áhugabólkar og brúkarar í økinum hava. Harumframt varð tilfarið eisini evnað við tí í hyggju, at nágreina hvar eitt Tjóðleikhús kundi verið staðsett í økinum.

Uppskotini vórðu innlatin 8. nov 2021, og vórðu tey eftirfylgjandi viðgjørd í einum fakligum arbeiðsbólki, ið

tók støðu til hvussu ein endalig heildarætlan fyri Eystara Havnaøki skuldi skipast úr teimum best eydnaðu lutunum úr kappingini.

**Heildarætlanin**
Við støði í innkomnu ráðgevarauppskotunum, hevur Býarskipanardeildin gjørt eina heildarætlan fyri Eystara Havnaøki, har stóru strokini vóru, at økispartur 1, ið er innasta og mest søguligi parturin, verður best gagnnýttur og virðiligast handfarin, um hann verður inntikin til fólksligt miðbýarvirksemi, sett av til mentan, ferðavinnu og smávinnuligt virksemi, bryggjutorg og útbygdari smábátahavn við nýggjari atløgubryggju til størri stuttleikafør við Bursatanga.

Hetta verður sostatt eitt livandi mentanarumhvørvi, ið knýtir bæði Skansan og Tinganes upp í miðbýin, samstundis, sum tað leggur lunnar undir, at her verður bygt til alment mentanarvirksemi, ið tænir tignarliga økinum heiður, og samstundis hevur virðing fyri tí søguliga smáneystaumhvørvinum, sum einaferð setti sín dám á Eystaru vág, áðrenn økið varð umlagt til ídnað og samferðslu.

Økispartur 2, millum Farstøðina og Havnarskrivstovuna varðveitir sína funktión sum samferðsludepil, men verður mentur munandi og endurskipaður í mun til ferðslurensl og virksemi.

(Sí  nærri útgreining í bóklingi um heildarætlanina)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At Heildarætlanin fyri Eystara Havnaøki, sum lýst í bóklingi um heildarætlanina og atknýtta tekningstilfari, verður eitt vegleiðandi amboð fyri hvussu økið skal mennast og skipast í framtíðin.
- At økið, sum er avmerkt á flatmyndini “Uppskot um kappingarøki” áljóðandi 10.000 m$^2$ verður avsett til kappingarøkið hjá Mentamálaráðnum til nýggjan Tjóðpall við treytum grundaðar úr heildarætlanini.
- At beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og mentamálanevndina.
-

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Útsett

**Tekniska nevnd 07. februar 2022:** Útsett.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Útsett.

## Ískoyti:

## Skipan av Eystara havnaøki:
Í fyrireikingini til útbygging av Eystara havnaøki, tá ætlanin var at tilkoyringin til havnarlagið lá uttan fyri Skansan, skuldi havnarlagið víðkast við 163.000 m$^2$.

Av tí at tað tók so langa tíð at fáa tað endaliga friðingarloyvið, bleiv avgjørt at minka útbyggingina til 95.000 m$^2$.
Avleiðingin av minkingini er, at havnaøkið ikki er so stórt, sum upprunaliga ætlað, og at tilkoyringin til havnarlagið hevði verið betur, um ætlanin ikki varð minkað.

Avgjørt er, at byggja nýggj pakkhús og farstøð á økinum uttan fyri havnarskrivstovuna. Hjarnuvirksemið hjá havnini og skipafeløgunum er, at hava pláss til at avgreiða ferðafólk og frakt.

Samfelagið er í støðugum vøkstri, tí er umráðandi at skipafeløgini, hava arbeiðsumstøður og pláss at fylgja við hesum vøkstrinum.

Av tí at tað tekur fleiri ár at víðka havnarlagið, er neyðugt at økið millum havnarskrivstovuna og farstøðina framhaldandi verður ein partur av virkseminum hjá skipafeløgunum.

Økið millum havnarskrivstovuna og Bursatanga er umleið 23.000 $m^2$

Í tekning j.nr 17/03628-14, heildarætlan Eystara havnaøki skitsa 061221, sæst, at ætlanin er at venda Smyrli, soleiðis at koyrast skal í land undir havnarskrivstovuni.

Hendan ætlanin viðførir:

1. At tað verður truplari hjá Smyrli at koma til og frá, serliga á útsyðningi
2. At einasta flytiliga rampan í Havnini verður gjørd óvirkin
3. At økið beint innan fyri havnarskrivstovuna, sum eigur at vera partur av virkseminum hjá skipafeløgunum í uttanlandssigling, verður brúkt til bíðirøðir og farm, sum skal við Smyrli.
4. At íløgur skulu gerast í:
   a. Nýggja rampu undir havnarskrivstovuni
   b. Nýggja rampu út eftir molanum
   c. Styrking av bryggjukantinum innan fyri havnarskrivstovuna
   d. Nýggjar sterkar fendarar innan fyri havnarskrivstovuna
   e. Nýggjar stormpullartar til Smyril
   f. Nýggja farstøð ella landgongd við gongubrúgv til verandi terminal

**Tilmæli frá havnameistaranum:** At økið millum havnarskrivstovuna, og verðandi ferðafólkaterminal, framhaldandi verður partur av uttanlandssiglingini.
At økið frá verðandi farstøð ikki verður lagt av til miðbýarvirksemi, fyrr enn Smyril verður tikin úr sigling.

**Havnanevndin 14. februar 2022:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen samtykti at eitt økið upp á uml. 4.000 fermetrar frá Farstøðini og heim ímóti býnum verður lagt av til miðbýarvirksemi og Mentunarhús.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

**Fortreytirnar fyri nýskipan av Eystaru bryggju:**

Komandi árini verða fortreytirnar fyri virkseminum á Eystara Havnaøki somikið broyttar, at neyðugt er at nýskipa økið, so tað kann gagnnýtast á ein skynsaman og framtíðartryggjaðan hátt. Tørvur hevur verið á eini heildarætlan fyri økið millum Kongabrúnna og út til ídnaðarmolan á Eystara havnaøki. Umtalaða økið er umleið 32.800 $m^2$ til støddar.

Økið verður í verandi støðu nýtt til:

- Samferðsluøki við farstøð hjá Strandfaraskipum Landsins og Smyril Line, bæði við atløgubryggjum til uttanlandaferðaflutning, sum karmur um ferjusambandið til Nólsoyar og Suðuroyar, og sum bussmiðstøð hjá bygdaleiðum.
- Taxamiðstøð
- Pakkhús
- Havnaskrivstova hjá Tórshavnar Havn
- Skrivstovuvirsksemi.
- Smábátahavn
- Alment parkeringsøki
- Og til matstovu og handilsvirksemi.

Broytingarnar í økinum verða m.a.

- At Suðuroyarsiglingin væntandi verður niðurløgd og Smyril verður tikin úr sigling.
- At pakkhúsið og skrivstovuvirksemið á ávikavist Eystaru bryggu 20 og 30, millum Havnaskrivstovuna og verandi Farstøð, verður flutt úr økinum.
- At bussleiðirnar hjá SSL verða fleiri í tali.
- At Smyril Line flytur alt sítt uttanlanda siglingarvirksemi av økinum og út á molan við nýggjum altjóða terminali.
- At ferðslan um rundkoyringarnar og út á ídnaðarmolan fer at vaksa.

Ein nýggj skipan av økinum leggur upp til, at verandi funktiónir fáa neyðugt rásarúm til at virka og røkja sítt virksemi á ein tryggan hátt, og at leysgivnu fermetrarnir í økinum verða gagnnýttir á skilabesta hátt, hvat býarskipan og miðbýarmenning viðvíkur. Her verður serstakliga hugsað um søguliga virðið í økinum, har býareyðkenni sum Tinganes, Skansin og Kongabrúgvin er ein partur av nærumhvørvinum.

Býarskipanardeildin hevur verið í eini tilgongd at skipa eina heildarætlan fyri økið, har samskift hevur verið við uttanveltaðar ráðgevar og áhugabólkar i økinum.

**Økispartar í heildarætlan**

Heildarætlanin deilir umtalaða økið í fýra økispartar.

- Økispartur 1, ið er økið við ósan á Havnará og nakað út á Kongabrúgv (umleið 1300 $m^2$).

- Økispartur 2 er Innara bryggjuøkið frá Kongabrúnni og út til verandi farstøð. (umleið 17.000 $m^2$)

- Økispartur 3 er Miðøkið við verandi farstøð og atknýttum bussstøðubásum, tolli og parkering. (umleið 7600 $m^2$)

- Økispartur 4 er Ytra bryggjuøkið frá verandi farstøð og út til ídnaðarmolan. (umleið 7000 $m^2$).

- Uttan fyri økispart 4 er Schengen- og ídnaðarøki (umleið 157.000 $m^2$)

**Skipan av økinum**
Heildarætlanin er skipað so, at:

Økispartur 1 og 2 verður umskipaður til miðbýarkent virksemi við smáhandlum, kafé/matstovum, og ymiskt til ferðavinnuligt endamál. Her verður bryggjutorg við bátadrátti og broyttum bryggjukanti, ið er ætlaður fólki til gongu, umframt at smærri skip kunnu liggja her. Smábátahavnin verður eisini útbygd til at taka fleiri bátapláss.
Nólsoyarferjan kemur framhaldandi at hava atløgu í økinum, og her verður nýggj ferðamiðstøð bygd, við nýggjum bussstøðuplássum til bæði bygdaleiðir og býarbuss.

Her verður lutfalsliga lág bygging í 1-3 hæddum.

Økispartur 3 verður avsett til alment mentanarligt endamál, so sum leikhús og almenna parkering. Her verður ein nýggj og størri rundkoyring gjørd, við einum eyka ferðsluarmi, ið verður leiddur beint oman á bryggjuna.

Her verður hægri bygging loyvd í upp til 5 hæddum, og undantak kann í serligum føri verða givið upp til 20 m til eitt nú leikhústorn.

Økispartur 4 verður skipaður, lutvíst sum sokallað buffara-øki til uttanlandasiglingina og atløgubryggjuni hjá Norrønu/SmyrilLine. Og lutvíst sum almenn parkering á Eystaru bryggju annars.

Vegurin frá rundkoyringini og út á ídnaðarøkið verður eisini breiðkaður við eini eyka frákoyringarbreyt til tunga ferðslu niðan um Skansan.

Her kann byggjast í upp til 5 hæddum, treytað av at ikki verður bygt upp um hæddina á hamaranum á Skansanum, ið er 16 m høgur í lutfalli til bryggjukantin.

Í øki 3 og 4 eru líkindini góð fyri at ymsar funktiónir umskara, ella yvirlappa hvørja aðra. Til dømis er hugsandi at buffarastøðubásar til ferjulegurnar partvís kunnu nýtast sum almenn parkering um kvøldarnar, tá tiltøk eru á skránni í økinum.

Eisini er hugsandi at parkeringsdekk kann byggjast, um tørvurin og trýstið á hetta økið fer at vaksa.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At Heildarætlanin fyri Eystara Havnaøki, sum lýst í bóklingi um heildarætlanina og atknýtta tekningstilfarið, verður eitt vegleiðandi amboð fyri hvussu økið skal mennast og skipast í framtíðini

- At økið, sum er avmerkt á flatmyndini “Uppskot um byggiøki” áljóðandi 4.000 m$^2$ verður avsett til byggiøki hjá Mentamálaráðnum til nýggjan Tjóðpall við treytum grundaðar úr heildarætlanini.

  At beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. februar 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Ruth Vang, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam, atkvøður blankt.
**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Landsverk, umboðandi Uttanríkis- og mentamálaráðið, stóð í heyst fyri arkitektakapping at gera uppskot til Tjóðleikhús. Býráðið samtykti í vár at avseta økið, sum er avmerkt á flatmyndini “Yvirlitskort heildarætlan_1til1000_A2_190222”, j. nr. 17/03628-27, til byggiøki til nýggja Tjóðleikhúsið.

Landsverk hevur síðani kappingina sent kommununi vinnandi uppskotið og dómsnevndarálitið frá kappingini, sí journal nr. 17/03628-36 og nr. 17/03628-38.

<u>Soleiðis verður greitt frá vinnandi uppskotinum:</u>

*Uppskot 95516 skarar framúr á øllum givnum økjum: Arkitektonisk hugsjón, funktionalitetur, samspæl við nærumhvørvið og byggibæri, heildarkostnað og umhvørvisatlit.*
*Tað hevur eitt týðiligt og snotiligt høvuðsbragd, sum sameinir og miðlar tað nógva virki í tjóðleikhúsinum. Logistikkurin og skipanin í tjóðleikhúsinum er sera sannførandi, og sum gestur fært tú eina stóra uppliving, og tað er lætt at vitja húsið. Bygningurin er gevandi í mun til sítt umhvørvi, tí hann við sínum terassum leiðir okkum inn í tjóðleikhúsins skala á sannførandi hátt, hann hevur bleytt dánað, spælandi og kortini rytmisk mynstur og er innbjóðandi á øllum fimm síðum, og bygningurin virkar bæði sum eitt nýtt útsýnisstað, haðani tú upplivir alt havnarrúmið, og sum trappusteinur til Skansan við sambandi til Skansan og sjónarringin. Henda sambinding uppraðfestir og sameinir Skansan sum leikara í tí stóra býarlandslagnum av nýggjum. Samstundis ger dómsnevndin við sínum vali eitt greitt tilmæli um, at tjóðleikhúsgrundøkið verður tillagað, og samsvarandi eigur busskoyring á Eystaruvág at endurskoðast, so at minkað verður um ferðslutunga dámin á tí øki, sum í framtíðini skal verða ein víðkaður miðbýur í Havn.*

<u>Somuleiðis verður skrivað soleiðis í niðurstøðunum hjá dómsnevndini:</u>

*Dómsnevndin metir, at um staðsetingin av Tjóðleikhúsinum á havnarlagnum verður tillagað nakað, verður samspælið við Skansan og Tinganes betur. Eitt hjartamál hjá nevndini hevur verið, at tann nýggi*

*bygningurin ikki oyðileggur tað søguliga samspælið millum tey týdningarmiklu mentanarsøguligu og býarlandslagsligu støðini Tinganes og Skansan, men verður settur einastaðni á tí stóra havnarøkinum, sum letur upp fyri eygnasambandi, samstundis sum býarlívi, ferðslukrøv v.m., kunnu verða gingin á møti. Við at flyta tjóðleikhúsgrundøkið burtur frá høvuðsásinum millum Tinganes og Skansan kann tjóðleikhúsið gerast eitt nýtt triðja punkt, ið stuðlar uppundir hinum báðum. Hetta fer eisini at geva gongugøtuni betri tilknýti til Skansan.*

Í dómsnevndarálitinum verður sostatt viðmælt at flyta Tjóðleikhúsið eitt lítið vet nærri Kongabrúnni aftur fyri at varðveita søguliga samspælið millum Tinganes og Skansan. Landsverk hevur eftirfylgjandi heitt á kommununa um at fara í eina tilgongd at nágreina endaligu staðsetingina/byggiøkið, sum kann liggja til grund undir einum komandi leigu-/sølusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Mentamálaráðið.

**Skjøl:**
J. nr. 17/03628-27, Yvirlitskort heildarætlan_1til1000_A2_190222
J. nr. 17/03628-36, Vinnandi uppskotið hjá MAP Arkitektum_kapping aug_sep 2022.pdf
J. nr. 17/03628-38, Dómsnevndarálit-Tjóðleikhús við undirskriftum.pdf.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og býararkitekturin mæla til,

- at heimila umsitingini at fara í eina tilgongd saman við Landsverki og teirra ráðgeva at finna endaligu staðsetingina til Tjóðleikhúsið á Eystara havnaøki, sum skal liggja til grund fyri leigu-/søluavtaluni millum Tórshavnar kommunu og Mentamálaráðið,
  og beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og mentamálanevndina og at málið verður lagt fyri nevndina aftur.

**Havnanevndin 05. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum tó við tí viðmeking, at man tekur undir við at leiga og ikki selja undirlendið, og at man heldur seg til økið sum er samtykt frammanundan í havnanevndini.

**Ískoyti:**
Peningur bleiv í 2021/2022 játtaður til verkætlanina L62046 Heildarætlan fyri Eystara havnarøki til ráðgevar at koma við uppskotum. Arbeiðið við heildarætlanini er fyribils liðugt, og saldoin á verkætlanini er 80.500 kr.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62046 | Heildarætlan Eystara havnarøki | 6275 | L0001 | Løgukarmur - Fríðkan av býnum | | 80.500 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L62046, Heildarætlan Eystara havnaøki, flyta avlopið á 80.500 kr á karmin L00001 á konto 6275, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, tekur undir við at loka verkætlanina og at flyta avlopið á karmin L64040 á konto 6275.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:** Almanna- og mentamálaráðið hevur í skrivi dagfest 15. mars 2023 boðað Tórshavnar kommunu frá, at fremsta ynski hjá Almanna- og mentanálaráðnum er at keypa lendið frá Tórshavnar kommunu/Tórshavnar havn til at byggja Tjóðleikhús á. Í øðrum lagi ynskir ráðið at leiga lendið í eitt so langt tíðarskeið sum til ber, í minsta lagi óuppsigiligt í 30 ár, men gjarna longri.

Havnanevndin tók 5. desember 2022 støðu til spurningin um, hvørt lendið undir tjóðleikhúsinum skal leigast ella seljast. Ein samd nevnd samtykti í hesum sambandi at leiga og ikki selja undirlendið.

Siðvenja er ikki at selja lendi, ið Tórshavnar havn umsitur. Hetta fyri altíð at kunna tryggja atgongdina til sjógvin, ið verður mett at hava alstóran týdning fyri býin. Vinnufyritøkur, ið leiga lendi frá Tórshavnar havn, hava í flestu førum langar leigusáttmálar, og so leingi talan er um leigusáttmálar, ber til hjá Tórshavnar havn at fáa lendið aftur, tá ið hesir leigusáttmálar ganag út. Dømi eru um vinnufyritøkur, ið hava havt leigusáttmála við Tórshavnar havn í fleiri áratíggju.

Vísandi til siðvenjuna, ið er nevnd omanfyri, verður ikki mett skynsamt at selja lendið, ið ætlanin er at byggja tjóðleikhús á. Hinvegin er skilligt, at ynski er um at fáa so drúgvan leigusáttmála sum til ber, tá ið farið verður undir eina slíka bygging og stóra íløgu, sum tjóðleikhúsið er.

Mælt verður tí til at gera ein leigusáttmála um lendið undir tjóðleikhúsinum, sum er óuppsigiligur í 50 ár, og at møguleiki verður fyri at leingja leigusáttmálan við 10 árum hvørja ferð, um Tórshavnar kommuna/Tórshavnar havn ikki skal brúka lendið, ið tjóðleikhúsið stendur á. Skal Tórshavnar kommuna/Tórshavnar havn sjálv brúka lendið, ið tjóðleikhúsið stendur á, tá ið leigumálið er lokið, skal kommunan endurrinda virði á ástandandi bygningi.

Mett verður, at hesar treytir eru nøktandi grundarlag fyri at fara undir verkætlanina at byggja tjóðleikhús á havnaøkinum.

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir til at Tórshavnar kommuna ger leigusáttmála við Almanna- og mentamálaráðið um lendi at byggja tjóðleikhús á, ið er óuppsigiligur í 50 ár og við møguleika fyri at leingja leigumálið við 10 árum hvørja ferð, um Tórshavnar kommuna/Tórshavnar havn ikki sjálv skal brúka lendið, ið tjóðleikhúsið stendur á. Harumframt verður mælt til, at kommunan skal endurrinda virðið á ástandandi bygningi, um kommunan sjálv skal brúka lendið, ið tjóðleikhúsið stendur á, tá ið leigumálið er lokið.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at beina málið í havnanevndina.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Skjøl:**
J.Nr. 17/03628-47 : Viðmerkingar frá Tórshavnar havn til spurning um leigumál viðv. Tjóðpall á Eystaru Bryggju.

**Tilmæli:** Vísandi til notat frá Tórshavnar havn, J.nr. 17/03628-47, mælir stjórin í Tórshavnar havn til at áseta hesar treytir í leigusáttmálan um Tjóðpallin:

1. At leigumálið ikki byrjar, fyrr enn suðuroyarsiglingin ikki longur gongur upp á Tórshavn.
2. At, um leigarin vil, at leigumálið skal byrja áðrenn treytin ásett í pkt.1 er lokin, so skal leigarin bera kostnaðin av umbygging av havnini í Tórshavn, sum lýst í málsviðgerðini og møguligum endurgjaldskrøvum frá pørtum í málinum.
   At staðsetingin av Tjóðpallinum verður so innalaga móti býnum sum gjørligt, og í minsta lagi 20 metrar niðan frá keikanti so havnalagið kann nýtast til avmarkaða skipaferðslu, eisini í framtíðini.

**Havnanevndin 12. september 2023:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Tórshavnar havn hevur fingið tekning frá Landsverk (J.nr. 17/03628-49), ið vísir staðseting og støðd av tjóðleikhúsinum. Sjálvt tjóðleikhúsið verður 3.275 m², meðan samlaða økið til tjóðleikhús, parkering og uttanumøki verður í alt 7.780 m². Sambært tekningini skal tjóðleikhúsið staðsetast á økið, har ið verandi farstøð er, og norður/niðan til Havnargøtu.

Hetta merkir, at verandi farstøð (undantikið trapputornið) skal takast niður, og at alt p-økið til bussarnar hjá bygdaleiðum og økið við bilrøðum til Smyril verður tikið til tjóðleikhúsið.

Avleiðingin av hesum verður, at logistikkurin í.s.v. suðuroyarsiglingina má skipast av nýggjum. Arbeitt hevur verið saman við Landsverk og MAP-arkitektum um fylgjandi uppskot til loysnir:
- Trapputornið (glasbygningurin) verður standandi til gangandi ferðslu frá Smyrli.
- Nýggj farstøð til Smyril skal innrættast í niðastu hædd í trapputorninum, har tollararnir halda til í dag.
- Pakkhúsið á Eystaru bryggju 20, sum Smyril Line leigar í dag, skal takast niður (partar ella alt) og økið nýtast til góðs hjá Smyrli/SSL.
- Bilrøðirnar til Smyril verða á sama økið, sum bilrøðirnar til Norrønu, úti á nýggja uppmarshøkinum á Skansabryggjuni.
- Bilarnir til Smyril verða leiddir framvið eystara brimgarð, inn eftir vegnum millum K.W. pakkhúsið og Skansan, oman millum SML pakkhúsið og trapputornið, og síðani eftir Eystaru Bryggju yvir til Smyril.
- Bilarnir frá Smyrli koyra yvir á Bursatanga og út á Havnargøtu

Hesar loysnir viðføra stórar avbjóðingar á Eystaru Bryggju og Skansabryggjuni, herundir fyri trygd, ferðslurensl, avgreiðslu av ferðafólki og góðsi:
- Plássið í nýggju farstøðini til SSL verður minni, og harvið verða umstøðurnar fyri ferðafólk og starvsfólk verri í mun til verandi umstøður.
- Færri p-pláss til ferðafólk og avvarðandi, ið heinta ella seta av ferðafólk.
- Økið til bussar til bygdaleiðir minkar og verður trengri, og harvið versna umstøðurnar fyri bussar og ferðafólk til bygdaleiðir.
- Bilaferðslan til Smyril verður avbjóðandi fyri logistik og ferðslutrygd, tí hon skal leiðast langa leið av Skansabryggjuni og inn á Eystaru Bryggju, og ferðslan kemur helst at krossa aðra ferðslu á økinum.
- Smyril Line fær ikki brúkt nýggja uppmarsh økið á Skansabryggjuni til annan farm, tá ið Norrøna ikki er í Tórshavn, soleiðis sum ætlanin hevur verið.
- Skipan av ISPS økinum við nýggja uppmarshøkið verður avbjóðandi, tí tá ið økið skal nýtast til Norrønu, verður uppmarshøkið innanfyri ISPS, meðan tað verður uttanfyri ISPS, tá ið økið verður nýtt til Smyril.

Samanumtikið metir Tórshavnar havn, at hesar avbjóðingar fara at viðføra, at tænastan, ið SSL fær frá Tórshavnar havn í.s.v. suðuroyarleiðina, verður verri enn í dag. Ferðslutrygdin verður munandi verri og logistikkurin verður truplari sum heild á øllum havnaøkinum. Hesi viðurskifti fara eisini at ávirka hinar stóru kundarnar hjá Tórshavnar havn neiliga, m.a. tí at tað verður truplari at fáa góðs til og frá Skansabryggjuni, tá ið bilaferðslan til Smyril skal krossa á økinum, og tí at uppmarsh-økið til Smyril má vera úti á Skansabryggjuni.

Langtíðar strategisku avleiðingar fyri Tórshavnar havn eru lýstar í notati 17/03628-47. Sum áður greitt frá, er týðandi fortreyt undir kjarnuvirkseminum hjá havnini og farmaflutningsfeløgunum at hava pláss til at avgreiða góðs og ferðafólk. Samfelagið er í støðugum vøkstri, tí er umráðandi at skipafeløgini hava pláss og arbeiðsumstøður at fylgja við hesum vøkstrinum. Seinastu 10 árini eru góðsmongdirnar um Tórshavnar havn í miðal øktar 3 % um árið. Við sama vøkstri verður góðsmongdin tvífaldað eftir 24 árum, og tí hevur Tórshavnar havn ikki ráð til at lata økið frá sær til annað virksemi enn havnavirksemi.

Fíggjarligar avleiðingar: (Sum greitt frá í notati, er) Eystara havnaøki, bygningar v.m. eitt týdningarmikið aktiv hjá Tórshavnar havn, sum stórar íløgur eru gjørdar í gjøgnum tíðirnar. Íløgurnar eru fíggjaðar við inntøkum havna- og vørugjøldum v.m., sum kundarnir hjá Tórshavnar havn hava goldið gjøgnum tíðirnar. Hetta aktiv skapar í dag ávísar inntøkur til Tórshavnar havn frá leigu og virkseminum á økinum annars. Verður eystara havnaøkið í framtíðini nýtt til annað enn vinnulig endamál, missir Tórshavnar havn møguleikan at fáa inntøkur burturúr økinum, og harvið verða íløgurnar virðisleysar.

**Tilmæli:**
Vísandi til, at eitt tjóðleikhús á Eystaru bryggju fær týðandi neiligar avleiðingar fyri virksemi Tórshavnar havn og kundar okkara, ið eru lýstar omanfyri og í notati j.nr. 17/03628-47, og sum í høvuðsheitum eru hesar:

- Praktiskar/logistiskar avbjóðingar á Eystaru bryggju og Skansabryggjuni, herundir fyri trygdina, ferðslurenslið, avgreiðslu av ferðafólki og góðsi.
- Tænastan mótvegis serliga suðuroyarleiðini, og hinum størri kundunum hjá Tórshavnar havn, verður verri.
- Nýtslumøguleikarnir fyri bryggjukantin á Eystaru bryggju minka, tá ið tilhoyrandi havnaøki skal brúkast til annað endamál enn havnavirksemi.
- Fíggjarligar avleiðingar, bæði beinleiðis frá minkaðum leiguinntøkum, og óbeinleiðis vegna skerdar vinnumøguleikar í framtíðini.
- Skerdir vinnumøguleikar á Eystara havnaøki, ið fara at ávirka strategisku støðuna hjá Tórshavnar havn sum føroya fremsta havn.
- Skerdir møguleikar fyri í framtíðini at kunna lofta nýggjum kundum, vinnum og tænastum innan havna- og shippingvirksemi.

kann stjórin í Tórshavnar havn ikki viðmæla at gera leigusáttmála um tjóðleikhús á Eystaru bryggju.

**Havnanevndin 16. apríl 2024:**
Ein meiriluti: Kári Johansen og Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum og mælir býráðnum til at finna aðra staðseting.

Ein Minniluti: Turið Horn tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:** 22. apríl 2024 var fundur millum umboð fyri Tórshavnar kommunu og Almanna- og mentamálaráðið, har borgarstjórin, formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum luttóku saman við umboðum fyri umsitingina í kommununi og aðalráðnum.

Á fundinum avtalaðu partarnir at halda seg til uppruna ætlanina, sum varð samtykt í býráðnum 24. februar 2022, um at seta av eitt øki áljóðandi 4.000 m² til byggiøki til nýggjan tjóðpall.

Partarnir avtalaðu, at í tann mun tørvur er á størri vídd í byggitíðarskeiðinum til byggipláss og annað, verður hetta avtalað nærri, tá byggingin fer í gongd.

Avtalað varð, at gjørdur verður ein 50 ára leigusáttmáli, ið er óuppsigiligur í leigutíðarskeiðinum, og at Tórshavnar kommuna ger økið byggiklárt við eitt nú at taka bygningar á økinum niður fyri egna rokning, og at økið verður klárt at byggja á í 2026.

Samsvarandi hesum hevur umsitingin saman við umboðum fyri Almanna- og mentamálaráðið og Landsverk gjørt uppskot til leigusáttmála millum partarnar, ið verður lagdur fyri býráðið til gókenningar umvegis fíggjarnevndina.

Sambært uppskotinum tekur sáttmálin við tann 1. august 2026.

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir til at góðkenna uppskot til leigusáttmála, j.nr. 17/03628-56, millum Føroya Landsstýri (Almanna- og mentamálaráðið) og Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarnevndin 11. juni 2024:** Umrøtt.

Eftir umrøðu í fíggjarnevndini 11. juni hava avtalupartarnir avrátt at broyta einstaka áseting í sáttmálanum, sum snýr seg um, nær sáttmálin tekur við. Sambært ásetingini tekur sáttmálin við, og partarnir avtala nærri, nær leigarin sleppur inn á økið, tá verkætlanin er á einum slíkum støði, at hon er búgvin til myndugleikagóðkenning, og váttan fyriliggur frá byggiharra, at fígging er tøk til at fremja alla verkætlanina.

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir til at góðkenna tillagaða uppskotið til leigusáttmála, j.nr. 17/03628-63, millum Føroya Landsstýri (Almanna- og mentamálaráðið) og Tórshavnar kommunu

**Fíggjarnevndin 20. juni 2024:** Útsett.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tillagað uppskot til leigusáttmála, j.nr. 17/03628-69, verður lagt fyri fíggjarnevnd og býráð at góðkenna.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir til at góðkenna uppskotið til leigusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Føroya Landsstýri (Almanna- og mentamálaráðið).

**Fíggjarnevndin 03. juli 2024:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Jákup Dam og Annika Olsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum og vísir til samtykt í havnanevndini 16. apríl 2024 um at finna aðra staðseting.

**Býráðsfundur 03. juli 2024:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Kára Johansen, ið er soljóðandi:

"At finna aðra staðseting enn Tórshavnar Havn, og at heita á myndugleikan um at finna aðra staðseting í Tórshavnar kommunu."

4  atkvøður vóru fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddu: Súsanna Olsen, Rói B. Poulsen, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsern, Elsa Berg, Turið Horn, Jákup Dam, Annika Olsen, Birita Baldvinsdóttir Iversen og Høgni Joensen.

Síðani varð atkvøtt um meirilutauppskotið frá fíggjarnevndini, ið var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Birita Baldvindsóttir Iversen, Høgni Joensen, Elsa Berg, Jákup Dam, Turið Horn og Annika Olsen

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Kári Johansen, Rói B. Poulsen og Súsanna Olsen.

**Ískoyti:**
Kári Johansen biður um at fáa málið á skrá til býráðsfundin 12. desember 2024 við atliti til, at finna aðra staðseting til Tjóðleikahúsið enn Eystara havnarøki.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Elsu Berg um at beina málið aftur í nevnd.

Uppskotið fall við seks atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og ongar blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Kristianna Winther Poulsen.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekksteinn, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Síðani varð atkvøtt um uppskot frá Kára Johansen um at samtykkja aðra staðseting enn Eystara havnarøki.

Uppskotið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og tveimumblonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Anfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Súsanna Olsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Annika Olsen og Gunvør Balle.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen og Kristianna Winther Poulsen.

# 320/24 Streetfood Tórshavn : Umsókn um at leiga 5.hædd (Hjallin) á Bacalao til Streetfood virksemi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 26.11.2024 | 39/24 | 24/08603-2 |
| 2 Havnanevndin | 09.12.2024 | 44/24 | 24/08603-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.12.2024 | 309/24 | 24/08603-2 |
| 4 Býráðsfundur | 12.12.2024 | 320/24 | 24/08603-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Streetfood Tórshavn (ÍVF undir stovnan)

**Lýsing av málinum**
Streetfood Føroyar søkir í skrivi dagfest 28.10.2024 um loyvi til at leiga ovastu hædd á Bacalao (hjallin), til "Streetfood" virksemi.
Endamálið er at gera eina sonevnda Streetfood-matstovu, har dentur verður lagdur á at samantvinna fjølbroytta og forkunnuga matmentan og annað fjølbroytt mentanarligt virksemi.
Ætlanin er at gera góðar umstøður til matsølustøð og felags tilhaldsøki at njóta matin, har tað eisini verða karmar til mentanarlig tiltøk, sum t.d. tónleik, fyrilestrar, framførslur og framsýningar.
Streetfood Føroyar útlutar matsølustøðini gjøgnum alment útboð, har ið áhugaðir luttakarar fáa javnbjóðis møguleikar at bjóða seg fram. Tillutanartreytirnar verða m.a. kostnaður og fjølbroytni í matskránni.

Sum er, er hjallurin ikki egnaður til endamálið, hvat viðvíkur atkomu, rýmingarmøguleikum, byggitøkniligum viðurskiftum og tekniskum innleggingum, harundir el-, vatn- og spillivatnsleiðingum, og tí skal Hjallurin umbyggjast. Umbyggingin fevnir um at:
- skifta og bjálva tekjuna
- skifta og bjálva klædningin
- gera nýggjar tørvandi tekniskar innleggingar
- gera nýggja atkomu frá Sjóvinnuhúsinum, við trappu og lyftu millum hæddirnar.

Umsøkjarin vil fremja umbyggingina í tøttum samstarvi við Tórshavnar havn og við atliti til at varðveita sermerktu byggilistarligu eyðkennini í hjallinum. Umsøkjarin søkir um at fáa útreiðslurnar fyri umbyggingina endurrindaðar umvegis leigukostnaðin, soleiðis at eitt áramál, við útgangsstøði í kostnaðinum, verður sett fyri, nær byrjað verður at gjalda. Kostnaðurin fyri umbyggingina er av umsøkjaranum mettur til 4,95 mió.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu

**Upplýsingar frá umsitingini**
Byggisamtykt:
Sambært almennu byggisamtyktini liggur Bacalao (matr. 970d) í øki B2 havnaøki, sum er útlagt til *"endamál, ið hava við skipaferðslu og fiskiskap at gera og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi"*. Skal matstovuvirksemi vera á økinum, skal byggisamtyktin tí helst broytast fyri hetta avmarkaða økið.

Fyrimunir:
Bygningurin Bacalao er sum heild í ringum standi, eisini hjallurin. Tað lekur inn í bygningin ymsastaðni, helst bæði frá takinum og inn gjøgnum betongmúrarnar, og hava lekarnir í stóran mun merkt standin inni í bygninginum.

Umbyggingin av hjallinum sambært hesi verkætlan fevnir eisini um at skifta takdúkin á 4.hædd (ið er á terassuni kring hjallin), og harvið verður eisini møguligt at fáa tett bygningin frá í erva.
Um bygningurin verður tættur frá í erva, so verður betri møguleiki fyri at fáa gagnnýtt størri part av bygninginum í framtíðini, tí tað vil krevja tað minni arbeiði at fáa bygningin heilt tættan, soleiðis at eitt umvælingararbeiði kann gerast.
Umbyggingin av hjallinum sambært hesi verkætlan fevnir harumframt eisini um at gera eina nýggja atkomu frá 5.hædd í Sjóvinnuhúsinum og inn mitt millum 3.- og 4.hædd í Bacalao. Trappa verður niður á 3.hædd og upp á 4.hædd og haðani víðari upp til hjallin á 5.hædd. Hendan atkoman fer somuleiðis at betra um framtíðar nýtslumøguleikarnar av bygninginum, tí verandi vánaligu atkomuviðurskifti eru ein týðandi forðing fyri nýtslumøguleikarnar.
(Hendan nýggja atkoman útloysir tó helst eina nýggja viðgerð av brunaviðurskiftunum í Sjóvinnuhúsinum, sum væntandi verður gjørd í samband við viðgerð av byggiloyvinum.)

Tórshavnar havn metir tískil, at ætlaða umbyggingin av bygninginum í samband við hesa verkætlanina verður ein fyrimunur fyri Tórshavnar havn, og fer at geva betri møguleikar fyri at kunna gera ætlanir fyri framtíðar gagnnýtslu av bygninginum.

Vandamál:
Tórshavnar havn metir, at størsti vandin í verkætlanini verður, um umbyggingin steðgar í hálvum gekki meðan bygningslutir standa opnir og óvardir, t.d. um leigarin ikki megnar at yvirhalda sínar fíggjarligu skyldur. Í slíkum førur noyðist Tórshavnar havn at taka um enda og fullføra umbyggingina fyri egna rokning. Tá ið umbyggingin er framd, metir Tórshavnar havn ikki, at stórvegis vandamál ella vansar verða av verkætlanini fyri Tórshavnar havn. Eitt langtíðar leigumál við Streetfood um hjallin við sjálvsagt viðføra, at 5.hædd (hjallurin) ikki kann nýtast til annað endamál í leigutíðarskeiðnum, men Tórshavnar havn metir, at fyrimunirnir við umbyggingini nevndir omanfyri eru væl størri enn vansin við at binda seg til leigumálið.

Leigugjald:
Umsøkjarin søkir um at fáa endurgoldið kostnaðin av umbyggingini gjøgnum leiguna, t.v.s. at leigan verður niðursett í eitt tíðarskeið. Vísandi til, at Tórshavnar havn fær fyrimunir við hesi umbygging, verður mett, at hetta er ein rímilig fyriskipan.

Sáttmálaviðurskifti:
Fyri at umsøkjarin kann søkja um byggiloyvi til verkætlanina, má hann hava leigusáttmála við eigaran, sum loyvir leigaranum at fremja ætlaðu umbyggingina á ogn eigarans.
Uppskot til 20 ára treytaðan leigusáttmála er gjørt. Sambært sáttmálanum fær leigarin loyvi til fyri egna rokning at gera broytingar í bygningin og installatiónir, sum eru neyðugar í virki leigarans. Leigarin kann draga kostnaðin av hesum frá leiguni yvir leigutíðarskeiðið, tó verður ásett ein ávís minstaleiga.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 24/08603-3 : Uppskot til leigusáttmála.

J.nr. 24/08603-1 Umsókn um leigu av hjallinum:
- Umsókn.docx
- Støðumynd.pdf
- Trappa.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. desember 2024 | Blað nr.: 1352<br><br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei'

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at gera ein treytaðan leigusáttmála við ÍVF (undir stovnan) "Streetfood Tórshavn" um leigu av hjallinum á 5. hædd á Bacalao sambært uppskoti til leigusáttmála J.Nr. 24/08603-3 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 26. november 2024:** Útsett.

### Ískoyti:

Nýtt broytt sáttmálauppskot er gjørt (Bacalao – Streetfood Tórshavn rev6). Í mun til fyrra uppskotið er broytingarnar í høvuðsheitum hesar:

- Leigarin verður eitt Sp/f í staðin fyri ÍVF.
- Tað er gjørt greiðari, at talan er um treytaðan leigusáttmála, har ið útleigarin kann uppsiga leigusáttmálan uttan ávaring um ikki ávísar treyir verða loknar. Hesar treytir eru m.a. ávísar tíðarfreistir fyri at útvega fígging, útvega neyðug loyvi, og fyri at fremja umbyggingina. Harumframt verður sett ein treyt um at leigarin setur bankatrygd áljóðandi 15% av byggikostnaðinum til tess at tryggja útleigaranum, at leigarin megnar at fremja kritisku partarnar av umbyggingini.

### Tilmæli

Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at gera ein treytaðan leigusáttmála við Sp/f Streetfood Tórshavn um leigu av hjallinum á 5. hædd á Bacalao sambært broyttum uppskoti til leigusáttmála J.nr. 24/08603-3 (Bacalao – Streetfood Tórshavn rev6) og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 09. desember 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 19:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| | Súsanna Olsen | |